| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>30. april 2026 | Blað nr.: 372<br>Forkvinnunnar merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 30. april 2026 **Kl**. 16:00
**Stað:** Býráðssalurin
**Málsnr:** 103/26-139/26

**FUNDARLEIÐARI:**
Elsa Berg

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Heðin Mortensen
Heidi Lava Elgeirsdóttir
Annita á Fríðriksmørk
Kristianna Winther Poulsen
Bergur Robert Dam Jensen
Guttormur í Skála
Annfinn Brekkstein
Tróndur Sigurðsson
Kári Johansen
Høgni Vilhelmsen
Birgir Nielsen
Jón Kragesteen

**LUTTÓKU EISINI:**
Eyðfríð Jacobsen
Fríður P. Dalsgarð
Hermann Mortensen
David Andresen
Jeanette Ellefsen Blaasvær
Øssur Patursson
Mortan Simonsen

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Jóan Petur Hentze

**PROTOKOLLFØRARI:**
Olga Knudsen/Anna Havmand

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 103/26 | 26/03195-1 | Anja Weyhe berst frá at møta á býráðsfundi 30. apríl 2026 | 375 |
| 104/26 | 26/00448-1 | Mál beind í nevndir 2026 | 376 |
| 105/26 | 25/03288-1 | Hølisviðurskifti í frítíðarskúlanum til børn í Eysturskúlanum | 378 |
| 106/26 | 25/08236-1 | Innskriving í forskúla og 1. flokk og grundupptøkuøkir / skúlaumdømir | 382 |
| 107/26 | 26/00816-2 | Næmingagjøld í Tórshavnar musikkskúla 2026 | 407 |
| 108/26 | 26/02810-2 | Skilaveggur/dúkur til ítróttahøllina á Hálsi og tólmenni til reingerð í ítróttahallum - 23/06134 | 411 |
| 109/26 | 26/03162-1 | Bygnaðarbroytingar í heilsu- og umsorganartænastuni 2026 | 413 |
| 110/26 | 25/08052-1 | Útstykkingarvegur á matr. nr. 203c í Kollafirði | 418 |
| 111/26 | 25/11095-1 | Vegagerð við Borgarahúsið í Kaldbak | 421 |
| 112/26 | 25/10118-1 | Ferðslutrygd við gonguteigar | 424 |
| 113/26 | 26/01377-1 | Verkætlan øki HX, GX1 og CX1 - biologisktreinsiverk | 427 |
| 114/26 | 25/05866-1 | Kanning av verandi støðu á kloakkleiðing við Sjósavnið | 429 |
| 115/26 | 26/01673-1 | Pumpustøð á Hvítanesi | 432 |
| 116/26 | 26/01674-2 | Nýtt mekaniskt reinsiverk við Sanatoriivegin í Hoydølum | 434 |
| 117/26 | 26/01675-1 | Rák-kanningar í Nólsoyarfirði | 436 |
| 118/26 | 26/01677-1 | Hosufóðring 2026 | 438 |
| 119/26 | 25/03603-2 | Spæliplláss á Signabø - 23/06361 | 440 |
| 120/26 | 25/06231-2 | Útbjóðing av matr. nr. 203c í Kollafirði til raðhúsa- ella íbúðarbygging - 21/02624 | 443 |
| 121/26 | 25/02101-1 | Útbjóðing av matr. nr. 1356, 1355 og 645a til lutaíbúðir - 21/04713 | 447 |
| 122/26 | 25/00828-2 | Fyrispurningur um frábýti og byggiloyvi á matr. nr. 1341d, undir Krákugjógv 28, Tórshavn - 24/08980 | 450 |
| 123/26 | 25/06993-3 | Umsókn at broyta serstaka byggisamtykt nr. 3 og almennu byggisamtyktina fyri matr. nr. 736æ, Tórshavn | 453 |
| 124/26 | 26/02792-1 | Broyting av ásetingum um byggi- og nýtlsutstig fyri A1 øki í almennu byggisamtyktini | 455 |
| 125/26 | 26/00958-4 | Broyting av almennu byggisamtyktini fyri matr. nr. 1435b við Varðagøtu. Frá A1 til A4. | 457 |

| **Býráðsfundur**<br>30. april 2026 | Blað nr.: 374<br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|


| | | | |
|---|---|---|---|
| 126/26 | 25/00954-1 | Nýggj serstøk byggisamtykt fyri Rabarbukvarterið | 459 |
| 127/26 | 25/01005-16 | Nýggj serstøk byggisamtykt fyri matr. nr 1458a, Tórshavn | 467 |
| 128/26 | 25/01086-2 | Broyting av serstøku byggisamtykt nr. 4 fyri Tinganes og gomlu Havnina | 471 |
| 129/26 | 25/01104-1 | Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað | 481 |
| 130/26 | 25/05032-8 | Nýggj serstøk byggisamtykt fyri matr. nr. 1122a, Tórshavn - 22/05642 | 489 |
| 131/26 | 25/05927-1 | Skráseting av náttúrusløgum í TK | 491 |
| 132/26 | 25/09219-3 | Leigumál. Kommunan leigar lendi til Transformarastøð. SEV. Øki á Bøllureyni. matr.nr. 139a, Tórshavn. | 496 |
| 133/26 | 26/03040-2 | Nevndarlimur Visit Tórshavn 2026 | 498 |
| 134/26 | 26/02479-1 | Framflytingar fyri roknskaparárið 2025 | 500 |
| 135/26 | 26/02478-1 | Ársroknskapur fyri Tórshavnar kommunu 2025 | 502 |
| 136/26 | 26/00100-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2026 | 504 |
| 137/26 | 25/09934-3 | Umsókn um leingjan av leigusáttmálanum matr. nr. 970n, Álakeri 20, Tórshavn | 506 |
| 138/26 | 26/02510-8 | Umsókn um útstykkingarloyvi á matr. nr. 1233a og 1233b, Tórshavn | 508 |
| 139/26 | 25/08430-5 | Broyting av serstøku byggisamtykt nr. 7, matr. nr. 1314 - Grannalág | 511 |

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>30. april 2026 | Blað nr.: 375<br><br>Forkvinnunnar merki: |

**Til viðgerðar**

## 103/26 Anja Weyhe berst frá at møta á býráðsfundi 30. apríl 2026

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.04.2026 | 103/26 | 26/03195-1 |

**Málslýsing**
Anja Weyhe hevur boðað frá, at henni berst frá at møta til býráðsfundin.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunustýrislógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Jón Kragesteen eru loknar.

**Býráðsfundur 30. apríl 2026:** Góðkent.

| | **Býráðsfundur**<br>30. april 2026 | Blað nr.: 376<br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

# 104/26 Mál beind í nevndir 2026

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 29.01.2026 | 3/26 | 26/00448-1 |
| 2 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 26/26 | 26/00448-1 |
| 3 Býráðsfundur | 19.03.2026 | 73/26 | 26/00448-1 |
| 4 Býráðsfundur | 30.04.2026 | 104/26 | 26/00448-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☐**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli**:

**Býráðsfundur 29. januar 2026:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Framlagt.

**Býráðsfundur 19. mars 2026:** Framlagt.

**Býráðsfundur 30. apríl 2026:** Framlagt.

# 105/26 Hølisviðurskifti í frítíðarskúlanum til børn í Eysturskúlanum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 12.03.2025 | 34/25 | 25/03288-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.04.2026 | 97/26 | 25/03288-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 15.04.2026 | 63/26 | 25/03288-1 |
| 4 Býráðsfundur | 30.04.2026 | 105/26 | 25/03288-1 |

**Upprunin til málið**
Ónøktandi arbeiðsumstøður hjá starvsfólkum og børnum vegna hølisviðurskifti.

**Lýsing av málinum**
Frítíðarskúlin Smílibýlið er frítíðarskúlatilboð til næmingar í 1. og 2. flokki í Eysturskúlanum.

Frítíðarskúlin er á tveimum staðsetingum í løtuni:

- Garðalon – tað er ein fyribils lon til børn í 1. flokki. Lonin er staðsett í skúlagarðinum við Eysturskúlanum.
- Smílibýlið – tað er eitt sethús á Stoffalág 82 sum er til børnini í 2 flokki og børn í serskúlatilboðnum hjá Eysturskúlanum.

Hóast børn og starvsfólk eru býtt á tvær ymiskar staðsetingar er ein leiðari. Hetta ger tað truplari at leiða starvsfólk og børn. Tað er eisini torført at brúka starvsfólkatímarnar skynsamt og hava ein skynsaman rakstur, tá frítíðarskúlin er fleiri staðsetingum. At hølisumstøðurnar eru als ikki eru egnaðar til frítíðarskúla virksemi ger tað enn truplari.

<u>Hølisumstøður í Smílibýlinum</u>
Frítíðarskúlin Smílibýlið er eitt vanligt sethús, sum er innrættað og umvælt í tann mun tað letur seg gera til at hýsa frítíðarskúlabørnum.
Tað eru sera nógvar avbjóðingar við umstøðunum í Smílibýlinum, sum eru við til at gera fortreytirnar vánaligar fyri at skipa eitt gott námsfrøðiligt tilboð og sertilboð tilboð.

Sum heild er tað sera trongt fyri børn og starvsfólk. Har er eitt lítið rúm, ið verður brúkt til fyrireiking, pausur, foreldraprát, goymslu og tílíkt. Hetta er ikki nøktandi.

Tað mangla størri rúm í frítíðarskúlanum. Ístaðin er tað nógv smá rúm í Smílibýlinum, og tí er tað torførari hjá starvsfólkum at hava yvirlit yvir børnunum.

Ljóðviðurskiftini eru stak vánalig. Sambært stovnsleiðaranum er loftshæddin í nógvum av rúmunum lægri enn 2,5 metur, sum er minsta mark fyri loftshædd í dagstovnum sambært ARB-vegleiðing hjá Arbeiðseftirlitinum.

Í 2017 sendi foreldraráðið eina áheitan til býráðið um at dagføra og umskipa uttandura spæliøkið hjá Smílibýlinum, m.a. tí bygningurin er for trongur til at húsa øllum børunum inni. Skrivið er viðfest í málinum.

*Serstovan í Smílibýlinum*
Í løtuni er einki høli til serstovuna burturav. Tey hava eitt lítið rúm, ið er aftanfyri verkstaðin, sum serstovnan brúkar, og har børnini kunnu trekkja seg, um tey hava brúk fyri frið.

Trongligu umstøðurnar hava við sær, at fleiri av børnunum frá serskúlatilboðnum megna ikki vera í frítíðarskúla í Smílibýlinum. Hesi eru flutt til onnur meira hóskandi frítíðarskúlatilboði, men sum ikki hevur tilknýtið til Eysturskúlan.

<u>Hølisumstøður í Garðalon</u>
Í 2022 hevði Smílibýlið átrokandi tørv á meira fermetrum. Frítíðarskúlin var tískil noyddur at flyta børnini í 1. flokki í fyribils lonina í skúlagarðinum við Eysturskúlan, sum er innrættað til tvær skúlastovur, við inngongd í hvør sínum enda. Lonin verður nevnd Garðalon.

Eysturskúlin hevur víst frítíðarskúlanum sera stóra vælvild, m.a. við at geva frítíðarskúlanum annan partin at fyribils lonini. Harafturat sleppur frítíðarskúlin at brúka hin partin av lonini seinnapartar, tá undirvísingin er liðug.
Av tí at barnatalið í Eysturskúlanum veksur, hevur skúlin tørv á undirvísingarhølunum.

Hølisviðurskiftini í Garðalon eru sera avbjóðandi. Talan er um avlong høli til 36 børn umframt starvsfólk. Samansetingin av trongum hølum og høgum barnatali ger, at tað er nógvur lamur inni og eingin fær trekt seg til síðis í eitt annað rúm.
Garðalon hevur ves til børn og starvsfólk. Men tað er einki pausurúm, einki fyrireikingarrúm, eingin skrivstova til leiðaran og eingin rúm til børnini um tey ynskja at spæla stillisliga ella taka seg burtur frá hinum eina løtu. Harumframt er einki høli til at hava foreldrasamrøður.
Harumframt eru starvsfólkini bundin av at brúka hitt hølið í Garðalon, tá undirvísingin í Eysturskúlanum er liðug.

**Meting av fermetratalið til nýggjan frítíðarskúlabygning til 0.-2. flokk**
Ein leyslig meting av støddini á frítíðarskúlanum til næmingar í Eysturskúlanum er 700 fermetrar til 160 børn. Tá er umleið 40 fermetrar taldir uppí til serstovuna, sum er til næmingar í serflokkinum í Eysturskúlanum. Harumframt er neyðugt við nøktandi uttanumøkið.
Í fermetratalinum er alt íroknað inni í bygninginum, so sum frí uppihaldsrúm, vesir, starvsfólkarúm, goymslurúm, klædarúm, verkstaður osfr.

Tá farið verður í holt við byggiverkætlanini eigur býráðið og viðkomandi politisku nevndir at viðgera, um hølir skulu byggjast til serflokkin í Eysturskúlanum. Serflokkurin er í dag staðsettur í lonunum í Hoydølum.

Av tí at arbeiðsumstøðurnar hjá starvsfólki og børnum eru stak vánaligar, eiga fyrireikingarnar at fara í gongd sum skjótast.

Byggi- og býarskipanardeildin vísir tvær møguligar staðsetingar. Hesar eru at byggja omaná A-lonina har sum grunddeildin heldur til í dag ella at byggja ein frítíðarskúla vestan fyri Eysturvøll. Sí bls. 5-7 í samtykt nr. 131/24 í Byggi- og býarskipanarnevndini, sum er viðfest í málinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Dagstovnalógin
Løgtingslóg nr. 70 um arbeiðsumhvørvi frá 11. mai 2000.
Kunngerð nr. 8 um innrætting av føstum arbeiðsrúmum frá 13. februar 2002.
ARB-Vegleiðing V-A001-3: Stødd av stovum á dagstovnum

**Upplýsingar frá umsitingini**
-

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
bls. 5-7 í samtykt nr. 131/24
j.nr. 18/00489 Foreldraráðið Frítíðarskúlin Smílibýlið : Áheitan um dagføring og umskipan av spæliøkinum rundan um Smílibýlið

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Kunnað verður um málið.

Trivnaðarstjórin og deildarleiðarin fyri Barna- og ungdómsdeildina mæla til, at mentamálanevndin samtykkir at heita á Byggi- og býarskipanarnevndina um at taka málið um staðseting uppaftur til viðgerðar.

**Mentamálanevndin 12. mars 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Upprunaliga vísti Býarskipanardeildin á tvær staðsetingar í økinum kring Eysturskúlan. Onnur var at byggja omaná A-lonina í Eysturskúlanum, har sum grunddeildin heldur til í dag, og hin var at byggja ein frítíðarskúla vestan fyri Eysturvøll. Sí skjal nr. *25/03288-6, Uppruna staðsetingar við Eysturskúlan*.

Eftir at byggi- og býarskipanarnevndin tann 17. juni 2024 samtykti at staðseta frítíðarskúlan á økinum við Eysturskúlan, og nevndin ikki tók undir við at staðseta vestan fyri Eysturvøllin, so steðgaði málið nakað upp, tí skúlin vísti á, at tað var óheppið at byggja frítíðarskúlan á skúlaøkinum, hetta tí at skúlin helst fór at skula byggja út fyri at nøkta nýggj lógarkrøv til skúlavirksemið.

Sí málslýsing í mál nr. 26/01425, skjal nr. *26/01425-1, Viðvíkjandi matr. nr. 704a á Djóni í Geil gøtu 49*, har býráðið hevur samtykt at keypa matr. nr. 704a til virksemið hjá Frítíðarskúlanum Smílibýlið.

Býarskipanardeildin metir staðsetingina og ognina matr. nr. 704a, Tórshavn sum eina góða loysn uppá hølisavbjóðingarnar hjá frítíðarskúlanum hjá Eysturskúlanum. Staðsetingin er tætt upp at skúlanum við ein blindveg, og liggur í gongufrástøðu til Eysturvøllin.

Støddin á økinum er 2.445 $m^2$, sum verður mett at nøkta tørvin á frítíðarskúlanum, eisini at byggja eitt minni spælipláss á økinum.

Í byggisamtyktini liggur matr nr. 704a í A1 øki, sum sambært almennu byggisamtyktini er lagt til stakhús. *Í sambandi við bústaðarøki kann byggivaldið geva serloyvi til annað virksemi sum handlar, smærri vinnuvirki*

*og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til, treytað av, at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum sethúsabýlingur, og sum lúka treytirnar í flokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu.*

Tað hevur verið siðvenja, at tílíkir smærri stovnar, sum t.d. barnagarðar, liggja í sethúsaøkjum. Hetta er bygging, ið ikki verður mett gera seg inn á dámin í økinum, og tað verður mett skynsamt at staðseta tílíkt virksemi í økinum, har børnini búgva og virka. Hetta er samleikafremjandi fyri eitt øki, børnini fáa eitt serligt tilknýti til økið tey búgva í, og so er tað umhvørvisliga burðardygt, av tí at frástøðan millum heim og stovn er stutt.

Í mun til at staðseta tílíkt virksemi í bústaðarøki krevst "serloyvi frá byggivaldinum". Hetta inniber millum annað, at byggiloyvið skal viðgerast í nevnd og tað skal til grannahoyring.

Tað er avbjóðandi at finna nøktandi hølir til stovnar í eldri bygdum økjum, tí økini vanliga eru fult útbygd. Tískil var keypið av hesi ognini neyðugt fyri at rúma virkseminum, og við hesi staðseting kann virksemið hjá frítíðarskúlanum endiliga fáa nøktandi hølir og umstøður, sum er veruliga gleðiligt fyri okkara skúlabørn.

**Skjøl:**
Skjal nr. *25/03288-6, Uppruna staðsetingar við Eysturskúlan*
Skjal nr. *26/01425-1, Viðvíkjandi matr. nr. 704a á Djóni í Geil gøtu 49*

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- at frítíðarskúlin Smílibýlið verður staðsettur á matr. nr. 704a,
  at málið verður beint í býráðið umvegis mentamálanevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. apríl 2026:** Ein meiriluti, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Birgir Nielsen, tekur undir við tilmælinum.

Kári Johansen tekur ikki undir við tilmælinum.

**Mentamálanevndin 15. apríl 2026:** Ein meiriluti, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Bergur Robert Dam Jensen, Heðin Mortensen og Høgni Vilhelmsen, samtykti at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum, men mælir til at frítíðarskúlin verður bygdur á kommunala økinum í staðin.

**Býráðsfundur 30. apríl 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í byggi- og býarskipanar-nevndini og mentamálanevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri, 3 atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Jón Kragesteen, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, og Annfinn Brekkstein.

# 106/26 Innskriving í forskúla og 1. flokk og grundupptøkuøkir / skúlaumdømir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 04.09.2025 | 49/25 | 25/08236-1 |
| 2 Trivnaðarnevndin | 02.10.2025 | 60/25 | 25/08236-1 |
| 3 Trivnaðarnevndin | 06.11.2025 | 64/25 | 25/08236-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 12.11.2025 | 186/25 | 25/08236-1 |
| 5 Trivnaðarnevndin | 27.11.2025 | 74/25 | 25/08236-1 |
| 6 Mentamálanevndin | 26.11.2025 | 139/25 | 25/08236-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 03.12.2025 | 218/25 | 25/08236-1 |
| 8 Trivnaðarnevndin | 15.01.2026 | 1/26 | 25/08236-1 |
| 9 Trivnaðarnevndin | 12.02.2026 | 13/26 | 25/08236-1 |
| 10 Trivnaðarnevndin | 12.03.2026 | 20/26 | 25/08236-1 |
| 11 Býráðsfundur | 19.03.2026 | 97/26 | 25/08236-1 |
| 12 Trivnaðarnevndin | 28.04.2026 | 26/26 | 25/08236-1 |
| 13 Býráðsfundur | 30.04.2026 | 106/26 | 25/08236-1 |

**Upprunin til málið**
Avbjóðingar við skúlainnskriving skúlaárið 2025/26 og komandi skúlaár.

**Lýsing av málinum**

Innskriving til skúlaárið 2025/26

Innskriving í fyrsta flokk, forskúla og frítíðarskúla í Tórshavnar kommunu er opin frá hálvum desember til hálvan januar, tað árið børnini skulu byrja í skúla. Tá innskrivingin er liðug, verða plássini tillutað eftir galdandi leiðreglum fyri upptøku av børnum í kommunalu fólkaskúlarnar í Tórshavnar kommunu. Undirvísingarskyldan byrjar í august tað árið barnið fyllir 7 ár, og sambært fólkaskúlalógini § 44 fer innskriving í fólkaskúlan fram við ársbyrjan.

Viðvíkjandi næmingatali er lógarbroytingin um 22 næmingar í hvørjum flokki galdandi frá skúlaárinum 2025/26, talið er galdandi fyri fyrsta flokk i ár og verður síðani sett í gildi eftir níggju árum.

Í miðstaðarøkinum í Tórshavnar kommunu var ikki pláss fyri øllum børnunum í teimum skúlum, tey vóru skrivað inn í, og ti var neyðugt at stovna ein flokk aftrat í Tórshavnar kommunu, og tann flokkurin er stovnaður í Sankta Frans skúla. So tey børn, sum upprunaliga ikki fingu pláss í Skúlanum á Argjahamri, í Skúlanum á Fløtum og í Sankta Frans skúla, fingu pláss í Sankta Frans skúla.

Seinni fekk Tórshavnar kommuna frávik frá næmingatalinum, so børnini á Argjum fingu pláss í skúlanum har, og børnini í vesturbýnum fingu pláss í Skúlanum á Fløtum. Neyðugt var kortini at halda fast við

eykaflokkin í Sankta Frans skúla, og øll børnini, sum vóru innskrivað í fyrsta flokk í Sankta Frans skúla umframt nøkur aftrat, fingu pláss í skúlanum.

Endaliga næmingatalið er tøkt fyrst í september, so talvan niðanfyri vísir fyribils tøl í fyrstu – og forskúlaflokkunum

| | 1. flokkur | forskúli |
|---|---|---|
| Eysturskúlin | 42 | |
| Hoyvíkar sk. | 40 | |
| Kaldbaks skúli | 6 | 2 |
| Kollafjarðar skúli | 20 | 0 |
| Nólsoyar sk./forsk. líkn. | 1 | 3 |
| Sankta Frans skúli | 54 | 47 |
| Skúlin á Argjahamri | 48 | 44 |
| Skúlin á Fløtum | 70 | 64 |
| Skúlin við Løgmannabre | 47 | |
| Velbastaðar skúli | 10 | |
| Lítliskúli | 10 | 8 |
| tils. | 348 | 168 |

Grundupptøkuøki

Innskriving í forskúla og 1. flokk er skipað út frá einum uppbýti av kommununi í skúlagrundupptøkuøkir. Í leiðreglunum fyri innskriving verður stremba eftir, at børn fáa pláss í skúlanum í teirra grundupptøkuøki, og har tað ikki letur seg gera í einum av grannaskúlunum. Umsitingin kann broyta markið millum grundupptøkuøkini, tá tað ikki er nóg mikið av plássum í einum grundupptøkuøki. Umsitingin hevur tilvitað nýtt heitið grundupptøkuøki og ikki skúlaumdømi, sum verður nýtt í fólkaskúlalógini, og sum hevur strangari áseting um flyting av næmingum og stovnan av eyka flokkum.

Høvuðsendamálið við fólkaskúlalógini og leiðreglunum um innskriving er at tryggja øllum børnum skúlapláss og síðani í øðrum lagi, at børn í einum býarparti so vítt gjørligt fáa skúlatilboð í tilhoyrandi skúla. T.d. fáa børn úr eysturbýnum so vítt gjørligt skúlapláss í Eysturskúlanum.

Skúlaumdømi

Barna og útbúgvingarmálaráðið og Undirvísingarstýrið meta tey størru grundupptøkuøkini ómiðstaðarøkinum sum eitt skúlaumdømi, tvs at kommunan skal veita skúlapláss til øll børn í skúlaumdøminum og útvega eyka skúlastovur um tað er neyðugt.

Tvs at Argir, vesturbýurin, miðbýurin, eysturbýurin og Hoyvík eru eitt skúlaumdømi meðan bygdirnar við bygdaskúlum, Kollafjørður, Kaldbak og Nólsoy eru sjálvstøðug skúlaumdømi.

Í skúlainnskrivingini 2025/26 var støðan tann í miðstaðarskúlaumdøminum, at tað við einum eyka flokki í Sankta Frans skúla var gjørligt at veita øllum næmingum í 1. flokki skúlapláss, við einum hóskandi tali av tøkum plássum. Men, tað var ikki gjørligt at veita øllum børnum á Argjum og í vesturbýnum pláss í teirra heimaskúla.

Avbjóðingar í innskriving og tillaging av grundupptøkuøkjum

Viðgerðin av skúlainnskriving í 1. flokk og møguleikin at gera broytingar millum grundupptøkuøkið er tengd at innskriving í teir forskúlar, ið eru settir á stovn. Í ár var tað í Skúlanum á Argjahamri, Skúlunum á Fløtum og í Sankta Frans skúla. Av tí at børnini sum longu vóru innskrivað í forskúla halda áfram í

viðkomandi skúla, vóru bert nøkur fá pláss eftir í 1. flokki á Skúlanum á Fløtum og í Sankta Frans skúla, sum børn í grundupptøkuøkinum høvdu fyrsta rætt til. Tí var ikki gjørligt at broyta markið millum grundupptøkuøkini, soleiðis at møguleiki var at útvega pláss til børn av Argjum í Skúlanum av Fløtum og pláss til børn úr vesturbýnum í Sankta Frans skúla. Við fyritreytini at ein eyka flokkur var settur á stovn í Sankta Frans skúla gjørdist úrslitið, at næmingar av Argjum skuldu innskrivast í Sankta Frans skúla.

Fleiri partar gjørdu var við seg leypi av viðgerðini hjá Mentamáldeidini av innskrivingini. Einstøk foreldur og tveir foreldrabólkar gjørdu vart við, at tað als ikki er nøktandi at foreldur í innskrivingini verða sett í eina tvístøðu har tey kunnu velja 6 ára tilboð frá, fyri at innskriva í forskúla fyri at trygga barninum pláss í 1. flokki, í skúlanum í teirra grundupptøkuøkið.

Skúlastýrið fyri Skúlan á Argjahamri gjørdi saman við skúlastjóranum eisini vart við týdningin av at Argjabørn fáa skúlpláss í nærumhvørvinum og at skúlin vildi viðvirka til ein loysn. Skúlastjórarnir og skúlarnir vóru sum heild sinnaðir at víkja frá næminghámarkinum fyri at loysa avbjóðingina.

Málið av leiðsluni og borgarstjóranum tikið upp við Barna og útbúgvingarmálaráðið ,við tí úrsliti at undantak er veitt frá næminghámarkinum skúlárini 2025/26 og 2026/27. Við hesi broyting var akkurát rásarúm at veita skúlapláss til allar næmingar høvdu innskrivað í forskúla og frítíðarskúla í teirra heimaskúlum.

<u>Barngrundarlag í miðstaðarøkinum og tørvur á eyka 1. flokkum komandi árini</u>

Næsta skúlaár 2026/27 er næmingatalið til 1. flokk á sama støði sum í ár og við undantakinum frá næminghámarkinum,verður aftur tørvur á einum eyka flokki. Í mun til barnatalið í grundupptøkuøkjunum er tørvurin størstur á Argjum og í miðbýnum.

Skúlaárið 2027/28 er næmingatlið til 1. flokk eitt vet hægri enn í ár, men nú verður undantakið frá næminghámarkinum ikki longur galdandi. Tá verður tørvur á tveimum eyka flokkum, einum á Argjum og einum í miðbýnum.

Skúlaárið 2028/29 minkar núverandi næmingatal til 1. flokk við einum flokki. Við tilflyting kann tó gerast tørvur á einum eyka flokki, har tørvurin helst verður størstur í Hoyvík.

Skúlaárið 2029/30 Minkar núverandi næmingatal til 1. flokk aftur. Tilflyting kann tó viðføra tørv á einum eyka flokki, sannlíkt á Argjum

Skúlaárið 2030/31 minkar næmingatalið til 1. flokk munandi og hóast eina javna tilflyting verður møguliga tørvur á einum flokki færri, møguliga í Skúlanum á Fløtum.

Skúlaárið 2031/32 Næmingatalið er framvegis lágt og hóast ein javna tilflyting verður møguliga tørvur á einum flokki færri, møguliga í Sankta Frans skúla.

Samanumtikið er tørvur á einum eyka skúlaspori í miðstaðarøkinum fram til skúlaárið 2029/30, orsaka av lækkingini av næmingahámarkinum. Undantakið frá næmingahámarkinum gevur kommununi eitt neyðugt skotbráð at loysa avbjóðingina.

Minkandi næmingatalið, ið fær ávirkan skúlaárið 2030/31 viðførir tøk skúlapláss, men tað er ein positiv avbjóðing.

<u>Møguligar loysnir</u>

a) Í verandi skipan og eftir leiðreglunum ber til at laga grundupptøkuøkini og gera smærri broytingar í teimum, so mørkini verða lagað eftir mettum tali á børnum í ymsu økjunum, sum hava aldur at fara í

forskúla og fyrsta flokk. Hetta eigur at verða gjørt í so mikið góðari tíð, at grundupptøkuøkini verða løgd á heimasíðuna um heystið áðrenn innskriving.

Umsitingin metir ikki, at hetta amboð er nøktandi til at loysa avbjóðingarnar við, at børn búsitandi í einum øki fáa pláss í skúlanum, sum hoyrir til økið. Haraftrat kann tað skapa órógv millum foreldur, sum búgva nærindis marki millum tvey grundupptøkuøki, tí tey okkurt ár hoyra til eitt øki og so árið eftir til eitt annað. Tað kann vera torført hjá teimum at velja, hvønn skúla teirra barn/børn skulu skrivast inn í.

b) Tórshavnar kommuna kann velja at býta plássini út, so foreldrini fáa ávíst eitt pláss í skúla til teirra barn. Plássini verða so ávíst eftir verandi leiðreglum.

Flestu foreldur velja at skriva barnið/børnini inn í skúlan í grannalagnum, hetta so børnini ganga í skúla saman við teimum børnum, sum tey kenna, spæla við og fylgjast til ítrótt og onnur frítíðavirksemi saman við børnum í grannalagnum.

Við tílíkari skipan, hevði umsitingin kunnað roynt at stýrt soleiðis, at børn í sama grannalag fingu pláss í sama skúla, um ikki øll í einum og sama skúla, so at fleiri børn í tínum grannalag gingu í sama skúla sum tú.

Avbjóðingin við hesi skipan er so tann, at atlit verður ikki tikið at ynskjum hjá foreldrum, og at okkurt grannalag verður býtt sundur.

c) Leiðreglurnar fyri upptøku kunnu broytast, so plássini í einum forskúla bert eru til børn, sum búgva í grundupptøkuøkinum hjá skúlanum.

Eitt barn, sum er skrivað inn í forskúla, er skrivað inn í skúlan og skal ikki skrivast inn av nýggjum. Forskúlar eru ikki í øllum skúlum í Tórshavnar kommunu, og tað ger so tað, at foreldur, sum búgva í grundupptøkuøkjum, har forskúli ikki er, skriva barnið upp í forskúla í øðrum øki. Eru ikki nóg nógv børn, sum hava systkin í skúlanum ella búgva í økinum skriva inn í forskúla, kunnu børn uttan fyri økið fáa avlopsplássini, og tey verða so skrivað inn í skúlan og halda fram í skúlanum, til tey eru liðug við 9. flokk.

Meira enn helmingurin av børnunum í miðstaðarøkinum verða í dag innskriva í forskúla i Sankta frans skúla, Skúlanum á Fløtum og Skúlanum á Argjahamri.

Ein loysn er, at forskúlar verða skipaðir í øllum fólkaskúlunum í Tórshavnar kommunu, og at fyribils hølisloysnir verða, til allir skúlarnir eru útbygdir til at hýsa forskúla eisini.

Sum støðan er nú, hava øll foreldur í kommununi ikki sama møguleika at fáa pláss í forskúla.

d) møguleiki kundi eisini verið at flutt innskrivingina í 1. flokk eitt ár fram, soleiðis at innskrivingin í forskúla verður løgd tilrættis eftir hvør ið eftir leiðreglunum eigur at hava rætt til 1. flokk. Tað kann gev eina avbjóðing at øll plássini í forskúlanum ikki verða brúkt, tí tey skulu standa tøk til børn ið eru innskrivað til 1. flokk í viðkomandi skúla.

e) Miðstaðarøkið kann verða býtt upp í trý skúlaumdømi, eitt fyri Argir og vesturbýin, eitt fyri miðbýin og eysturbýin og eitt fyri Hoyvik. Soleiðis at Skúlin á Argjahamri og Skúlin á Fløtum hava felags upptøkuøki, Sankta Frans skúli og Eysturskúlin hava felagsupptøkutøki og Hoyvíkar skúli og Skúlin við Løgmannabreyt hava felags upptøkuøki.

Hesi trý øki áttu so at havt ta skipan, at tá ov nógvir næmingar eru til flokkatalið økinum, so verður játtað tímatal til ein flokk aftrat. Tað krevur tó, at Barna- og útbúgvingamálaráðið góðtekur hetta og ikki heldur fast við, at so leingi pláss er í onkrum av skúlunum í miðstaðarøkinum verður ikki játtað til flokkar aftrat.

Krøvini til kommununa verða eisini størri, tí kommunan skal útvega fleiri undirvísingarhølir og raksturin av teimum.

f) Tað kundi verið so mikið rúmsátt í skúlunum, at um ein árgangur í økinum var ov stórur til plássini í skúlanum í økinum, so var møguleiki at stovna ein flokk aftrat til árgangin. T.d. kundu tríggjar skúlastovur verið eyka í hvørjum skúla, so tey árini neyðugt var við einum flokki aftrat í økinum, var pláss í skúlanum.

Her er tó eisini neyðugt, at landsmyndugleikin góðtekur hetta og ikki heldur fast við, at so leingi pláss er í onkrum av skúlunum í miðstaðarøkinum verður ikki játtað til flokkar aftrat.

Fundur við umboð fyri Barna- og útbúgvingarmálaráðið og Undirvísingarstýrið

Mentamáladeildin hevði ein stuttan fund við umboð fyri BUMR og umboð fyri UVS í juni. Har kunnað varð um avbjóðingar við innskriving sum heild, og avbjóðingarnar sum eru, tí tvær skipanir eru til tey 6 ára gomlu børnini. Forskúli er í nøkrum av skúlunum og 6 ára tilboð í nøkrum av dagstovnunum. Trupulleikin er, at í skúlum har forskúlar eru, velja summi foreldur forskúla fyri at tryggja, at barnið fær pláss í tí skúlanum, sum er í upptøkuøkinum, sum tey búgva í. Í summum førum førdi hetta so til, at ov fá børn vóru til 6 ára tilboð í dagstovni/dagstovnum í økinum, og tilboðið har tí datt niður fyri.

Greitt var eisini frá, at Tórshavnar kommuna ætlar ikki at koma í somu støðu, sum til skúlaárið 2025/26, og ynskir at samskifta við Barna- og útbúgvingarmálaráðið og Undirvísingarstýrið um loysnir.

Kunnað var eisini um barnatalið í kommununi býtt á upptøkuøkini, og við støði í teimum, var greitt frá, hvussu innskriving væntandi fór at verða komandi árini.

Avtalað varð, at mentamáladeildin kallar inn til ein fund aftur nú eftir summarferiuna.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☐**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |

| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |
|---|---|---|---|---|

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á mentamáladeildini mæla til at kanna verður um heimild er í fólkaskúlalógini og um góðkenning fæst frá BUMR at skipa miðstaðarøkið í Tórshavnar kommunu í fleiri skúlaumdømi, fyri at styrkja rættin hjá  børnum til skúlatiboð í nærumhvørvinum.

Somuleiðis verður mælt til at kanna um heimild er at skipa fyri innskrivingin í 1. flokk eitt ár fyrr enn í dag, soleiðis at størri møguleiki er at fáa pláss í 1. fl. hóast barnið ikki gongur í forskúla.

**Trivnaðarnevndin 04. september 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at leggja málið aftur til trivnaðarnevndin skjótast viðvíkjandi niðurstøðu frá BUMR.

Ein meiriluti: Heidi Lava Elgeirsdóttir, Birgir Nielsen og Høgni Vilhelmsen, mælir harumframt til, at Skúlin á Argjahamri verður egið skúlaumdømi.

**Ískoyti:**

**Fundur við Undirvísingarstýrið og Barna- og útbúgvingarmálaráðið**
Umboð fyri mentamáladeildina høvdu fund við umboð fyri Undirvísingarstýrið og umboð fyri Barna- og útbúgvingarmálanráðið um møguleikarnar at skipa økini í miðstaðarøkinum í færri skúlaumdømi og møguleikan at skriva børn inn í fyrsta flokk eitt ár fyrr enn í dag.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið ger vart við, at gunduppptøkuøki eru tað sama sum skúlaumdømi, og tað er tað heitið, sum verður brúkt í lógini.

Sambært § 44 stk. 1 fer innskriving í skúlan fram við ársbyrjan. Bæði løgfrøðingur á stjórnarskrivstovuni og landsmyndugleikarnir eru samdir um, at skal hetta broytast, so børn verða skrivað inn eitt ár fyrr, er neyðugt at broyta fólkaskúlalógina. Ynskir Tórshavnar kommuna at skriva børn inn í skúla fyrr, kann hon senda inn ynski um broyting í fólkaskúlalógini.

Viðvíkjandi færri skúlaumdømum og játtan til hvørt umdømi sær, vísti Undirvísingarstýrið á, at ynskti Tórshavnar kommuna fleiri flokkar í ymsu skúlunum, so skal kommunan søkja um ein broyttan skúlabygnað við fleiri sporum, og  veðrur umsóknin játtað, so skal kommunan byggja ávísu skúlarnar út til at kunna taka eitt spor aftrat.

Skipanin við færri skúlaumdømum og játtan til hvørt øki sær, krevur sostatt eina stóra íløgu til útbygging til eitt spor aftrat í t.d. Hoyvík, eitt vesturbýnum og  eitt á Argjum. Haraftrat varð víst á, at

Undirvísingarstýrið og Barna- og útbúgvingarmálaráðið vænta ikki eina hægri játtan til fólkaskúlan nógvu komandi árini, so verða fleiri spor í Tórshavnar kommunu, verður neyðugt at fíggja tey av verandi játtan og taka tað av onkra aðrastaðni á fólkaskúlaøkinum.

**Møgulig broyting í innskriving í forskúla**
Mentamáladeildin, Barna og útbúgvingarmálaráðið og Undirvísingarstýrið eru samd um, at tað eftir fólkaskúlalógini ikki er heimild at framskunda innskriving í 1. flokk.

Kommunan hevur tó møguleika at broyta reglurnar um innskriving í forskúla, so at hon ikki bindur innskriving í 1. flokk meira enn neyðugt og í minni mun birtir undir, at foreldur kenna seg noydd at velja forskúla fyri at fáa pláss í 1. flokki.

Tað kann gerast við at broyta leiðreglurnar fyri innskriving, so tað bert eru børn sum búgva í skúlaumdøminum, ið hava rætt til pláss í forskúlanum í skúlanum í økinum.

Fyri forskúlar verður ein møgulig avleiðing, at tað verða færri børn innskrivað í forskúlan, og tað verða fleiri tøk pláss í 1. flokki árið eftir, sum næmingar við systkjum í skúlanum og aðrir næmingar í skúlaumdøminum hava rætt til, meðan børn úr øðrum skúlaumdømum ikki fáa pláss.

Her skal tryggjast í hvønn mun heimild er at taka burtur møguleikan hjá børnum í ávísum økjum at sleppa í forskúla.

Í longdini fer hetta at minka um talið av børnum úr øðrum skúlumdømum sum hava systkin í skúlanum og harvið rætt til pláss í skúlanum,

Tað kann gerast neyðugt at tryggja forskúlunum eina minimums-normering í sambandi við sveiggj í barnatali og lægri barnatal.

**Færri skúlaumdømi**
**§ 29.** Skúlamyndugleikin á staðnum býtir vanliga sítt øki upp í skúlaumdømi, ið kunnu vera størri fyri skúlans eldru floksstig enn fyri tey yngru, smb. tó § 31, 1. stk. Landsstýrismaðurin kann góðkenna, at eitt skúlaumdømi er felags fyri fleiri skúlar.

**§ 32.** 9) Ein skúlabygnaður skal verða gjørdur fyri fólkaskúlan í kommununi, sbrt. § 47, stk. 6:
1) Navnið á tí einstaka skúlanum. Um so er, at kommunan hevur býtt sítt øki upp í skúlaumdømi, smb. § 29, so skulu nøvnini á umdømunum verða tilskilað. Her kann eisini vera ásett, at smærri umleggingar av umdømunum kunnu verða gjørdar í sambandi við ta árligu innskrivingina.
2) Vavið á tí einstaka skúlanum við atliti at undirvísing í grundskúla, 10. flokki o.ø. eftir § 4.

Í núverandi skúlabygnað er í eitt skúlaumdømi (grunduppttøkuøki) fyri hvønn skúla, við undantaki av skúlunum í Hoyvík, sum eru eitt skúlaumdømi, og markið millum skúlarnar er meira flótandi og lagað eftir bústaði hjá teimum børnum, sum er skrivað inn í skúlarnar í Hoyvík júst tað árið.

Skúlaumdømini eru væl lýst á heimasíðuni hjá kommununi: Finn skúla - Tórshavnar kommuna

Sambært fólkaskúlalógini § 32 stk 1 ber til at gera smærri umleggingar av umdømunum í sambandi við ta árligu innskrivingina. Í grundini er tað tað, sum Tórshavnar kommuna sambært leiðreglunum ger, tá pláss ikki er fyri øllum børnunum í einum grunduppttøkuøki, kann verða neyðugt at flyta barn í annan skúla enn tann, sum er næstur heiminum.

Kommunan stendur fyri tveimum avbjóðingum, og tær eru, so vítt gjørligt at veita pláss til allar næmingar í skúlaumdøminum í tilhoyrandi skúla, og at tryggja øllum næmingum pláss í skúlabygnaðinum í kommununi.

Lækking av næmingahámarkinum í flokkunum, broytingar í samlaða næmingatalinum og forskjótingar í næmingatalinum millum skúlumdømini seta skúlabygnaðin og umsitingina av skúlainnskriving undir trýst.

Núverandi skúlaumdømir býta miðstaðarøkið upp í økini Argir, vesturbýin, miðbýin, eysturbýin og Hoyvík. Hóast tað kann verða avbjóðandi, so ber til at umsita økið eftir verandi leiðreglum, har tillagingar kunnu verða gjørdar millum umdømini, um so er, at umsitingin fær frið at arbeið eftir samtyktu leiðreglum.

Færri skúlaumdømir loysa í sjálvum sær ikki hesar avbjóðingarnar, men tað er ein avgerð um eitt leysari mark millum økini og skúlarnar. Um vit taka skúlaumdømini á Argjum og í vesturbýnum sum dømi, vil tað viðføra, at foreldur á Argjum kunnu ynskja at skriva síni børn inn í Skúlan á Fløtum og foreldur í vesturbýnum kunnu ynskja at skriva síni børn inn í Skúlan á Argjahamri.

Við hesum eru tað foreldrini, ið kunnu ynskja, hvar tey helst vilja hava skúlapláss í tí størra skúladøminum, og umsitingin skal framhaldandi avgreiða innskrivingina eftir galdandi leiðreglum.

Tann grundleggjandi fortreytin fyri at veita pláss í skúlaumdømunum og í einstøku skúlunum er, at tað eru nógv pláss og nóg nógvir flokkar.

**Broyting av skúlabygnaði**
Við stórum ágangum á veg tey komandi árini kann staðfestast, at tørvur er á einum flokki eyka í 1. flokki komandi árini, og einstøk ár verður helst tørvur á tveimum eyka flokkum.

Fyri at loysa hesa avbjóðing er neyðugt at taka støðu til, hvar pláss skulu vera til eyka flokkar, og tað eigur ikki bara at vera gjørt við at útvega pláss til eyka flokkar, men eisini spor. Loysnir, ið ikki bara eru fyri eitt og eitt ár í senn, men eru varandi loysnir, sum so kunnu føra til eyka spor og sostatt broyting í skúlabygnaðinum,

Í mun til teir komandi seks árgangirnar, sum vit kenna og væntaðan fólkavøkstur í ávísum økjum, har núverandi útstykkingar eru, og framtíðar útstykkingar verða, er skynsamt at útvega eitt spor afturat á Argjum og eitt í Hoyvík.

Við undantakinum frá nýggja næmingahámarkinum á 22 næmingar fer væntandi at bera til at veita øllum børnum í 1. flokki komandi skúlaár pláss innanfyri karmarnar á verandi skúlabygnaði. Tó kann tað gerast ein avbjóðing, at tað verða ov fá tøk pláss til komandi tilflyting.

**Greinir í fólkaskúlalógini viðvíkjandi broyting í skúlabygnaði**
**§ 46.** Skúlamyndugleikin á staðnum er kommunustýrið og skúlastýrið smb. § 50, 1. stk.

**§ 47** *Stk. 6.* 2) Kommunustýrið ger uppskot um skúlabygnað kommununnar og broytingar í honum, sbr. §§ 32, stk.1 og 57, stk. 5.

**§ 52.** *Stk. 4.* Skúlastýrið viðger saman við kommunustýrinum uppskot um skúlabygnað kommununnar og broytingar í honum, sbr. § 32, stk. 1. Í teimum kommunum, ið hava tvey ella fleiri skúlastýri, velur kommunustýrið ein arbeiðsbólk, umboðandi øll skúlastýrini, at viðgera uppskot um skúlabygnað, sbr. § 47, stk. 6.

**§ 57** *Stk. 5.* 9) Landsstýrismaðurin góðkennir skúlabygnað kommununnar og tær ítøkiligu undirvísingarætlanirnar fyri teir einstøku skúlarnar og møguligar broytingar í teimum. Landstýrismaðurin kann loyva, at fleiri skúlar í einum øki verða roknaðir sum ein skúli, sjálvt um ikki øll undirvísingarhølini eru savnað á sama staði í økinum.

**Skúlabygnaður í Tórshavnar kommunu**
Ein skúlabygnaður er í Tórshavnar kommunu, hann er tó ikki settur saman í eina heild, men er ein bygnaður fyri einstøku skúlarnar, og er góðkendur so hvørt broytingar hava verið, tað er t.d., tá nýggir

skúlar eru bygdir, tá skúlar eru lagdir saman, tá nýggj hádeild er stovnað og tá 7. flokkur er tikin av í tveimum at smáu skúlunum.

Sambært galdandi skúlabygnað er bygnaðurin fyri skúlarnar í miðstaðarøkinum hesin:

| | |
|---|---|
| Skúlin á Argjahamri | Forskúli – 9. árgangur, 2 spor<br>1 sertilboð, Ljósástova, 15 næmingar |
| Skúlin á Fløtum | Forskúli – 6. árgangur , 3 spor<br>7.- 9. árgangur, 4 spor.<br>2 sertilboð, Guliskúli 67 næmingar og Lopfjølin 11 næmingar |
| Sankta Frans skúli | Forskúli – 9. árgangur, 2 spor |
| Eysturskúlin | 1.- 6. árgangur, 2 spor<br>7.- 9. árgangur, 3 spor<br>10. árgangur (Nám X) 207 næmingar<br>Nám X er ikki býtt í flokkar<br>1 sertilboð – Lonin, 16 næmingar |
| Hoyvíkar skúli | Forskúli – 9. árgangur, 2 spor<br>1 sertilboð – Víkin, 17 næmingar |
| Skúlin við Løgmannabreyt | 1.- 9. árgangur<br>Hvør árgangur er ein flokkur (næmingatal upp til 2 spor). |

*Næmingatølini í talvuni omanfyri eru fyri skúlaárið 2025-2026.*

Skúlaumdømi og skúlabygnaður hanga saman, so um Tórshavnar kommuna ynskir, at hava fleiri spor í onkrum av skúlunum er neyðugt at broyta bygnaðin.

**Mannagongd í sambandi við broyting í skúlabygnaði**
Er ætlanin at broyta skúlabygnaðin í Tórshavnar kommunu skal ein arbeiðsbólkur saman við kommunastýrinum gera uppskot um broytingar í honum, og har fleiri skúlastýri eru, velur kommunustýrið ein arbeiðsbólk umboðandi øll skúlastýrini. Í Tórshavnar kommunu eru 10 skúlastýri, og tey skulu so øll hava umboð í arbeiðsbólkinum.

Arbeiðsbólkurin viðgerð uppskot um broytingar, og niðurstøða og tilmæli frá arbeiðsbólkinum verða so løgd fyri trivnaðarnevndina við tilmæli frá umsitingini til støðutakan. Er niðurstøðan, at broytingar verða gjørdar i bygnaðinum, fer málið í býráðið, og verður tað samtykt har, verður umsókn send landstýrismanninum um at góðkenna, at skúlabygnaðurin verður broyttur.

**Niðurstøða**
Einstakir eyka flokkar í skúlum passa ikki inn í bygnaðin fyri skúlan og órógva heildarskipanin í skúlanum øll árini til skúlin aftur hevur eitt flokkatal samsvarandi skúlabygnaðinum fyri skúlan.

Framtíðar næmingatal og útstykkingar geva greiðar ábendingar um at tørvur er á einum og kanska tveimum sporum afturat í miðstaðarøkinum í Tórshavnar kommunu. Við tí sum grundarlag verður mett neyðugt at fara undir eina tilgongd at broyta skúlabygnaðin við einum ella tveimum sporum afturat fyri at sleppa undan órógvandi fyribilsloysnum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á mentamáladeildini mæla til:

a) at arbeiðbólkur umboðandi øll skúlastýrini og umsiting verður settur at gera tilmæli um framtíðar skúlabygnað í miðstaðarøkinum.
b) at umsitingin ger uppskot um arbeiðssetning, sum verður lagdur fyri trivnaðarnevndina á fundinum í novembur

c) at umsitingin kannar fyrimunir og vansar við at broyta leiðreglurnar fyri innskriving í forskúla, soleiðis at bert børn ið búgva í grundupptøkuøkinum hava møguleika at verða innskrivað í forskúlan í økinum, og leggur málið fyri trivnaðarnevndina á fundinum í novembur.

**Trivnaðarnevndin 02. oktober 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Samstundis heitir trivnaðarnevndin á umsitingina, um at arbeiða víðari við møguligum fyribils hølisloysnum.

**Ískoyti:**
Komandi trý skúlaárini verður eins og hetta skúlaárið tørvur á einum eyka 1. flokki í miðstaðarøkinum í Tórshavnar kommunu.

**Fyribilsloysnir**
Trý tey komandi skúlaárini er tørvur á meir enn 13 sporum miðstaðarøkinum.

2026-2027 14 spor, heimild til undantak til 24 næmingar í hvørjum flokki
2027-2028 15 spor, á markinum til 15 spor
2028-2029 14 spor
Síðani lækkar næmingatalið aftur, og sum tað sær út beint nú, eru 13 spor tá nóg mikið. Men vakstrarøkini eru Argir, Hoyvík og vesturbýurin, so tørvurin á eyka spori/sporum verður væntandi í teimum pørtunum av býnum.

Í sambandi við tørvin á eyka fyrsta flokki/flokkum komandi árini hevur umsitingin havt fund við skúlastjórarnar í skúlunum í miðstaðarøkinum. Skúlastjórarnir greiddu frá umstøðunum í teirra skúlum til eyka flokkar, og hvørjir møguleikar vóru at hava eyka flokkar.

Umsitingin vísti á hesar møguleikar:
1. Loysa trupulleikan so hvørt og søkja um eyka flokk, har tørvurin á plássum er størstur. Talan verður tá um bráðfeingisloysnir, og foreldur vita ikki fyrrenn innskrivingin er liðug, í hvørjum skúla eyka flokkur verður.
2. Taka støðu til, at eyka flokkar verða í einum skúla, og hølisloysnin verður góð, so til ber at leggja ætlan nú fyri tey trý komandi skúlaárini, og foreldur fáa at vita, hvar eyka flokkur verður. Haraftrat verða upptøkuøkini lagað til, so tey passa betur til plássini í skúlanum.
3. Bygt verður til eitt spor aftrat, og miðstaðarøkið verður møguliga býtt upp i trý upptøkuøki.

Umsitingin mælir til loysn 2, so foreldur vita, hvar eyka flokkur er, og skúlin veit, at hann hevur eyka flokkar inni hetta tíðarskeiðið og fær skipað seg eftir tí.

Viðmerkingar hjá skúlastjórunum
Skúlin á Fløtum - tað er ikki pláss í Skúlanum á Fløtum til eitt eyka spor, men um góð hølisloysn verður funnin, ber væl til at taka ein eyka fyrsta flokk inn í trý ár á rað, tí tað passar inn í bygnaðin í skúlanum. Tá flokkarnir koma til hádeildina, er eingin trupulleiki, at ein flokkur er aftrat heldur ikki viðvíkjandi hølum. Um ein loysn skal fremjast í Skúlanum á Fløtum, ynskir skúlin eisini ein eyka forskúlaflokk. Skúlin hevur tó ikki eitt brennandi ynski um at fáa eyka flokkar.
Fyri skipanina í skúlanum er tað ólagaligt bert at fáa ein eyka flokk. Tí ynskir skúlin ikki eyka flokk, um tað bara er tað eina árið, at ein eyka fyrsti flokkur verður tikin inn í skúlan.

Sankta Frans skúli - kann eisini taka eyka flokkarnar, men tað er ikki pláss í skúlanum til meir enn ein eyka flokk aftrat. So neyðugt verður at finna góðar hølisloysnir til í hvussu er tveir eyka flokkar. Tó verður neyðugt at finna eina loysn, tá næmingarnir koma í hádeild, tí í bygninginum til hádeildina er bert pláss til tveir flokkar í hvørjum árgangi.

Skúlin á Argjahamri - tað er ikki pláss í skúlanum, men skúlin er sinnaðar at taka eyka flokkarnar, um góð hølisloysn verður funnin. Tað er ábært á Hamrinum, so um fyribilshøli verða sett upp, skal atlit takast at veðrinum, og útiøkið/spæliøkið hjá børnunum er ikki so stórt, so ansast skal eftir ikki at minka um tað.

Eysturskúlin - í Eysturskúlanum er pláss at taka ein eyka flokk inn hvørt ár næstu trý árini, og tað er pláss allan vegin upp av tí, at næmingatalið í eysturbýnum hevur sveiggjað, so í summum av yngru árgangunum er bert ein flokkur og í onkrum árgangi í hádeildini bert tveir.

Hoyvíkar skúli - tað er ikki pláss í skúlanum, men skúlaleiðslan er sinnað at taka eyka flokkar, um høli verða útvegað, so pláss er fyri flokkunum.

Skúlin við Løgmannabreyt var ikki umboðaður á fundinum, men skipanin við stórflokkum ger, at tað er serliga trupult at vaksa skúlan við einum flokki í ávísum árgangum Við nóg stórum eyka hølum hevði tó borið til at býtt 3 flokkar í tveir stórflokkar.

Samanumtikið ber til at taka eyka flokkar inn í skúlarnar í miðstaðarøkinum. Hetta krevur tó eyka hølisloysnir í øllum skúlum uttan Sankta Frans skúla tað eina árið og í Eysturskúlanum í trý ár. Í hinum skúlunum er neyðugt at útvega eyka hølir og harafturat er neyðugt við eyka hølum til frítíðarskúlan, har eyka flokkar verða.

At býta miðstaðarøkið upp í trý skúlaumdømi og byggja út til eitt spor aftrat í hvørjum øki, er neyvan ein realistisk loysn. Ivasamt er, um landsmyndugleikarnir høvdu góðkent eina loysn, sum í grundini kann bera í sær, at tað okkurt árið verða tríggir eyka flokkar í miðstaðarøkinum í Tórshavnar kommunu, hóast næmingatalið tilsamans í øllum økinum ikki er grundarlag fyri hesum flokkum. Haraftrat hevði kommunan skula útbygt skúlar í øllum trimum økjunum, so pláss var til eitt eyka spor í hvørjum øki.

Ein avleiðing av hesum kann eisini verða, at næmingtalið í flokkunum blívur lágt, og tað ávirkar tímajáttanina og møguleikarnar fyri fleiri valmøguleikum t.d. fleiri tilboðum í hádeildini. Tað kann eisini vera ein fyrimunur fyri samspælið í flokkinum, at næmingatlið ikki er ov lágt.

Um miðstaðarøkið verður býtt upp í trý skúlaumdømi, sum nevnt omanfyri, og trý spor verða aftrat í hvørjum árgangi, soleiðis at farið verður úr 13 sporum upp í 16, hevði hetta verið talið á flokkum í hvørjum øki og miðaltalið í flokkunum í ymsu økjunum í miðstaðarøkinum komandi árini:

Vesturbýur/Argir, 1. flokkur

| Skúlin á Fløtum og Skúlin á Argjahamri | næmingar | flokkar | næm pr. flokk |
|---|---|---|---|
| 2026/27 | 112 | 6 | 18,7 |
| 2027/28 | 111 | 6 | 18,5 |
| 2028/29 | 104 | 5 | 20,8 |
| 2029/30 | 113 | 6 | 18,8 |
| 2030/31 | 75 | 4 | 18,8 |
| 2031/32 | 90 | 5 | 18 |

Miðbýur /eysturbýur, 1.flokkur

| Sankta Frans skúli og Eysturskúlin | næmingar | flokkar | næm pr. flokk |
|---|---|---|---|
| 2026/27 | 102 | 5 | 20,4 |
| 2027/28 | 108 | 5 | 21,6 |
| 2028/29 | 89 | 5 | 17,8 |
| 2029/30 | 87 | 4 | 21,8 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 2030/31 | 74 | 4 | 18,5 |
| 2031/32 | 65 | 3 | 21,7 |

Hoyvík, 1. flokkur

| Hoyvíkar skúli og Sk. við Løgmannabreyt | næmingar | flokkar | næm pr. flokk |
|---|---|---|---|
| 2026/27 | 89 | 5 | 17,8 |
| 2027/28 | 92 | 5 | 18,4 |
| 2028/29 | 94 | 5 | 18,8 |
| 2029/30 | 72 | 4 | 18 |
| 2030/31 | 76 | 4 | 19 |
| 2031/32 | 67 | 4 | 16,8 |

Útrokningarnar í talvuni omanfyri eru grundaðar á núverandi barnatal í miðstaðarøkinum, fólkavøkstur er ikki roknaður uppí, og tað er ikki tikið við, at nøkur børn fara í Lítlaskúla og einstøk í Skúlan á Trøðni. Talvan gevur tó eina ábending um, at verður miðstaðarøkið trý skúlaumdømi, so verður neyðugt at byggja út í øllum økjunum.

**Færri skúlaumdømi/grunduppt økuøki**
Um so er, at tað høvdu verið trý skúlaumdømi í miðstaðarøkinum, so er ikki vist, at øll sum búgva í einum økja fáa pláss í øðrum av skúlunum í økinum, tí sambært § 32 í fólkaskúlalógini, so kunnu smærri umleggingar av umdømunum verða gjørdar í sambandi við ta árligu innskrivingina.

**Metingar hjá Mentamáladeildini**
Skúli og frítíðarskúli hoyra saman, soleiðis at skilja, at børn í einum skúla ganga í ein ávísan frítíðarskúla. Um eyka flokkar verða tiknir inn í skúla er eisini neyðugt, at hølir eru tøk í frítíðarskúla.

Tann bíligasta loysnin er, at eyka flokkar verða tiknir inn í Eysturskúlan, tí har eru høli tøk til skúlapartin, so neyðugt verður bert at útvega hølir til frítíðaskúlan. Spurningurin er so, um tað er skynsamt, at eyka flokkarnir verða í Eysturskúlanum, tí tað er ikki í eysturbýnum, at tørvurin er størstur. Býurin er tó ikki so stórur, og royndin hjá skúlanum er, at tá børnini hava gingið eina tíð í skúla, so kenna teg seg sum part av bólkinum, og bústaðurin hevur sum so ikki ávirkan á, at tey trívast.

Tað ber eisini til at taka ein flokk aftrat inn í Sankta Frans skúla, tí høli eru tøk til tað, men um skúlin skal taka eyka flokk inn trý ár á rað, er neyðugt at útvega hølir til tveir flokkar eyka. Tað er ikki so gott pláss at seta eyka høli upp við Sankta Frans skúla. Tað ber kanska til í skúlagarðinum, men tá fer stórur partur burtur av spæliøkinum hjá næmingunum. Fyribilshølini í skúlagarðinum hjá Hoyvíkar skúla eru til tveir flokkar, og tey eru uml. 180 m$^2$ ella 18x10.
Ein fyrimunur, at eykaflokkarnir eru í miðbýnum, er bussleiðin, ti flestu bussar steðga í Steinatúni, og haðani er stutt at ganga niðan í Sankta Frans skúla.

Tað er ikki so eyðsýnt at hava eyka flokkarnar í Hoyvík, tí Skúlin við Løgmannabreyt er bygdur til ávísa námsfrøði við stórum flokkum, og tað ber ikki so væl til at býta tríggjar flokkar í tveir, tí næmingatalið passar ikki so væl.
Nýggjur bygningur skal byggjast til Hoyvíkar skúla. Í verandi hølum er ikki pláss fyri fleiri flokkum. Fyri nøkrum árum síðani vóru fyribilshøli við tveimum flokshølum sett upp í skúlagarðinum fyri at kunna hýsa øllum virkskeminum í skúlanum.
Tey árini pláss ikki er fyri øllum næmingunum, sum búgva í upptøkutøkinum í skúlunum í Hoyvík ber til at minka um upptøkuøkið,, so partur av økinum fer í skúla niðri í býnum.

Skúlin á Fløtum hevur ikki pláss fyri eykaflokkum, men til ber at seta fyribilshøli upp við skúlan, tætt við grunddeildina. Treytað av at skúli og frítíðarskúli partvís kunnu brúka somu høli, er tørvur á 4 fyribilshølum. Fyrsti flokkur hevur so sínar heimastovur har, og hølini kunnu eisini virka sum høli hjá

frítíðarskúlanum. Seks ár eftir, at fyrsti eyka flokkurin er tikin inn, eru nóg mikið av hølum til, at fyrsti flokkur flytur inn aftur í skúlan.
Skúlin á Fløtum er størsti skúli í kommununi við 784 næmingum. Koma tríggir flokkar aftrat hækkar næmingatalið við 66 næmingum, men hóast skúlin er stórur, er hann bygdur soleiðis, at hvør deild er ein eind fyri seg, so skúlin virkar ikki so stórur.
Fyrimunur við at hava eyka flokkarnar í Skúlanum á Fløtum er, at bæði Argir og vesturbýur hava høgt barnatal, og tað er ikki so langt av Argjum í Skúlan á Fløtum, tó passar busssambandið ikki so væl millum allar býlingarnar á Argjum og Skúlan á Fløtum. Tað er heldur ikki langt úr miðbýnum og í Skúlan á Fløtum, so tað hevði borið til at víðkað upptøkusøkið hjá Skúlanum á Fløtum bæði inn í økið hjá Sankta Frans skúla og inn í økið hjá Skúlanum á Argjahamri.

Tað er ikki pláss í Skúlanum á Argjahamri fyri eyka flokki/flokkum, so um flokkarnir verða har, er neyðugt at seta fyribilshøli upp. Útiøkið hjá skúlanum er ikki so væl egnað til fyrbilshøli. Býarskipanardeildin vísir á møguleikan, at nøkur grundstykki omanfyri skúlan verða hildin aftur í nøkur ár, so fyribilshøli kunnu setast upp har. Nógv verður bygt á Argjum, so lítið er at ivast í, at næmingatalið verður nakað hægri enn talið, sum tekur støði í núverandi tali á børnum undir skúlaaldur. Fyrimunur við at hava eyka flokkar á Argjum er, at tað ber til at flyta upptøkuøkið hjá skúlanum inn í økið hjá Skúlanum á Fløtum og at laga upptøkuøkini hjá Skúlanum á Fløtum og hjá Sankta Frans skúla eftir tí.

**Arbeiðsbólkur umboðandi skúlastýrini**
Umsitingin hevur ikki uppskot til arbeiðsbólk enn, tí mett verður skilabest at bíða við at seta arbeiðið í gongd, til betri grundarlag er tøkt at taka støðu út frá.

Býarskipanardeildin setir júst nú í samstarvi við Bygningdeildina, Barna og Ungdómsdeildina og Mentamáladeildina eitt arbeiði í gongd at gera heildarætlan fyri kjarnutænastur fyri børn og ung í Tórshavn. Hetta arbeiðið fer m.a. at byggja á lýsingar og metingar av núverandi hølis- og útbyggingarmøguleikum, fólkfrøðisligar metingar av fólkasamanseting og vøkstri. Heildarætlanin kemur at fyrihalda seg til framtíðar tørv á plássum og útbygging innan skúla, forskúla og frítíðarskúla. Heildarætlani skal verða liðug í januar/februar 2026.

Í mun til komandi avbjóðingar við skúlainnskrivingini fyri skúlárið 2026/27, sum byrjar hálvan desembur 2025, er ikki gjørligt at gera skjótar yvirskipaðar broytingar í skúlabygnaðinum. Men vit kunnu arbeiða fram ímóti at verða klár til at seta eina formliga viðgerð av skúlabygnaðinum í verk, tá heildarætlan fyri kjarnutænastur fyri børn og ung í Tórshavnar kommunu fyriliggur.

Í mun til skúlainnskrivingina til skúlaárið 2026/27 er neyðugt, at Mentamaldeildin hevur eina ætlan fyri, hvussu hon verður handfarin, og at ætlanin verður staðfest í nevndarumfarinum í novembur 2025.

**Arbeiðssetningur**
Ávegis uppskot til arbeiðssetning er hjálagt

**Forskúli og leiðreglur**
Umsitingin hevur spurt seg fyri hjá løgfrøðingi viðvíkjandi heimild at broyta leiðreglurnar, soleiðis at bert børn, ið búgva í grundupptøkuøkinum hjá einum skúla hava møguleika at skriva seg inn í forskúla har. Við tilíkari skipan, høvdu børn í upptøkuøkinum hjá Eysturskúlanum og børn í upptøkuøkinum hjá Hoyvíkar skúla og Skúlanum við Løgmannabreyt ikki havt møguleika at fingið pláss í forskúla.

Í miðstaðarøkinum, høvdu so bert børn í grundupptøkuøkjunum hjá Sankta Frans skúla, hjá Skúlanum á Fløtum og hjá Skúlanum á Argjahamri havt møguleika at fáa pláss í forskúla.

Svarið frá løgfrøðingi á Stjórnanskrivstovuni er, at ein kommuna ikki kann áseta eina innanhýsis treyt, sum alment útilokar øll, ið ikki lúka ávísa treyt.

Innan fyrisitingarrættin er bann fyri at seta *meting undir reglu*. Grundreglan merkir, at tað er ikki loyvt at velja eina ávísa treyt burturúr og lata hana vera avgerandi fyri metingina.

Í hesum ítøkiliga málinum hevði broytingin ført við sær, at børn í økjum uttan forskúla fáa verri atgongd til forskúlatilboð, og avmarkingin er í stríð við fyrisitingarligu aðalregluna *líkaregluna*. Ein slík skipan hevði elvt til, at børn í upptøkuøkjum hjá skúlum uttan forskúla, høvdu verið útilokað frá møguleikanum at fáa forskúlapláss, hóast tøk pláss eru. Broytingin hevði ført við sær, at ein partur av umsøkjarum høvdu verið útilokaðir frammanundan uttan at fáa eina ítøkiliga meting frá myndugleikans síðu.

Tað er tó einki, ið forðar fyri, at børn, ið búgva í upptøkuøkinum hjá skúlanum, hava *framíhjárætt* at fáa pláss í forskúlanum har – so leingi framíhjárætturin er grundaður á saklig atlit, og ikki á eina reglu, sum útilokar onnur uttan ítøkiliga meting.

Niðurstøðan er sostatt, at tað ikki er heimild at avmarka rættin til forskúlapláss, soleiðis at bert børn í upptøkuøkinum hjá einum skúla kunnu fáa pláss í forskúlanum.
Sí hjálagt teldpostsamskifti við løgfrøðing á Stjórnarskrivstovuni
Ítøkiliga merkir niðurstøðan, at Mentamáladeildin viðgerð tær innskrivingar, ið eru komnar innan umsóknarfreistina. Fyrst verða tey innskrivað, ið hava systkin í skúlanum og síðani tey, ið búgva í grundupptøkuøkinum. Um tað tá eru tøk pláss, verða móttiknar innskrivingar úr øðrum grundupptøkuøkjum viðgjørdar, og børnini innskrivað. Tá viðgerðin er liðug, verða innskrivingar, sum eru móttiknar eftir freistina, viðgjørdar.

Niðurstøða hjá umsitingini
Tað er torført at finna eina loysn, sum er tann besta ella frægasta, men raðfest uppskot hjá mentamáladeildini er niðanfyri her:

1. Eysturskúlin tekur ein flokk eyka í trý ár á rað. Fyrimunir við hesi loysn er, at tað er pláss í skúlanum, so neyðugt verður ikki at gera íløgu í høli. Tó verður neyðugt at útvega høli til frítíðarskúlan Smílibýlið. Hølini hjá frítíðarskúlanum eru ikki nøktandi, so ein partur av frítíðarskúlanum brúkar fyribilshølini, sum eru sett upp í skúlagarðinum í Eysturskúlanum.
Tað kann vera ein vansi, at summi børn í einum fyrsta flokki hava gingið i forskúla í skúlanum í eitt ár og onnur ikki. Eingin forskúli er í Eysturskúlanum, so skúlabørnini byrja øll í skúlanum í fyrsta flokki, so ti viðvíkjandi eru tey øll í somu støðu.
Hádeildin í Eysturskúlanum er trý spor, og tað er ikki trupulleiki at hava ein flokk eyka, tá hesir flokkar koma í hádeildina.
Um eyka flokkarnir verða í Eysturskúlanum, verður upptøkuøkið víðkað inn í økið hjá Sankta Frans skúla, partur av økinum hjá Skúlanum á Fløtum verður so flutt til økið hjá Sankta Frans skúla, og partur av økinum hjá Skúlanum á Argjahamri verður flutt í økið hjá Skúlanum á Fløtum. Ein avbjóðing við hesi loysn er, at neyðugt verður at flyta fleiri mørk, og at barnatalið í eysturbýnum er ikki høgt.

2. Skúlin á Fløtum tekur ein flokk eyka í trý ár á rað. Fyrimunur við hesi loysn er, at skúlin er í einum øki við høgum barnatali og við ávísum bústaðarvøkstri, haraftrat er barnatalið í upptøkuøkjunum hjá grannaskúlunum eisini høgt, so til ber at víðka økið hjá Skúlanum á Fløtum bæði inn í økið hjá Skúlanum á Argjahamri og økið hjá Sankta Frans skúla.
Høl eru ikki tøk í skúlanum, men til ber at seta fyribilshølir upp tætt við grunddeildina í útiøkinum hjá skúlanum. Skúlin metir, at hesi høli kunnu innrættast til bæði skúla og frítíðarskúla.
Ein vansi við at taka eykaflokkar inn í Skúlan á Fløtum er, at hann hevur tríggjar forskúlaflokkar, og at tað so verða nøkur børn, sum hava gingið í forskúla í skúlanum og onnur ikki, og at tað kanska verður neyðugt at skipa forskúlaflokkarnar av nýggjum, tá teir fara í fyrsta flokk, so forskúlanæmingarnir ikki halda fram í somu flokkum, men verða býttir út á teir fýra fyrstu flokkarnar.
Hádeildin í Skúlanum á Fløtum er fimm spor, og so hvørt eykaflokkarnir koma í hádeild, verður ikki neyðugt við eyka hølum. Men tey árini eyka flokkar eru í skipanini, verður ikki møguligt hjá næmingum úr øðrum skúlum at fáa pláss á ítróttarás í Skúlanum á Fløtum.

3. Sankta Frans skúli tekur ein eyka flokk í eitt ár aftrat, og tað verður komandi skúlaár. Skúlin á Argjahamri tekur so eyka flokkar í tvey ár á rað.

Í Sankta Frans skúla er pláss fyri einum flokki aftrat, men um eyka flokkar verða trý á aftrat, verður neyðugt at útvega høli til tveir flokkar. Um eyka flokkur ella eyka flokkar verða tiknir inn í Sankta Frans skúla, verður neyðugt at útvega hølir til frítíðarskúlan.
Hádeildin í Sankta Frans skúla er tvey spor, og í bygninginum til hádeildina er ikki pláss fyri fleiri flokkum, so tá núverandi eyka flokkur í Sankta Frans fer í 7. Flokk, og so hvørt hinir møguligu eyka flokkarnir fara í hádeild, er neyðugt at finna eina hølisloysn, so til ber at hava hádeildina í eini eind.
Ein vansi við at taka eyka flokkar inn í Sankta Frans skúla er, at hann hevur tveir forskúlaflokkar, og at tað so verða nøkur børn, sum hava gingið í forskúla í skúlanum og onnur ikki, og at tað kanska verður neyðugt at skipa forskúlaflokkarnar av nýggjum, tá teir fara í fyrsta flokk, so forskúlanæmingarnir ikki halda fram í somu flokkum, men verða býttir út á teir tríggjar fyrstu flokkarnar.
Ein fyrimunur við loysn í Sankta Frans skúla er, at skúlin er í miðbýnum, og tað ber væl til at laga upptøkuøkini eftir tí. Umframt at upptøkuøkið hjá Sankta frans skúla verður víðkað út í økið hjá Skúlanum á Fløtum, kann tað eisini víðkast inn í ein part av upptøkuøkinum, sum hoyrir til skúlarnar í Hoyvík.

Skúlin á Argjahamri tekur eyka fyrsta flokk inn tvey ár á rað, tann fyrra skúlaárið 2027/28. Tað er ikki pláss i skúlanum, so neyðugt verður at útvega hølir til bæði skúla og frítíðarskúla.
Fyribilshøli kundu kanska verið sett upp í einum økið tætt við høvuðsdyrnar, men tað er ikki tætt við grunddeildina, so skilabest er, at aðrir flokkar verða har, kanska elsti árgangurin í miðdeild. Tað kann eisini verða kannað um tað ber til at halda nøkrum at grundstykkjunum omanfyri skúlan aftur, og so seta møgulig fyribilshøli til skúla og frítíðarskúla upp har.
Ein vansi við at taka eyka flokkar inn í Skúlan á Argjahamri er, at hann hevur tveir forskúlaflokkar, og at tað so verða nøkur børn, sum hava gingið í forskúla í skúlanum og onnur ikki, og at tað kanska verður neyðugt at skipa forskúlaflokkarnar av nýggjum, tá teir fara í fyrsta flokk, so forskúlanæmingarnir ikki halda fram í somu flokkum, men verða býttir út á teir tríggjar fyrstu flokkarnar
Ein fyrimunur við hesi loysn er, at tað verður betri tíð til at fyrireika hølisloysnina til skúla og frítíðarskúla.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á mentamáladeildini mæla trivnaðarnevndini til at samtykkja, at møguligir eyka fyrstu flokkar komandi trý skúlaárini verða tiknir inn í Eysturskúlan.

**Trivnaðarnevndin 06. november 2025**: Ein meiriluti, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Høgni Vilhelmsen og Annfinn Brekkstein, mæla til at keypa mondulir til Skúlan á Fløtum og Skúlan á Argjahamri, at taka i nýtslu skúlaárið 2026/2027.

Ein minniluti, Annita á Fríðriksmørk og Kristianna Winther Poulsen, taka undir við loysn 2.

Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 12. november 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Heðin Mortensen, samtykkir at heita á umsitingina:

1) at kanna keyp av lonum og fara undir fyrireikingina at skipa eitt eyka spor á skúlanum á Fløtum skúlaárið 2026/2027,

2) at kanna møguleikan fyri, at børn á Argjum kunnu rúmast í verandi hølum í skúlanum á Argjahamri skúlaárið 2026/2027, og í øðrum lagi at kanna keyp av lonum til skúlan á Argjahamri,

3) og at koma aftur í trivnaðarnevndina og fíggjarnevndina í desember 2025.

Ein minniluti, Høgni Vilhelmsen og Tróndur Sigurðsson, mælir til at keypa lonir til Skúlan á Fløtum og Skúlan á Argjahamri, at taka i nýtslu skúlaárið 2026/2027.

**Ískoyti:**

Sambært næmingagrundarlagnum í grundupptøkuøkjunum í miðstaðarøkinum verður tørvur á at brúka loyvi til undantak frá næmingahámarkinum í Sankta Frans skúla og á Skúlanum á Argjahamri. Harumframt er tørvur á eyka skúlastovum komandi 3 árini í Skúlanum á Fløtum. Komandi ár er útlit fyri at Skúlin á Argjahamri klárar tørvin við undantakinum frá næmingahámarkinum, men skúlaárið 2027/28 verður tørvur á eyka flokki, og tað verður tað helst eisini skúlaárið 2029/30.

Vænta næmingatal í 1. flokkunum á Skúlanum á Argjahamri og Skúlanum á Fløtum komandi árini út frá núverandi barnatali og bústaði:

| | 2026/27 | | | 2027/28 | | | 2028/29 | | | 2028/29 | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | fl. | næm. | innskr | fl. | næm. | innsk | fl. | næm. | innskr | fl. | næm. | innskr. |
| Skúlin á Argjahamri | 2 | 48 | 46 | 3 | 66 | 55 | 2 | 44 | 34 | 3 | 46 | 48 |
| Skúlin á Fløtum | 4 | 88 | 75 | 4 | 88 | 80 | 4 | 88 | 75 | 3 | 68 | 66 |
| Uttan nakrar broytingar í næmingagrundarlagnum | | | | | | | | | | | | |

**Fundur við Undirvísingarstýrið**
Umsitingin hevur havt fund við Undirvísingarstýrið um innskriving í fyrsta flokk, undantak frá næmingahámarkinum og møguligar eyka flokkar í Tórshavnar kommunu. Við støði í mettu innskirivnngartølunum og fíggjarkarminum hjá Undirvísingarstýrinum, fer stýrið væntandi at mæla frá, at Tórshavnar kommuna fær eyka flokka/flokkar skúlaárið 2026/2027. Undantakið er galdandi í eitt skúlaár aftrat, at sambært verandi tølum er tað nóg mikið. Tá innskrivingin er liðug sæst um broytingar eru, og tá kann henda, at støðan verður ein onnur.
**Fundur við Barna- og útbúgvingarmálaráðið**
Umsitingin hevur eisini havt fund við Barna- og útbúgvingarmálaráðið um innskriving í fyrsta flokk, pláss í nærumhvørvinum og systkina fyrimun. Dentur eigur at vera lagdur á, at systkin fáa pláss í sama skúla. tí eigur kommunan at leggja seg eftir, at systkin sleppa inn, um ikki so skulu foreldrini spyrjast um tað.

Í meginreglunum um upptøku av næmingum í kommunalu fólkaskúlarnar í Tórshavnar kommunu er viðmerkt um upptøkuøkini, at mørkini á økjunum kunnu flyta frá einum ári til tað næsta, tí tey verða lagað eftir mettum tali á børnum í ymsu økjunum, ið skulu í forskúla og 1. flokk.

§ 29 í fólkaskúlalógini snýr seg um skúlaumdømi og mannagongd at leggja skúla niður. Skipan av skúlaumdømum er ásett í stk. 1 og ásetingin um systkin í stk. 4.

Raðfylgjan er ikki avgerandi, men at kommunan heldur seg til ásetingarnar í fólkaskúlalógini í sambandi við innskriving. Punkt 3 í leiðreglunum "Barnið hevur systkin í skúlanum" skal verða hildið óansæð, hvar í røðini tað stendur. Tað hevur eins stóran týdning, eisini um talan er um møguligar umleggingar av umdømismarkinum.

"Smærri umlegging" er grannaskúlin, men kann eisini vera í lagi, um talan er um høgliga skúlaleið, t.d. gott busssamband til skúlan.

**Fundur á leiðslustigi við Barna- og útbúgvingarmálaráðið og Undirvísingarstýrið**
Tórshavnar kommuna greiddi frá støðuni og samtyktini í fíggjarnevndini, og at farið er undir fyrireikingar til eyka spor í Skúlanum á Argjahamri og í Skúlanum á Fløtum. Politiski viljin í Tórshavnar kommunu er, at øll børn fáa pláss í skúlanum í nærumhvørvinum, og kommunan fer at senda Barna- og útbúgvingarmálaráðnum skriv við umsókn um eyka flokkar komandi skúlaárini.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið vísti á, at Tórshavnar kommuna hevur ein góðkendan skúlabygnað at halda seg til.

Undirvísingarstýrið hevði væntað, at við loysnini við undantakinum upp til 24 næmingar í tvey skúlaár og eyka flokki núverandi skúlaár, fór at verða friður í tvey ár, men stýrið veit, at avbjóðing verður í 2027/2028.

**Fundir við Skúlan á Argjahamri og Skúlan á Fløtum**

Leiðslan á Skúlanum á Argjahamri er sinnað at nýta undantakið fyri næmingahámarkinum komandi skúlaárð, um tað tryggjar argjabørnum pláss í nærumhvørvinum og vísir á, at tørvur er á eyka flokkshølum næsta skúlaár. Tað er sera trongligt í grunddeildini og hjá forskúlanum, so tað er ikki møguligt at loysa hølistørvin uttan eyka skúlastovur. Møguleiki at leggja grundstykki til síðis í eitt tíðarskeið til eyka skúlastovur er umrøddur millum skúlaleiðsluna og avvarandi deildir.

Leiðslan í Skúlanum á Fløtum vísir á, at tað hóskar væl við bygnaðin á skúlanum at taka tríggjar eyka flokkar inn, tey komandi trý skúlaárini, men at tað krevur eyka skúlastovur. Skúlastjórin vísir á møguligar staðsetingar, har  besta staðið liggur millum grunddeildin og Glasir, beint omanfyri spæliplássi.

**Kostnaðarmeting og tíðarætlan frá Bygningsdeildini**

Mentamáladeildin hevur síðani , við støðið í fyribils skúlstovunum hjá Hoyvíkar skúla, lýst málið fyri Bygningdeildini og biðið um kostnaðarmeting og tíðarætlan fyri byggibúning, útvegan og uppseting av fyribils skúlastovum.

Bygningsdeildin metir at ein loysn við tveimum skúlastovum liggur um 5.850 tkr. og ein loysn við trimum skúlastovum liggur um 8.650 tkr. Tá eru lonir við Hoyvíkar skúla brúktar sum referansa til stødd og fermetrar á skúlastovum og duri og vesum. Fyrivarni verður tikið fyri óvæntaður forðingum í samband við lendisarbeiðið. Tað verður  mett møguligt at fáa annað ella bæði bygt og reist til skúlaárið 2026/27 um tað verður heimilað umsitingini at byrja skjótast og fara í samráðingar við veitarar til lendisarbeiði, veitan av modulum ella elementum og montering av hesum. Umframt fyrireiking og myndugleikaviðgerð.

Møguligar broytingar við eyka 1. flokkum og fleiri næmingum ávirka frítíðarskúla í økinum. Mentamáladeildin hevur tí biðið Barna- og ungdómsdeildina um viðmerkingar til málið.

**Viðmerkingar frá Barna- og Ungdómsdeildini: Samandráttur**
Barna- og ungdómsdeildin hevur ongar viðmerkingar til talið av 1. flokkum í skúlanum.

Deildin vil kortini gera vart við, at í løtuni er ikki umstøður til ein eyka flokk við 22 børnum afturat í frítíðarskúlanum.

Ein loysn kundi verið at bygt frítíðarskúlan út, ella at skúli og frítíðarskúli aftur fara í holt við deildu nýtslu av viðkomandi hølum.

Ein alternativ loysn, sum kann geva frítíðarskúlanum meira rúmligar umstøður, er at frítíðartilboðið til 3. flokk flytur úr Frítíðarskúlanum á Argjahamri til eina aðra staðseting. Hetta er kortini ikki nokk av plássi til at rúm verður fyri einum eyka flokki í frítíðarskúla.

Barna- og ungdómsdeildin hevur ongar viðmerkingar til talið av 1. flokkum í skúlanum.

Deildin vil kortini gera vart við, at í løtuni eru ikki umstøður til 2 flokkar við 22 børnum afturat í frítíðarskúlanum.

Barna- og ungdómsdeildin tekur undir við at byggja ein frítíðarskúla í nærumhvørvinum hjá Skúlanum á Fløtum. Tað er kortini treytað av, at kommunan samlar annaðhvørt øll frítíðarskúlabørnini ella 1.-2. flokk undir einum taki.

Sum eina neyðloysn, inntil nýggjur frítíðarskúli er bygdur, so mælir Barna- og ungdómsdeildin til, at forskúli flytur í hølini hjá 1. flokki, 1. flokkur flytur í hølini hjá 2. flokki og 2. flokkur flytur í fyribilshølini.

Harvið yvirtekur frítíðarskúlin hølini, sum í dag vera brúkt til forskúlan, og hevur einsamallan ræðisrætt av hølunum. Har við fær frítíðarskúlin egin hølir at ráða yvir. Talan er um økið, sum eru markerað við gulum í myndini niðanfyri.

Skjalið: "Viðmerkingar frá Barna og Ungdómsdeildini" er hjálagt.




**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini at umrøða málið.

**Mentamálanevndin 26. november 2025:** Umrøtt.

**Trivnaðarnevndin 27. november 2025:** Umrøtt.

**Fíggjarnevndin 03. desember 2025:** kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um málið. Tilfar verður lagt fram á fundinum.

**Trivnaðarnevndin 15. januar 2026:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Kunning um innskriving skúlaárið 2026/2027

Innskriving í 1. flokk 2026/27

| | Mótt. innskr. | Pláss | Tøk pláss | Innskr. | Flutt | Tøk pláss |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Eysturskúlin - í skúla | 49 | 46 | -3 | 46 | -3 | 0 |
| Kaldbaks skúli -í skúla | 2 | | | 2 | | |
| Hoyvíkar skúli - í skúla | 34 | 44 | 10 | 38 | 4 | 6 |
| Kollafjarðar skúli - í skúla | 14 | | | 14 | | |
| Nólsoyar skúli - í skúla | 3 | | | 3 | | |
| Sankta Frans skúli - í skúla | 57 | 48 | -9 | 48 | -9 | 0 |
| Skúlin á Argjahamri - í skúla | 45 | 48 | 3 | 45 | | 3 |
| Skúlin á Fløtum - í skúla | 70 | 88 | 18 | 82 | 12 | 6 |
| Skúlin á Løgmannabreyt - í skúla | 48 | 44 | -4 | 44 | -4 | 0 |
| Velbastaðar skúli - í skúla | 2 | | | 2 | | |
| Kommunuskúlar íalt | 324 | | 15 | 324 | | 15 |

Viðmerking: Innskrivingarnar eru viðgjørdar og avgerð tikin um hvør fær pláss í 1. flokki og hvør skal flyta í annan skúla eftir galdandi leiðreglum.

Íalt 16 næmingar fáa ikki pláss har teir hava innskrivað, 3 í Eysturskúlanum, 4 í Skúlanum við Løgmannbreyt og 9 í Sankta Frans skúla.
Av hesum búgva 7 í skúlaøkinum, 5 flyta til økið, 3 búgva ikki í økinum og 1 hevur skrivað inn eftir freistina

Tey ið ikki fáa pláss har tey hava innskriva, hava fingið boð frá Mentamáladeildini um innskriving í annan skúla, og høvi at skriva seg á bíðilista til pláss í skúlanum tey hava innskriva í.

Skúlarnir senda út boð til næmingarnar ið verða innskrivaðir í 1. flokk í teirra skúla.

Innskriving í forskúla 2026/27

| | Mótt. innskr. | Pláss | Tøk pláss | Innskr. | Í við-gerð |
|---|---|---|---|---|---|
| Kollafjarðar skúli - í forskúla | 0 | 16 | 16 | 0 | |
| Sankta Frans skúli - í forskúla | 64 | 44 | -20 | 44 | 20 |
| Skúlin á Argjahamri - í forskúla | 22 | 44 | 22 | 22 | |
| Skúlin á Fløtum - í forskúla | 54 | 66 | 12 | 54 | 12 |
| Kaldbaks skúli - í forskúla | 3 | 9 | 6 | | |
| | 143 | 179 | 36 | 120 | |

Viðmerking: Innskrivingarnar eru viðgjørdar og avgerð tikin um hvør fær pláss í forskúla eftir galdandi leiðreglum.

Tað eru 64 innnskrivingar móttiknar til 44 pláss í Forskúla í Sankta Frans skúla, so pláss er ikki fyri 20 næmingunum .
Av 20 næmingum ið ikki fáa pláss, búgva 4 í øki upp at skúlamarkinum til Skúlan á Fløtum, 2 flyta til økið, 13 búgva í øðrum økið og 1 hevur søkt eftir freistina.

Tey, ið ikki fáa pláss í Sankta frans skúla, hava fingið boð frá Mentamáladeildini og høvi at skriva seg á bíðilista, til pláss í forskúlanum. Upplýst er eisini at tøk pláss eru í forskúlanum í Skúlanum á Fløtum, við tilboð at skriva seg upp til pláss, Freistin er 12. februar og tá verða hesi pláss viðgjørd.

Viðkomandi skúlar senda boð til foreldrini ið hava fingið pláss í forskúla.

**Trivnaðarnevndin 12. februar 2026:** Kunnað varð um málið.

Kristianna Winther Poulsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Av tí  at næmingatalið í skúlaflokkunum er lække niður í 22 næmingar í flokkinum, samstundis sum barnárgangirnir í miðstaðarøkinum eru stórir í 1. flokki skúlaárini 2025/26 til 2029/30, er neyðugt at útvega fleiri skúlapláss.

Skúlaárini 2025/26 og 2026/27 er tað gjørt við undantakið frá næmingahámarkinum, og við eyka 1. flokki, í Sankta Frans skúla í fjør og á Skúlanum á Fløtum í ár.

Skúlaárið 2027/28 er ikki heimildin til undantak frá næminghámarkinum longur og er tí samtykt at útvega eyka skúlastovur fyri at nøkta tørvin á skúlaplássum til og við skúlaárinum 2029/30, tá næmingatalið minkar.

Avgerð er tikin um:

- eyka 1. flokk skúlaárini 2026/27, 2027/28 og 2028/29 á Skúlanum á Fløtum
- eyka 1. flokk skúlaárini 2027/28 og 2029/30 á Skúlanum á Argjahamri

Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur eftir áheitan frá Torshavnar kommunu, um loyvi til tveir eyka 1. flokkar skúlaárið 2026/27,  játta ein eyka 1. flokk afturat áður játtaða undantakinum frá næmingahámarkinum og ráðið hevur valt at bíða við at taka støðu til skúlaárini 2027-2029, til ein greið lagtíðarætlan fyri innskriving í forskúla og 1. flokk fyriliggur fyri komandi árini.

Ráðið hevur skrivliga boða frá, at tað er sinna at samskifta um hvussu innskriving í forskúla kann skipast skynsamt í mun til innskriving í 1.flokk, har tryggja verður, at innskriving í forskúla av barni sum býr uttanfyri grundupptøkuøkið, ikki forðar barnið í upptøkuøkinum rættin til at sleppa í 1. flokk.

Tað tykist sum Barna- og útbúgvingarmálaráðið nú letur upp fyri heimild at broyta verðandi praksis fyri innskriving, har systkin í skúlanum gevur fyrimun framum bústað í skúlaumdøminum.

Nú kommunal avgerð er tikin um útvegan av eyka skúlaplássum á Skúlanum á Argjahamri og Skúlanum á Fløtum næstu árini og Barna og útbúgvingarmálaráðið letur upp fyri broytingum av innskrivingini, er grundarlag fyri at gera eitt uppskot um tillagingar av grundupptøkuøkjunum og av leiðreglunum fyri innskriving í forskúla og 1. flokk, við tí endamálið at so nógvir næmingar sum gjørligt fáa skúlapláss i skúlanum í teirra skúlaumdømi.

Mentamáladeildin tekur tí stig til eitt nærri samskifti við løgfrøðingarnar hjá kommununi og Barna og Undirvísingarstýrið um broytingar av leiðreglunum fyri innskriving, við tí endamálið at seta bústaðin í skúlaumdøminum  framum systkin í skúlanum.

Mentamáladeildin teku somuleiðis, við hjálp frá teknisku deild, stig til at meta um hvussu skúlaumdømini kunnu tillagast verðandi skúlabygnaði, við eyka 1. flokkum komandi árini

Hóast talan ikki er um varðandi broytingar av skúlabygnaðinum í kommununi, so metir mentamáladeildin at broytingaranar verða so umfatandi at tær eiga verða lagdar fyri skúlastýrini eftir galdandi reglum og verða góðkendar av Barna- og útbúgvingarmálaráðnum.

**Greinir í fólkaskúlalógini viðvíkjandi broyting í skúlabygnaði**
**§ 46.** Skúlamyndugleikin á staðnum er kommunustýrið og skúlastýrið smb. § 50, 1. stk.
**§ 47** *Stk. 6.* 2) Kommunustýrið ger uppskot um skúlabygnað kommununnar og broytingar í honum, sbr. §§ 32, stk.1 og 57, stk. 5.
**§ 52.** *Stk. 4.* Skúlastýrið viðger saman við kommunustýrinum uppskot um skúlabygnað kommununnar og broytingar í honum, sbr. § 32, stk. 1. Í teimum kommunum, ið hava tvey ella fleiri skúlastýri, velur kommunustýrið ein arbeiðsbólk, umboðandi øll skúlastýrini, at viðgera uppskot um skúlabygnað, sbr. § 47, stk. 6.
**§ 57** *Stk. 5.* 9) Landsstýrismaðurin góðkennir skúlabygnað kommununnar og tær ítøkiligu undirvísingarætlanirnar fyri teir einstøku skúlarnar og møguligar broytingar í teimum. Landstýrismaðurin kann loyva, at fleiri skúlar í einum øki verða roknaðir sum ein skúli, sjálvt um ikki øll undirvísingarhølini eru savnað á sama staði í økinum.

**Tilmæli:**
Kunnað verður um málið.

**Trivnaðarnevndin 12. mars 2026:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Kommunulistin krevur málið fyri býráðið á komandi fundi.

**Býráðsfundur 19. mars 2026:** Felags broytingaruppskot - býráðið heitir á landsstýrið um ein eyka 1. flokk til Sankta Frans skúla aftaná summarferiuna 2026 og at skúlabygnaðurin verður endurskoðaður í síni heild til næstu innskriving.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
**Játtandi svar frá Mentamálaráðnum**

Mentamálaráðið hevur 22. apríl játta umsóknina frá Tórshavnar býráð og játta eitt eyka spor í 1. flokki skúlárið 2026/27 í Sankta Frans skúla. Ráðið heitir samstundis á kommununa um bert at nýta undantakið frá næmingahamarkinum har tað er neyðugt.

**Verðandi Innskriving:**
Við undantakið frá næminghámarkinum har tað er neyðugt og eyka 1. flokki í SÁF eru 8 næmingar fluttir úr SFS økinum og 3 næmingar úr ES økinum í Skúlan á Fløtum.

Í Hoyvík eru 4 næmingar, ið hava ynskt innskriving í Skúlanum við Løgmannabreyt, sum eru fluttir til Hoyvíkar skúla.

*Í Miðstaðarøkinum eru 13 pláss tøk í 1. flokki:* 2 í skúlanum á Argjahamri, 5 í Skúlanum á Fløtum einki í Sankta frans skúla, Eysturskúlanum og Skúlanum við Løgmanabreyt og 5 pláss í Hoyvíkar skúla.

*13 tøk pláss í miðstaðarøkinum er avgjørt í undirkantinum og einki pláss er í trimum skúlum.*

**Innskriving við tveimum eyka 1. flokkum 2026/27 og neyðugum undantøkum frá næmingahámarkinum:**

45 næmingar eru innskrivaðir í 1. flokk í Skúlanum á Argjahamri og næmingur, ið júst er fluttur til øki eru í viðgerð til núverðandi forskúla. Mett verður ikki at tað er rætt at taka játtaða innskriving aftur. Við neyðugum undantakið er í løtuni 46 næmingar í komandi 1. flokki og *2 tøk pláss Í Skúlanum á Argjahamri.*

83 næmingar eru innskrivaðir í 1. flokk í Skúlanum á Fløtum. 8 næmingar úr SFS økinum og 3 næmingar úr ES økinum. Hesir kunnu fáa bjóða pláss í eyka 1. flokki í Sankta Frans skúla. Við eyka 1. flokki verða 72 næmingar og *16 tøk pláss í Skúlanum á Fløtum*

48 næmingar eru innskrivaðir í 1. flokk í Sankta Frans skúla. Við eyka 1. flokki er pláss til at 8 næmingar í skúlaøkinum og til 3 næmingar úr eysturbýnum. Í Sankta Frans skúla verða tá 59 næmingar í trimum flokkum og *7 pláss tøk í 1. flokki.*

46 næmingar eru innskrivaðir í 1. flokk í Eysturskúlanum og við undantakið frá næmingahámarkinum eru 2 pláss tøk til upptøku úr serflokkinum í lonunum í Hoydølum. Mett verður ikki at innskrivingar kunnu takast aftur fyri at halda næmingahámarki. *Einki tøkt pláss* verður í 1. flokki í Eysturskúlanum.

44 næmingar eru innskrivaðir í 1. flokk í Skúlanum við Løgmannabreyt og 4 næmingar eru ávístir til innskriving í Hoyvíkar skúla. Vit halda okkum til næminghámarkið og *einki pláss er tøkt.*

39 næmingar eru innskrivaði í 1. flokk í Hoyvíkar skúla. Vit halda okkum til næmingahámarkið og *5 pláss eru tøk.*

*Í miðstaðarøkinum verða 307 næmingar í 15 flokkum og 30 tøk pláss. Miðaltalið verður 20,5 næmingar pr flokk. Í Skúlanum á Fløtum er grundarlag fyri 4 flokkum við 18 næmingum og í Sankta Frans skúla ver grundarlag fyri 3 flokkum, tveir á 20 og ein á 19 næmingar.*

**Samskift við skúlastjóran á Skúlanum á Fløtum:**
Um eyka skúlahølir verða útvegað sum ætla, er pláss fyri at skipa komandi 1. flokk í 4 flokkar skúlaárið 2026/27. Møguleiki er eisini fyri at skipa seg við undantakið við 3 flokkum á 24 næmingar. Hóast ein avgerð um eyka 1. flokk í Sankta Frans skúla skúlaárið 2026/27 kann gerða at eingin eyka 1. flokkur verður i Skúlanum á Fløtum skúlaárið 2027/28, so verður tørvur á eyka 1. flokki skúlaárið 2028/29. Tí er tað enn sera umráðandi og til gagns fyri baði frítíðarskúla og grunddeildina at fáa fleiri skúlahølið og at frítíðarskúlin fær tvær skúlastovur fyri seg sjálvan.

**Avbjóðingar við einum eyka flokki afturat í Sankta Frans skúla:**
Verður avgerð tikin um eyka flokk í Sankta Frans skúla Skúlaárið 2026/27 eftir leistinum omanfyri hevur tað avleiðingar og krøv við sær.

Ein avleiðing er at tað neyvan slepst undan at stovna ein eyka flokk skúlaárið 2027/28 tí tá er talan um umleið 20 børn í skúlaøkinum hjá SFS sum skulu vísast til SÁF.

Næmingatalið í skúlaøkinum er 47 skúlaárið 2026/27 og 64 skúlaárið 2027/28.

Ein floksstova er tøk til endamálið skúlaárið 2026/27, men eyka flokshølir skulu útvegast til skúlaárið 2027/28. Tá eyka flokkarnir røkka hádeildina skal ein skilagóð hølisloysn eisini verða tøk.

Ein onnur stór avbjóðing er at tað verða munandi fleiri næmingar ið skulu hava frítíðarskúlatilboð, í hølum, sum í løtuni ikki nøkta tørvin á fulgóðan hátt og sum hóast eina komandi hølisloysn aftur gerast ov trong vegna økt í næmingtalið. Við eyka flokkum í trý ár á rað verður væntaða økingin av børnum í frítíðarskúla uml 20 børn skúlaárið 2026/27, og uml .35 børn skúlaárið 2027/28. Verandi frítíðarskúli hevur pláss til 105 næmingar og væntandi vera 111 næmingar í frítíðarskúla komandi skúlaár.

Víst verður til talvu sum er viðheft.

Krøv verða eisini um eyka flokshølið til skúlaárið 2027/28 til ein eyka flokk í grunddeild og miðdeild, og upp á sigt hølisloysn til tveir eyka flokkar í hádeildini.

**Samskifti við skúlastjóran á Sankta frans skúla**
*Mentamáladeildin hevur heitt á skúlaleiðsluna í skúlanum um at umrøða møguleikar og forðinga hjá skúlanum í hesum sambandið og um at taka upp við skúlastýrið tá grønt ljós verður givið til tað.* Víst verður til skriv frá skúlastjóranum í Sankta Frans skúla.

**Mett innskriving í 1. flokk skúlaárið 2027/28 við eyka 1 flokki í Sankta Frans skúla og Skúlanum á Argjahamri**
21 næmingar eru innskrivaðir í forskúla í Skúlanum á Argjahamri. 55 børn eru skrásett í árganginum til 1. flokk 2027/28, Við fyriliggjandi upplýsingum verður mett at innskriving til 1. flokk verður 58 næmingar umframt møguliga tilflyting. *Grundarlag er sostatt fyri eyka 1. flokki og trimum flokkum á uml. 18 næmingar og uml. 10 tøkum plássum.*

Í skúlanum á Fløtum er innskrivingin í 1. flokk tengd at verðandi innskriving í forskúla. 60 næmingar eru innskrivaðir í forskúla á Fløtum harav 40 næmingar hava bústað í skúlaøkinum. 2 børn úr skúlaøkinum eru innskriva í forskúla í Sankta Frans skúla. Í skúlaøkinum eru 52 børn skrásett at búgva í skúlaøkinum.

Mett verður at í mesta lagið 10 næmingar úr skúlaøkinum fara innskriva til 1. flokk . Av hesum eru 4, sum hava tikið innskriving aftur og halda áfram í 6 ára stovu.

8 næmingar, sum høvdu innskrivað í Sankta Frans skúla eru innskrivaðir í Skúlan á Fløtum. 5 av teimum eru úr SFS skúlaøkið, 2 úr skúlaøkinum hjá SÁF og ein úr skúlaøkinum hjá ES. Møguleiki er fyri nakrir av hesum næmingunum innskriva av nýggjum til 1. flokk í SFS 2027/28. Ein annar møguleiki, ið er er verdur at kanna er, at innskrivað 4 næmingar afturat í forskúlan í Sankta Frans so hann kemur upp á 48 og bjóða plássini til 4 av fluttu næmingunum omanfyri.

*Við fyriliggjandi vitan verður mett at tað er góður møguleiki fyri at rúm verður fyri núverandi børnum í skúlaøkinum hjá Skúlanum á Fløtum skúlaárið 2027/28, hóast ætlaði 1. flokkurin verður fluttur í Sankta Frans skúla.*

Núverandi barnagrundarlagið í skúlaøkinum hjá Sankta frans skúla er 63 næmingar, 7 av teimum hava av egnum ávum innskriva í forskúla í Skúlanum á Fløtum. So veruliga barnagrundarlagið í økinum er 56 næmingar.

44 næmingar eru innskrivaðir í forskúla, har 8 eru úr øðum økjum, soleiðis er talan um 36 næmingar í skúlaøkinum. Møguleiki er tí fyri at 20 næmingar úr økinum innskrivað afturat til 1. flokk, umframt eitt ávíst tal at innskrivingum úr øðrum økjum.

Við eyka flokki og núverandi barnagrundarlag verður mett at tørvur verður á øllum 66 plássunum í trimum 1. flokkum í Sankta Frans skúla skúlaárið 2027/28

**Undantak frá næminghámarkið**
Svarið frá Mentamálaráðnum skal ikki skiljast soleiðis, at undantakið um 24 næmingar í hvørjum flokki fellur burtur.

Tórshavnar kommuna hevur fingið undantak at hava upp til 24 næmingar í 1. Flokki skúlaárini 2025/26 og 2026/27. Hetta undantakið er sostatt framvegis galdandi fyri komandi skúlaár, sum tit nú fyrireika.

Undantakið er tó tíðaravmarkað og verður ikki galdandi fyri skúlaárini eftir 2026/27. Um Tórshavnar kommuna ynskir undantak eftir hetta, má søkjast av nýggjum, og ein slík umsókn verður viðgjørd eftir teimum viðurskiftum, sum eru galdandi tá.

Mentamálaráðið heitir samstundis staðiliga á Tórshavnar kommunu, um so vítt gjørligt at halda seg til ásetingina í lógini um hámarkið á 22 næmingar í hvørjum flokki.

Undantakið eigur einans at verða nýtt, um tað verður mett neyðugt í mun til at tryggja bestu umstøður fyri næmingarnar í kommununi.

**Niðurstøða hjá mentmáladeildini**
Samanumtikið metir mentamáladeildin, at avgerð býráðsins at søkja um eyka 1. flokk í Sankta Frans skúla 2026/27, leggur upp til somu avgerð skúlaárið 2027/28, tá tørvurin á skúlaplássum er enn størri í skúlaøkinum.

**Framtíðarútlitini fyri tørvi á eyka flokkum við góðkenning frá Mentamálaráðnum og ætlanum hjá kommununi eru hesi:**
2026 eyka flokkar í SÁF og SFS (Góðkent)
2027 eyka flokkar í SAH og SÁF (Góðkent, tilsøgn)
2028 eyka flokkur í SÁF (Meting, ætlan)
2029 helst eyka flokkur í SAH (Meting, ætlan)

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og deildarleiðarin á mentamáladeildini mæla til:

- At eyka 1. flokkur, sum áður samtykt, verður stovnaður í Skúlanum á Fløtum og at lonirnar til Skúlan á Fløtum verða settar upp sum ætlað, so pláss verður fyri eyka skúlaflokkum og til at avseta skúlahølir til frítíðarskúlan inni í grunddeildini.

- At eyka 1. flokkur verður stovnaður í Sankta Frans skúla frá komandi skúlaári.

- At varðveita undantøkini fyri næmingahámarkinum í 1. flokki í Skúlanum á Argjahamri og í Eysturskúlanum.

**Trivnaðarnevndin 28. apríl 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. apríl 2026:** Einmælt samtykt

# 107/26 Næmingagjøld í Tórshavnar musikkskúla 2026

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 09.03.2026 | 44/26 | 26/00816-2 |
| 2 Mentamálanevndin | 15.04.2026 | 49/26 | 26/00816-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 22.04.2026 | 78/26 | 26/00816-2 |
| 4 Býráðsfundur | 30.04.2026 | 107/26 | 26/00816-2 |

**Upprunin til málið**
Umbørn frá leiðaranum á Tórshavnar musikkskúla

**Lýsing av málinum**
Næmingagjøldini í Tórshavnar musikkskúla eru óbroytt síðan 2018.

Ynski er frá leiðaranum á musikkskúlanum um at gera broytingar í næmingagjøldunum fyri 2026 og 2027.

Broytingarnar eru í stuttum hesar (sí nærri útgreining í viðhefta skjali)

| | Verandi | Aug 2026 | Aug 2027 |
|---|---|---|---|
| **Einkultfrálæra** | 2.250 | 2.500 | 2.500 |
| **Einkultfrálæra (víðkað skeið)** | 2.250 | 2.500 | 3.000 |
| **Einkulfrálæra (miðnám)** | 2.400 | 3.000 | 4.000 |
| **Litir/ljóð í leiki** | 5.000 | 5.000 | 5.000 |
| **Bólkafrálæra** | 0 | 1.250 | 1.250 |
| **Kór** | 1.000 | 1.250 | 1.250 |
| **Spælistova** | 1.000 | 1.250 | 1.250 |
| **Eykafrálæra (uttanhýsis næm.)** | 1.000 | 1.250 | 1.250 |

Uppskotið varð í september 2025 sent Barna- og útbúgvingarmálaráðnum til góðkenningar, sambært musikkskúlalógini. Góðkenning kom umvegis Undirvísingarstýrið 28. januar 2026.

Størsta broytingin er hjá teimum, sum ganga til vanliga einkultfrálæru. Í nógvum førum ganga hesi umframt einkultfrálæruna til bólkafrálæru í einum av nógvu orkestrunum ella samanspælsbólkunum í skúlanum. Hetta seinna hevur verið íroknað kostnaðin fyri einkultfrálæru, men kemur nú at hava ein serstakan konstnað.

Freistin fyri endurtilmelding til komandi musikkskúlaár er vanliga 15. mai, og neyðugt er, at kunnað verður um møgulig broytt gjøld áðrenn hetta.

<u>Frípláss & systkinaavsláttur</u>
Musikkskúlin hevur ikki havt nakra formella skipan um frípláss, men hevur áður samstarvað við Barnabata um at veita stuðul í teimum førunum, hetta hevur verið neyðugt. Barnabatið hevur tó boðað frá, at tey nú einans veita stuðul til ítrótt. Mett verður eisini, at tað er rættast at tað eru áhuga- og frítíðarfelagsskapir, sum fáa ágóðan av stuðli frá hjálparfelagsskapinum Barnabata, ímeðan Tórshavnar kommuna sjálv rúmar kommunalu tilboðunum.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>30. april 2026 | Blað nr.: 408 |
| | Forkvinnunnar merki: |

Kommunan veitir frammanundan fíggjarligt fríplass til dagstovnar eftir einum inntøkustiga, sum Almanna- og heilsumálaráðið ásetir á hvørjum ári (sí viðhefta skjal). Ein skipan til fríplass til musikkskúlan kundi møguliga verið viðgjørd eftir saman leisti. Av tí at ongin skipan er í løtuni, er ikki greitt, hvussu stórur tørvur er á fríplássi ella hvør fíggjarliga avleiðingin av at veita fríplass hevði verið. Hetta má kannast nærri.

Sysktinaavsláttur er 50% av gjaldinum fyri einkultfrálæru. Hetta er tó einans galdandi fri systkin, sum eru yngri enn 18 ár. Musikkskúlin hevur næmingar upp til 25 ára aldur.

Til ber at rinda næmingagjøldini í einum við skúlaársbyrjan ella yvir fleiri smærri gjøld.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 83 frá 29. mai 2017 um musikkskúlaskipan (Musikkskúlalógin)

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
16/01125 Tórshavnar Musikkskúli: Upptøkureglur
https://360.torshavn.fo/locator.aspx?name=Common.Details.Navigate&module=Case&subtype=12&recno=260965

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd  Ja ☐  Nei ☒**

**Skjøl**
Næmingagjøld í Tórshavnar musikkskúla
Umfarsskriv 2025-2026 (um inntøkustiga í sambandi við fríplass)

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | x | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| | | | | | | | |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at samtykkja broyttu næmingagjøldini sambært viðhefta yvirlitinum, so fyrsta broytingin kemur í gildi í august 2026, tá musikkskúlaárið byrjar.

Mælt verður harumframt til at heimila umsitingini til at arbeiða við uppskotið til skipan um frípláss til musikkskúlan, at leggja fyri mentamálanevndina.

At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 09. mars 2026:** Útsett til næsta fund.

**Ískoyti 15. apríl**

*Rættleiðing til málslýsing omanfyri:*
Tey, sum rinda fyri einkultfrálæru fara framvegis at fáa bólkafrálæru sum part av sínum tilboði uttan eykakostnað. Nýggja gjaldið fyri bólkafrálæru er til tey, sum einans fáa bólkafrálæru og ikki einkultfrálæru.

<u>Ískoyti til málslýsingina:</u>
Í §3 stk 3 í Musikkskúlalógini stendur:
"Næmingar skulu gjalda kommunala musikkskúlanum eitt árligt gjald, sum landsstýrismaðurin skal góðkenna"

Hettar er helst yvirskipað tað sum ger, at kommunur kring landið taka næmingagjøld inn.

Tað er ymiskt, hvussu nógv næmingagjaldið er í ymsu musikkskúlunum, og tað er eisini ymiskt, hvussu nógvar íløgur tær ymsu kommunurnar hava gjørt í økið. Summar hava brúkt nógvar pengar uppá at byggja musikkskúlabygningar, meðan aðrastaðni er tað meira vanligt at hava musikkskúlaundirvísing inni í fólkaskúlunum. Talið og fjølbroytnið av musikkskúlatilboðum er eisini sera ymiskt kring landið, eins og støddin á ljóðførisgoymslu osfr.

Tað er og hevur, sambært leiðaranum á musikkskúlanum, altíð verið Tórshavnar Kommuna heldur enn Tórshavnar musikkskúli, sum hevur ynskt, at næmingagjøld skulu gerast ein partur av fíggingini av Tórshavnar Musikkskúla. Lagt hevur verið upp til, at gjøldini skuldu hækka sambært prístalinum, men Tórshavnar musikkskúli hevur hildið aftur við hesum m.a. vegna korona, men eisini tí at teirra ynski er, at gjaldið skal vera so lágt sum gjørligt. Hetta er framvegis ynskið hjá musikkskúlaleiðsluni.

Í fíggjarætlanini fyri 2026 er mett, at næmingagjøldini skulu leggja 1.650 mill kr í raksturin hjá musikkskúlanum. Skal næmingagjaldið lækka ella standa í stað, so má játtanin hækka tilsvarandi, soleiðis at raksturin er haldførur.

Tórshavnar musikkskúli er tann musikkskúlin í Føroyum, sum hevur flest næmingar, fjølbroyttasta tilboð, størstu ljóðførisgoymslu og størstu og mest framkomnu høli.

Tað er sera ymiskt, hvussu nógv tað kostar at ganga í musikkskúla kring landið. Kommunurnar áseta gjaldið sjálvar, tó at hetta skal góðkennast av landsstýrisfólkinum. Eingin avtala er ímillum kommunur um støddina á næmingagjøldum.

Størru musikkskúlarnir hava hesi gjøld:

| | |
|---|---|
| Nes Sóknar Musikkskúli | 800 kr |
| Vága Musikkskúli | 1800 kr |
| Tónlistaskúlin í Eysturkommunu | 800 kr |
| Tónlistaskúlin í Klaksvík | 1400 kr |
| Vágs musikkskúli | 1200 kr |

Onkur skúli hevur eykagjald fyri leigu av ljóðføri (Í Vágs musikkskúla er hetta t.d. 700kr um árið), og onkur skúli hevur serstakt gjald um næmingarnir t.d. spæla í orkestri/samanspælsbólki, men ikki hava einstaklingaundirvísing osfr. Flestu musikkskúlarnir hava avsláttarskipanir fyri systkin.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at mentamálanevndin tekur avgerð um, um næmingagjøldini skulu hækka í 2026 og 2027 eftir yvirlitinum omanfyri.
At beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 15. apríl 2026:** Ein meiriluti, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Bergur Robert Dam Jensen og Heðin Mortensen, tekur undir við tilmælinum, og at umsitingini kemur aftur í nevnd við einum uppskoti um avsláttrarskipan í juni 2026.

Ein minniluti, Høgni Vilhelmsen og Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2026:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Kristianna Winther Poulsen og Heidi Lava Elgeirsdóttir, tekur undir við mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Høgni Vilhelmsen og Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 30. apríl 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri, 5 atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Jón Kragesteen, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>30. april 2026 | Blað nr.: 411 |
| | Forkvinnunnar merki: |

# 108/26 Skilaveggur/dúkur til ítróttahøllina á Hálsi og tólmenni til reingerð í ítróttahallum - 23/06134

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 15.04.2026 | 62/26 | 26/02810-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.04.2026 | 80/26 | 26/02810-2 |
| 3 Býráðsfundur | 30.04.2026 | 108/26 | 26/02810-2 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**
Sambært játtanarreglunum, skulu lidnar verkætlanir eftirmetast í avvarðandi nevnd og leggjast fyri fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.
Verkætlanin verður samstundis lokað og møguligt avlop fellur aftur til íløgukarmin.

Í sambandi við verandi verkætlan varð endamálið broytt á sumri í 2024 soleiðis at ætlanin við at umbyggja og fáa til høldar umklæðingarrúm varð broytt til at umbyggja nýtt og størri styrkirúm til høllina. Umframt at fáa til vega heildarætlan fyri suður- og vesturendan á eldra partinum av høllini á Hálsi. Arbeiðið er liðugt. Bæði umbygging og heildarætlan.

Nú verkætlan L57045, "Høllin á Hálsi, Skilaveggur, dúkur og reing. tøkni", skal lokast, er sambært leiðslukunningini staðfest eitt avlop á kr. 28.702,00, sum verður flutt aftur á løgukarmin.

Kunnað verður um heildarætlan fyri suður- og vesturendan og útbygging í hesum sambandi.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☐**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>30. april 2026 | Blað nr.: 412 |
| | Forkvinnunnar merki: |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☒

| **Játtast av:** | | | **Játtast á:** | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 5775 | L57045 | Høllin á Hálsi | 5775 | LK57999 | Høllin á Hálsi | | 28.702,00 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**: Tekniski stjóri, leiðarin á bygningsdeildini og leiðarin á mentamáladeildini mæla til, at verkætlanin L57045 "Høllin á Hálsi, Skilaveggur, dúkur og reing. tøkni" verður lokað og at avlopið á kr. 28.702,00 verður flutt aftur á løgukarmin, konta 5775 Ítróttaanlegg (løgur) LK57999, og at málið verður beint um fíggjarnevndina aftur í býráðið.

**Mentamálanevndin 15. apríl 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2026:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. apríl 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við tólv atkvøðum fyri, ongari atkvøðu ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddi: Jón Kragesteen.

# 109/26 Bygnaðarbroytingar í heilsu- og umsorganartænastuni 2026

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Heilsu- og eldranevndin | 16.04.2026 | 13/26 | 26/03162-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.04.2026 | 81/26 | 26/03162-1 |
| 3 Býráðsfundur | 30.04.2026 | 109/26 | 26/03162-1 |

**Upprunin til málið**
Kommunurnar yvirtóku eldraøkið frá landinum 1. januar 2015. Tórshavnar kommuna fyrireikaði seg væl til at taka við avbjóðingini, bæði við at skipa bygnað, innihald, tilboð og tænastur, yvirtøku av starvsfólki frá almannaverkinum og frá sjálvsognarstovni. Nógvar praktiskar fyrireikingar skuldu eisini gerast.

Bygnaðurin, sum varð samtyktur í 2014, er framhaldandi tann bygnaður, sum er fyri økið í dag. Eitt av kriteriunum, tá bygnaðurin bleiv gjørdur, var, at man skuldi ikki hava ov nógv fólk í leiðslustørvum. Sostatt fór man burtur frá at hava røktarheimsleiðarar á hvørjum stovni, men setti ein leiðara fyri áleið tríggjar stovnar hvør.

Verandi bygnaður:



**Lýsing av málinum**
Hesi 11 árini, síðan kommunan yvirtók eldraøkið, er nógv broytt. Eldraøkið í Tórshavnar kommunu er væl útbygt og hetta heldur fram fyri at nøkta alsamt vaksandi tørvin á tænastum og tilboðum. Við útbyggingini økist sjálvsagt talið av starvsfólkum, eins og talið av borgarum, sum hava rætt til tænastur, er økt og framhaldandi fer at vaksa. Fleiri nýggjar lógir og kunngerðir eru settar í verk hesi árini, sum merkja, at eldraøkið skal laga seg til fleiri uppgávur og økt krøv av ymsum slag. Nevnast kunnu fleiri sløg av eftirliti, talgilding av journalum, tvingsulslóg, lóg um endurvenjing, umframt at fleiri uppgávur, sum ikki vóru við, tá økið bleiv lagt út, eru lagdar afturat. Hesar broytingar seta trýst á bygnaðin, sum skal lofta uppgávunum og avbjóðingunum.

Heilsu- og eldranevndin samtykti í 2022 at gera nøgdsemiskanningar og trivnaðarkanningar millum brúkarar, avvarðandi og starvsfólk. Eftirfylgjandi blivu skipaðir arbeiðsbólkar, sum út frá kanningunum komu við tilmælum, har fleiri eru sett í verk, men onnur bíða enn ella ikki eru viðgjørd. Eitt sum eldranevndin legði dent á, var at bygnaðurin skuldi eftirmetast. Úrslitið frá kanningini vísti m.a., at starvsfólkini upplivdu, at eindarleiðslan var ov langt vekk frá dagligdegnum á deildunum. Tó hevur skipanin riggað væl, tá tryggjast skal fíggjarligt skynsemi og at skipa eins tilboð og tænastur til borgarar.

Seinnu árini hevur verið týðiligt, at bygnaðurin hevur verið undir stórum trýsti, tí arbeiðsbyrðan hjá eindarleiðsluni er økt alsamt seinnu árini. Stórt røktarheim við røktaríbúðum væntast at standa klárt í 2028 og hetta hevði kravt, at eitt eindarleiðarastarv má skipast afturat.

Ein eindarleiðari segði seg úr starvi í august í 2025 og seinni fór eisini ein eindarleiðari 1. februar 2026. Tá eindarleiðarin fór í august bleiv avgjørt, at verandi eindarleiðarar skuldu røkja uppgávurnar hjá tí farna leiðaranum og at tey trý stóru heimini fingu ein styrk við at fyribilsseta ein stovnsleiðara til hvørt staðið. Støðan við manglandi eindarleiðslu bleiv umrødd í heilsu- og eldranevndini og avtalað varð at arbeiða við at endurskoða bygnaðin og koma aftur í nevnd, tá tað arbeiðið var liðugt.

Hetta arbeiðið hevur tikið nakað av tíð, bæði tí tað ikki hava verið nógvar ressursir til arbeiðið, men eisini tí tað var umráðandi at taka so nógv fólk við sum gjørligt, so vit kundu koma fram til eina skipan, sum øll kendu seg aftur í.

Samstundis sum arbeitt var við nýggja bygnaðinum, bleiv verandi skipan eftirmett, og fylgt bleiv væl við, hvussu fyribilsskipanin við stovnsleiðarum riggaði og hvussu starvsfólk hava upplivað fyribilsskipanina.

Høvuðssetningurin fyri arbeiðinum við at skipa ein nýggjan bygnað hevur verið:

**Leiðsla tættari at tænastum, tilboðum, starvsfólkum og borgaranum**

Arbeiðið hevur gingið væl, luttakararnir hava verið jaligir og konstruktivir og teirra hugskot og eftirmetingar eru í so stóran mun sum gjørligt tikin við í uppskotið til bygnað.

Afturmeldingarnar frá starvsfólkum um fyribilsskipanina við stovnsleiðarum, sum hevur virkað frá oktober 2025, hava somuleiðis verið sera jaligar.

Uppskot til nýggjan bygna:




Í høvuðsheitum er uppskotið til nýggja bygnaðin bygt á, at heldur enn tríggir (4) eindarleiðarar verður ein leiðari settur fyri alt eldraøkið. Síðan verður eldraøkið býtt upp í 5 økir/stovnar. Boðanesheimið, Lágargarð, Stórabrekka, Demensøkið, sum er Tjarnargarður, Vallalíð og tilboð til borgarar við demens, og Heilsuhúsið, sum er øll tilboð til borgarar, sum búgva heima. T.e., at ein leiðari verður settur fyri Boðanesheimið, ein fyri Lágargarð, ein fyri Tjarnargarð/Vallalíð, ein fyri komandi røktarheimið á Stórubrekku og ein fyri Heilsuhúsið, sum umsitur tilboð og tænastur til heimabúgvandi borgarar.
Deildarleiðararnir á eldraøkinum hava í arbeiðinum lagt stóran dent á, at bygnaðurin fyri deildarleiðslurnar ikki verður broyttur men heldur fram sum nú. Deildarleiðslurnar meta, at við stovnsleiðarabygnaðinum fer teirra arbeiði at gerast munandi smidligari, og meira fokus kann setast á veruligu uppgávuna við leiðslu av fakligheit, starvsfólkum og størri nærleika við borgarar og avvarðandi. Í uppskotinum til nýggjan bygnað tekur stovnsleiðarin fleiri av fyrisitingarligu uppgávunum frá deildarleiðarunum og hetta ger, at deildarleiðarin betur kann røkja sínar uppgávur. Atlit er tikið til hetta ynskið og onki verður broytt við bygnaðinum, sum verður undir stovnsleiðarunum. Tó so fara uppgávurnar hjá deildarleiðarunum at broytast nakað, tí onkrar av uppgávunum verða lagdar til stovnsleiðsluna.

Starvslýsingar eru gjørdar fyri størvini, sum lýsa hvør ábyrgd og hvørjar uppgávur eru knýttar at størvunum. Tað er lagdur stórur dentur á, at samanhangur er millum leiðsluliðini fyri at tryggja, at skipanin virkar so væl sum gjørligt.

Stovnsleiðararnir skulu hava fokus á sín stovn, men eisini verða partur av einum strategiskum forum fyri eldraøkið saman við leiðaranum fyri Heilsu- og umsorganartænastuna , soleiðis at tryggjað verður, at skipanin livir upp til lógir og kunngerðir, sum eru fyri økið. Stovnsleiðararnir eru saman við leiðaranum fyri eldraøkið við til at tryggja eina samanhangandi skipan, sum veitir eina samanhangandi heildartænastu til borgaran, sum lógin áleggur.

Nýggi bygnaðurin økir um talið av leiðarum á eldraøkinum við trimum leiðarum. Umhugsað verður um, at neyðugt hevði verið at sett ein eindarleiðara afturat, um hildið verður fram við verandi bygnaði, so er talan um eina øking við tveimum leiðarum á verandi bygnaði og á uppskotinum til nýggjan bygnað.

Størsti fyrimunurin við uppskotinum til nýggjan bygnað er, at leiðslan verður flutt tættari at borgarunum, starvsfólkunum og teimum tænastum og tilboðum, sum Heilsu- og umsorganartænastan veitir. Fyrimunurin við skipanini er eisini, at deildarleiðararnir í væl størri mun enn áður kunnu hugsavna seg um deildarleiðarauppgávuna.

Lønin til nýggju stovnsleiðarastørvini er enn ikki ásett. Til hetta krevst ein samráðing millum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar. Lønin til nýggja tænastuleiðaran, ið sum so ikki er tengd at sjúkrarøktarfrøðisáttmálanum, er heldur ikki ásett enn. Tí er ringt at siga ein neyvan meirkostnað, men mett verður, at tað verður áleið 2,5 mió. árliga. Tørvur er tó ikki á fígging fyri fíggjarárið 2026, men má takast við til fíggjarætlanina fyri 2027. Rúm er fyri hesum í fíggjarligu afturberingini frá landinum til eldraøkið.

Visitatiónin sum í verandi skipan liggur inni í tænastuni veður flutt og løgd undir fyrisitingina. Ein visitatión (tørvsmeting) er ein myndugleiki og eigur tí ikki at vera tengd at sjálvari tænastuni. Visitatiónin er inngongdin til tænastur og tilboð og hetta skal gerast eftir fyrisitingarligum mannagongdum og vera óheft av tænastuni. Tað hevur ikki fíggjarligar avleiðingar at flyta visitatiónin.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☐**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn |
| | | |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan |
| | | | |

| Upphædd |
|---|
| 2,5 mió. kr. |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| | Býráðsfundur<br>30. april 2026 | Blað nr.: 417 |
|---|---|---|
| | | Forkvinnunnar merki: |

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**:
Kommunustjórin, heilsu- og umsorganarstjórin og leiðarin á starvfólkadeildini mæla Heilsu- og eldranevndini til at taka undir við fyriliggjandi uppskoti til nýggjan bygnað á eldraøkinum.

At leggja uppskotið fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Heilsu- og eldranevndin 16. apríl 2026:** Ein meiriluti, Kristianna Winther Poulsen, Annita á Fríðriksmørk, Heidi Lava Elgeirsdóttir og Birgir Nielsen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Kári Johansen, tekur støðu á býráðsfundi.

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2026:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Kristianna Winther Poulsen og Heidi Lava Elgeirsdóttir, tekur undir við meirilutanum í heilsu- og eldranevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum og mælir heldur til at økta játtanin verður brúkt til at betra tænastuna hjá starvsfólkunum og búfólkunum.

Ein minniluti, Høgni Vilhelmsen, tekur støðu á býráðsfundi.

**Býráðsfundur 30. apríl 2026:** Kári Johansen skjeyt upp at beina málið aftur í nevnd, ið fall við 8 atkvøðum ímóti og 5 atkvøðum fyri.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Jón Kragesteen, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri, fimm atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Jón Kragesteen, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>30. april 2026 | Blað nr.: 418<br><br>Forkvinnunnar merki: |

# 110/26 Útstykkingarvegur á matr. nr. 203c í Kollafirði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 24.11.2025 | 89/25 | 25/08052-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 03.12.2025 | 229/25 | 25/08052-1 |
| 3 Býráðsfundur | 11.12.2025 | 287/25 | 25/08052-1 |
| 4 Tekniska nevnd | 13.04.2026 | 47/26 | 25/08052-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 22.04.2026 | 83/26 | 25/08052-1 |
| 6 Býráðsfundur | 30.04.2026 | 110/26 | 25/08052-1 |
| 7 Tekniska nevnd | | | 25/08052-1 |

**Upprunin til málið**
Víst verður til mál nr. 25/06231-2 Útbjóðing av matr. nr. 203c í Kollafirði til raðhúsa- ella íbúðarbygging.

**Lýsing av málinum**
Ætlaði íbúðarvegurin verður partur av verandi vegakervi hjá kommununi og framhald av málinum um útbjóðing av matr. nr. 203c í Kollafirði til raðhúsa- ella íbúðarbygging, vísandi til at tekniska nevnd hevur tikið undir við tilmælinum 10. juni 2025, at hava nýtt útboð fyri matr. nr. 51-203c.

Í hesum føri er ætlanin at fara undir vegarbeiðið fyrst.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

| | **Býráðsfundur**<br>30. april 2026 | Blað nr.: 419<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | | Játtast á: | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | | **Upphædd** |
| 8175 | LK81999 | Vegaverkætlanir | | 8175 | | | Útstykkingarvegur á matr. nr. 103c, Kollafjørður | | 200.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | na |
| Áður játtað | Upphædd: | 0 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2026 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 15.000 |

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at

1) heimila umsitingini at fyrireika útbjóðingartilfar at prosjektera vegaætlanina at leggja fyri nevndina aftur.
2) játta kr. 200.000 av løgukarmi LK81999 Vegaverkætlanir.
3) beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 24. november 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 03. desember 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Kristianna Winther Poulsen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.
Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Høgni Vilhelmsen, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 11. desember 2025:** Atkvøtt varð um tilmælið, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri og fimm atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Rúni Reginsson Hammer og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur gjørt uppskot til tilfar at bjóða út í innbodnari lisitatión. Uppskotið tekur støði í gerð av vegi uml. 60 m við vendiplássi, tó uttan veitingar og asfalt. Tá ið komandi mennari kemur at gera útstykkingarabeiðið, verður hesin vegurin náttúrligur partur av útstykkingararbeiðinum.

Mett verður, at kostnaðurin fyri arbeiðið at gera vegin verður umleið kr. 1,3 mió.

| | **Býráðsfundur**<br>30. april 2026 | Blað nr.: 420 |
|---|---|---|
| | | Forkvinnunnar merki: |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

| | |
|---|---|
| Vanlig játtan | ☒ |
| Eykajáttan | ☐ |
| Loka verkætlan | ☐ |

| **Játtast av:** | | | **Játtast á:** | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 8175 | LK81999 | Vegaverkætlanir | 8175 | | | Útstykkingarvegur matr.nr. 203c í Kollafirði | 1.300.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**
Tekniski stjóri og býarverkfrøðingurin mæla til

- at heimila umsitingini at bjóða út arbeiðið í innbodnari lisititatión og at fara undir samráðingar við tann, sum hevur besta boð at gera sáttmála um arbeiðið.
- at játta kr. 1.300.000 av løgukarmi LK81999 á nýggja verkætlan "Útstykkingarvegur matr.nr. 203c í Kollafirði", undir konto 8175 Vegir (íløgur).
  at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 13. apríl 2026:** Ein meiriluti, Bergur Robert Dam Jensen, Anja Weyhe, Guttormur í Skála, Birgir Nielsen, tekur undir við tilmælinum.

Tróndur Sigurðsson tekur ikki undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2026:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Kristianna Winther Poulsen, Heidi Lava Elgeirsdóttir og Høgni Vilhelmsen, tekur undir við meirilutanum í teknisku nevnd og beinir málið í býráðið.

Tróndur Sigurðsson tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 30. apríl 2026: :** Kári Johansen skjeyt upp at beina málið aftur í nevnd, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og 6 atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bergur Robert Dam Jensen, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Jón Kragesteen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála

| | Býráðsfundur<br>30. april 2026 | Blað nr.: 421<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

# 111/26 Vegagerð við Borgarahúsið í Kaldbak

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.01.2026 | 4/26 | 25/11095-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.01.2026 | 5/26 | 25/11095-1 |
| 3 Býráðsfundur | 29.01.2026 | 17/26 | 25/11095-1 |
| 4 Tekniska nevnd | 09.03.2026 | 44/26 | 25/11095-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 22.04.2026 | 84/26 | 25/11095-1 |
| 6 Býráðsfundur | 30.04.2026 | 111/26 | 25/11095-1 |

**Upprunin til málið**
Víst verður til mál nr. 25/04088 Innkomuvegur til bygdina og vegin niðan á Garðar og Soylugarðar í Kaldbak.

**Lýsing av málinum**
Ástaðarfundur varð hildin 03.12.2025.

Ynski frá umboðunum úr staðbundnu nevndini er, at farast skal víðari við arbeiðinum at tillaga uttanumøkið við Borgarahúsið.

Fyri at farast kann víðari í viðgerðini av málinum, skal fígging útvegast til arbeiðið, so tað kann bjóðast út.

**Skjøl**
mál nr. 25/04088 Innkomuvegur til bygdina og vegin niðan á Garðar og Soylugarðar í Kaldbak

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 8175 | LK81062 | Vegagerð við Borgarahúsið í Kaldbak | 8175 | L81062 | | Vegagerð við Borgarahúsið í Kaldbak | 1.500.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla teknisku nevnd til at:
1) játta kr. 1.500.000 av løgukarmi LK81062, Vegagerð við Borgarahúsið í Kaldbak, á nýggja verkætlan L81062, Vegagerð við Borgarahúsið í Kaldbak, undir kontu 8175.
2) beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 12. januar 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at heimila umsitingini at bjóða arbeiðið út.

**Fíggjarnevndin 21. januar 2026:** Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. januar 2026:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Lisitatión varð hildin 25.02.2026 og vóru hesi boð móttikin:

- Andrias Berg, sum ikki gav boð.
- David Nordendal kom við einum tilboði, sum ljóðaði uppá kr. 1.474.521,20 u.mvg. saman við tíðarætlan, hvar avhending er sett til 01.09.2026.
- Frank Hellisdal kom við einum tilboði, sum ljóðaði uppá kr. 1.124.450,40 u.mvg. Frank hevur viðmerkt: Byrja mitt í summar. Her er eingin tíðarætlan við.

Lægsta tilboð gevur sambært lógini um útboð rættin til at samráðast um sáttmála. Løgfrøðilig meting er gjørd, at, manglandi tíðarætlanin sambært útboðstilfarinum, ikki útilokar boðgevaran. Tíðarætlanin hjá tilboðsgevaranum við næstlægsta tilboðnum vísir á eina tíðarætlan upp á uml 5-6 mánaðir, frá tí at arbeiðið byrjar, og verður tað tí mett, at hetta kann viðføra, at økið verður sum byggipláss í ov langa tíð í mun til vavið av verkætlanini.

Út frá eini heildarmeting verður mett at vera rættast, at fara undir samráðingar við tilboðsgevara við lægsta tilboðnum, har viðkomandi skal vísa á eina realistiska tíðarætlan fyri arbeiðið.

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at heimila umsitingini:
- at fara undir samráðingar við veitaran við lægra tilboðnum.
- at gera sáttmála við veitaran, treytað av at samráðingarnar koma á mál.

**Tekniska nevnd 09. mars 2026:** Samtykt at taka undir við tilboðnum frá David Nordendal, men við tí treyt, at umsitingin fer í samráðingar við hann um, at arbeiðstíðin skal styttast munandi.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Borgarstjórin hevur biðið um eitt uttanhýsis løgfrøðiligt upprit í málinum.

Uppritið viðger hesi viðurskifti:
1. *um kommunustýrislimir eru bundnir av fyrisitingarrættinum, tá ið avgerðir verða tiknar í kommunustýrinum og í føstum nevndum.*
2. *um kommunan er bundin til at gjøgnumføra og halda seg til sáttmálan við arbeiðstakaran, sum sáttmáli er skrivaður undir við og um endurgjaldsváðar eru fyri kommununa í málinum.*
3. *um kommunustýrislimir kunnu hefta persónliga fyri at kommunan fær fíggjarligan miss vegna avgerðir, sum kommunustýrislimir hava verið við til at taka/samtykkja.*

Uppritið vísur á, at fyrisitingarlógin og meginreglurnar innan fyrisitingarrættin eru galdandi fyri viðgerðina av málum, har myndugleikin hevur ella fer at taka avgerð. Í fyrisitingarrættinum galda harumframt tær

meginreglur, sum eitt nú kravið um at ein avgerð skal vera saklig, kravið um grundgeving, kravið um at upplýsa mál til fulnar osfr. Tá ið kommunustýrið ella føst nevnd, sum kommunustýrið hevur heimilað at taka avgerðir, tekur avgerðir mótvegis borgaranum, skulu avgerðirnar/samtyktirnar tískil halda seg til tær vanligu fyrisitingarrættarligu meginreglurnar.

Tá ið kommunan tekur avgerð um at taka av einum tilboði frá einum tilboðsgevara, og gevur einum øðrum tilboðsgevara noktandi svar, er avgerðin fevnd av fyrisitingarrættinum. Um samtyktin ella avgerðin mótvegis borgaranum ikki inniheldur tey krøv, sum eru sambært fyrisitingarrættinum, er vandi fyri, at lýtir eru við avgerðini, sum í ringasta føri kann enda við eini skeivari avgerð og hetta kann møguliga hava við sær endurgjald.

Í uppritinum verður víst á, at nevndarlimirnir í Teknisku nevnd hava fingið málið upplýst frá umsitingini, fingið sakligar grundgevingar fyri tilmælinum um at fara í samráðingar við tilboðgevaran við lægra tilboðnum og heimila umsitingini, at inngang avtalu við tilboðsgevaran. Hóast hetta hevur nevndin samtykt at taka av tilboðnum frá tí, sum hevði hægra tilboðið. Hendan avgerð er tikin uttan at grundgevingarnar ella sakligu atlitini aftanfyri avgerðini eru førd í gerðabókina, og soleiðis sum málið er upplýst, verður mett, at tað ikki eru saklig atlit, sum kunnu grundgeva ítøkiligu avgerðini. Harumframt hevur Tekniska nevnd við at samtykkja at gera avtalu við tilboðsgevaran við hægra tilboðnum, farin útum heimilaðu játtanina, og tað í sær sjálvum er eitt brot á kommunustýrislógina og kann verða tyngjandi í mun til metingina um endurgjald mótvegis kommununi.

Í uppritinum verður mett, at málið ber brá av fleiri løgfrøðiligum avbjóðingum, m.a. kundi útbjóðingarskrivið verið gjøllari í sínum málburi og gjøllari frágingið. Annars verður víst á, at tað er ikki ivi um, at tann eini tilboðsgevarin hevði lægri tilboð enn hin, og at tann tilboðsgevarin, sum endaði við at fáa arbeiðið, hevði eitt tilboð, sum var hægri enn játtanin, ið var tøk til endamálið. Um saklig atlit høvdu verið fyri at tikið av hægra tilboðnum, so hevði hetta undir øllum umstøðum kravt, at kommunustýrið setti størri játtan av til endamálið áðrenn sáttmáli var undirskrivaður.

Í uppritinum verður samanumtikið mett, at tað kann staðfestast, at

1. *kommunustýrislimir eru bundnir av fyrisitingarrættinum, tá ið avgerðir verða tiknar í kommunustýrinum og í føstum nevndum,*
2. *at kommunan er bundin til at gjøgnumføra og halda seg til sáttmálan við arbeiðstakaran, sum sáttmáli er skrivaður undir við, men at endurgjaldsváðar eisini eru fyri kommununa mótvegis tilboðsgevaranum við lægra tilboðnum, og at*
3. *kommunustýrislimir kunnu hefta persónliga fyri fíggjarligan miss, sum kommunan verður fyri vegna avgerðir/samtyktir, sum kommunustýrislimir/nevndarlimir í føstum nevndum hava verið við til samtykkja.*

**Skjal:**

25/11095-17: “*Uttanhýsis løgfrøðiligt upprit um útboð, nevndarviðgerð, játtanarheimild og endurgjaldsábyrgd*”

**Tilmæli:**

At umrøða á fíggjarnevndarfundi.

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2026:** Umrøtt.

**Býráðsfundur 30. apríl 2026:** Umrøtt.

| | **Býráðsfundur**<br>30. april 2026 | Blað nr.: 424<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

# 112/26 Ferðslutrygd við gonguteigar

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 09.02.2026 | 26/26 | 25/10118-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.04.2026 | 91/26 | 25/10118-1 |
| 3 Býráðsfundur | 30.04.2026 | 112/26 | 25/10118-1 |

**Upprunin til málið**
Skriv frá eigarafeløgunum Hoyvíkshædd, Eystan Gil, og Oman Gil, har tey heita á kommununa um at betra um ferðsluviðurskiftini kring Skúlan við Løgmannabreyt.

**Lýsing av málinum**
Arbeiðið er liðugt og skal lokast. Avlopið ið er kr. 149.000 skal flytast á karmin, stovnsnummar 8175, vegaverkætlanir (karmur), LK81999.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☐**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☒

| | Býráðsfundur<br>30. april 2026 | Blað nr.: 425<br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 8175 | L81057 | Ferðslutrygd við gonguteigar | 8175 | LK81999 | Vegaverkætlanir, karmur | | Kr.149.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- At flyta avlopið av verkætlanini, stovnsnummar 8175, L81057, Ferðslutrygd við gonguteigar sum er kr. 149.000 inn á stovnsnummar 8175, LK81999, Vegaverkætlanir (karmur)
- At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 09. februar 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2026:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Ískoyti**:

Komið er fram á, at rætta upphæddin fyri avlopið á verkætlanini er kr. 47.905,-. Tí verða fíggjarligu avleiðingarnar broyttar, eins og tilmælið eisini verður broytt tilsvarandi.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

## Játtan:

Vanlig játtan ☐

Eykajáttan ☐

Loka verkætlan ☒

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 8175 | L81057 | Ferðslutrygd við gonguteigar | 8175 | LK81999 | Vegaverkætlanir, karmur | | Kr.47.905 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla býráðnum til:

- At flyta avlopið av verkætlanini, stovnsnummar 8175, L81057, Ferðslutrygd við gonguteigar sum er kr. 47.905 inn á stovnsnummar 8175, LK81999, Vegaverkætlanir (karmur)

**Ískoyti**:
Komið er fram á, at rætta upphæddin fyri avlopið á verkætlanini er kr. 47.905,-. Tí verða fíggjarligu avleiðingarnar broyttar, eins og tilmælið eisini verður broytt tilsvarandi.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☒

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 8175 | L81057 | Ferðslutrygd við gonguteigar | 8175 | LK81999 | Vegaverkætlanir, karmur | | Kr.47.905 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla býráðnum til:

- At flyta avlopið av verkætlanini, stovnsnummar 8175, L81057, Ferðslutrygd við gonguteigar sum er kr. 47.905 inn á stovnsnummar 8175, LK81999, Vegaverkætlanir (karmur)

**Býráðsfundur 30. apríl 2026:** Útsett.

# 113/26 Verkætlan øki HX, GX1 og CX1 - biologisktreinsiverk

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 13.04.2026 | 48/26 | 26/01377-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.04.2026 | 85/26 | 26/01377-1 |
| 3 Býráðsfundur | 30.04.2026 | 113/26 | 26/01377-1 |

**Upprunin til málið**
Upprunin til málið er, at tað verður kostnaðarmikið at gera eina havleiðing frá Norðradali, grundað á, at hon liggur beint við eitt forberg. Ein slík loysn hevði kravt boring í bergið umframt vanligt arbeiði í sambandi við havleiðing. Av hesum ávum verður arbeitt við at finna aðrar tøkniliga og búskaparliga haldførar loysnir.

**Lýsing av málinum**
Málið viðvíkur greining og fyrireiking av eini alternativari skipan til spillvatnshandfaring í Tórshavnar kommunu. Dentur verður lagdur á at meta um møguleikarnar fyri at taka í nýtslu biologiska reinsing av spillvatni sum eina varandi loysn.

Verkætlanin fevnir um eina heildarmeting av verandi spillvatnskipanum, spillvatnsmongdum og val av hóskandi reinsitøkni. Harumframt verða sett krøv til rakstur og viðlíkahald, áarreinleika, støðufesti, orkunýtslu, stýriskipanir og handfaring av slam.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 168 frá 16. desember 2021
Kunngerð nr. 111 frá 7. september 2009 um spillivatn

**Upplýsingar frá umsitingini**
Umsitingin arbeiðir við at útgreina tey tøkniligu, rakstrarligu og fyrisitingarligu viðurskiftini, ið eru knýtt at eini møguligari umlegging til biologiska reinsing.

Hetta fevnir m.a. um metingar av rakstri og viðlíkahaldi, herundir tørv á dagligum eftirliti, viðlíkahaldsarbeiði og førleikum hjá starvsfólki. Eisini verður mett um tørv á førleikamenning og viðkomandi skeiðsvirksemi. Arbeiðið verður mett at kosta kr. 840.000

**Skjøl**
23/04594-11 Fylgiskjal 47 – Ætlan fyri HX 1829203_1_1

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6875 | LK68999 | Kloakkir | 6875 | | | øki HX,– biologiskt reinsiverk | 840.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**:

Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- at tikið verður undir við at bjóða arbeiðið út til ráðgeva, at lýsa tørvin og at gera uppskot til loysn.
- at játta kr. 840.000 til prosjektering og útbjóðing av Løgukarmi LK68999 Kloakkir, undir konto 6875 Kloakkir, á nýggja verkætlan øki HX,– biologiskt reinsiverk undir konto 6875
- at leggja málið fyri nevndina aftur, tá tilboð fyriliggur.
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 13. apríl 2026:** Ein meiriluti, Bergur Robert Dam Jensen, Anja Weyhe, Guttormur í Skála, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Birgir Nielsen og Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2026:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Kristianna Winther Poulsen, Heidi Lava Elgeirsdóttir og Høgni Vilhelmsen, tekur undir við meirilutanum í teknisku nevnd og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 30. apríl 2026:** Útsett.

# 114/26 Kanning av verandi støðu á kloakkleiðing við Sjósavnið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 02.06.2025 | 32/25 | 25/05866-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 12.06.2025 | 117/25 | 25/05866-1 |
| 3 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 167/25 | 25/05866-1 |
| 4 Tekniska nevnd | 13.04.2026 | 53/26 | 25/05866-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 22.04.2026 | 86/26 | 25/05866-1 |
| 6 Býráðsfundur | 30.04.2026 | 114/26 | 25/05866-1 |

**Upprunin til málið**
Málið um ætlaðu planløgdu kloakkarbeiðini hevur verið framløgd í máli nr. 25/00417 Íløgu- og rakstraræltan fyri spillvatnsøkið 2025, og henda verkætlanin fevnir um at kanna og gera fyrireikingararbeiði á landi við Sjósavnið.

Arbeiðið verður mett til at kosta 2 mió kr. Farið er undir fyrireikandi ráðgevingararbeiði á landi, og ætlanin er at fara undir útbjóðing skjótast til ber, so farast kann undir kloakkarbeiði á landi.

Tíðarætlan: Prosjektering juni-juli 2025. Anlægsarbeiðið byrjar í september 2025

Verða innkomnu tilboð hægri enn tillutað játtan, verður málið lagt fyri teknisku nevnd aftur.

**Skjøl**
jnr. 25/00417-1 Íløgu- og rakstraræltan fyri spillvatnsøkið 2025

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| 6875 | LK68999 | Kloakkir | 6875 | | | Nýggj havleiðing við Sjósavnið | 2.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at

1) Játta kr. 2.000.000,- av kto 6875 Kloakkir LK68999 Kloakkir (íløgur) á kto 6875, Nýggj havleiðing við Sjósavnið, fyri 2025 til at kanna og gera fyrireikingararbeiði á landi við Sjósavnið og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 02. juni 2025:** Samtykt at taka undir viðtilmællinum.

Anja Weyhe var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Fyrirekingararbeiðið fyri kloakkarbeiði á landi er nú liðugt og klárt er at bjóða arbeiði út. Kostnaðarmetingin at gera kloakkarbeiði er býtt í tveir partar – ein á landi og hin í sjónum.

Sambært fyrireiekingararbeiðinum verður parturin á landi og parturin í sjónum mettur til samanlagt 12,5 mió. Víst verður til kostnaðarmeting – skjal nr. 25/05866 "Kostnaðarmeting.xlsx".

Ætlanin er at fara undir kloakkarbeiði á landi í ár og seinna partin á sjónum í 2027.

Fíggjartørvurin er tískil fyri 2026 – kr. 5.664.000 og fyri 2027 kr. 6.797.000.
Tá farið verður undir framhaldandi arbeiði í sjónum í 2027, verður málið at leggja fyri teknisku nevnd aftur.

Tá havleiðingin er liðug er møguleiki at knýta fleiri partar av Argjum í hesa leiðing fyri at minka um tal av teimum stuttu útleiðingunum og fyri at fáa veitt spillivatnið langt frá landi, har rák og uppíblandingin er væl størri.

**Skjøl**
25/05866-6 25-05866 Kostnaðarmeting.xlsx

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

| | |
|---|---|
| Vanlig játtan | ☒ |
| Eykajáttan | ☐ |
| Loka verkætlan | ☐ |

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| 6875 | LK68999 | Kloakkir | 6875 | | | Nýggj kloakkleiðing fram við Sjósavninum | 5.664.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til fyri fígjarárið 2026

- at bjóða arbeiði út í innbodna lisitatión
- at játta kr. 5.664.000 av Løgukarmi LK68999 Kloakkir, undir konto 6875 Kloakkir, á nýggja verkætlan "Nýggj kloakkleiðing fram við Sjósavninum" undir konto 6875
- at leggja málið fyri nevndina aftur, tá tilboð fyriliggur
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 13. apríl 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2026:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd, við teirri viðmerking at fíggjarnevndin tekur endaliga avgerð um tilboðini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. apríl 2026:** Útsett.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>30. april 2026 | Blað nr.: 432 |
| | Forkvinnunnar merki: |

# 115/26 Pumpustøð á Hvítanesi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 13.04.2026 | 49/26 | 26/01673-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.04.2026 | 87/26 | 26/01673-1 |
| 3 Býráðsfundur | 30.04.2026 | 115/26 | 26/01673-1 |
| 4 Hvítanesnevndin | 19.05.2026 | 6/26 | 26/01673-1 |

**Upprunin til málið**
Tørvurin á at betra um spillvatnshandfaringina í økinum kring Hvítanes, serliga við atliti at tí, at økið er nógv nýtt sum dyppistaður. Verandi loysn tryggjar ikki nøktandi reinsing og leiðing av spillivatni burtur frá økinum.

**Lýsing av málinum**
Málið snýr seg um at fyrireika og fremja eina verkætlan, ið fevnir um bygging av nýggjum pumpustøðum og nýggjum spillvatnsleiðingum.

Endamálið er at leiða spillivatnið burtur frá økinum og víðari til eina havleiðing, sum liggur longri sunnanfyri.

Við hesum verður miðað eftir at verja umhvørvið og tryggja, at báðar víkirnar við Hvítanes framhaldandi eru reinar og egnaðar til frítíðarendamál, serliga dypping.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 168 frá 16. desember 2021
Kunngerð nr. 111 frá 7. september 2009 um spillivatn

**Upplýsingar frá umsitingini**
Umsitingin metir, at ein loysn við pumpustøðum er tann mest haldgóða og umhvørvisliga rætta loysnin, sum gevur betri stýring av spillivatninum, og er í samsvari við spillivatnsætlanina.

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☒ Nei ☐**
Til staðbundnu nevndina til kunningar.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| **Játtast av:** | | | **Játtast á:** | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6875 | LK68999 | Kloakkir | 6875 | | | Pumpustøðir á Hvítanesi | 1.770.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>30. april 2026 | Blað nr.: 433<br><br>Forkvinnunnar merki: |

| | | |
|---|---|---|
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- at tikið verður undir við at bjóða arbeiðið út til ráðgeva, at lýsa tørvin og at gera uppskot til loysn.
- at játta kr. 1.770.000 til prosjektering og útbjóðing av Løgukarmi LK68999 Kloakkir, undir konto 6875 Kloakkir, á nýggja verkætlan "Pumpustøðir á Hvítanesi" undir konto 6875.
- at leggja málið fyri nevndina aftur, tá tilboð fyriliggur.
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina og til staðbundnu nevndina til kunningar.

**Tekniska nevnd 13. apríl 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2026:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd, við teirri viðmerking at fíggjarnevndin tekur endaliga avgerð um tilboðini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. apríl 2026:** Útsett.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>30. april 2026 | Blað nr.: 434<br>Forkvinnunnar merki: |

# 116/26 Nýtt mekaniskt reinsiverk við Sanatoriivegin í Hoydølum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 13.04.2026 | 54/26 | 26/01674-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.04.2026 | 88/26 | 26/01674-2 |
| 3 Býráðsfundur | 30.04.2026 | 116/26 | 26/01674-2 |

**Lýsing av málinum**
Staðfest er, at fleiri størri reinsiverk í kommununi eru bygd í sjeytiárunum og treingja til dagføringar. Reinsiverkini eru beton, og eru ótíðarhóskandi, tí tey leka, og kloakkvatn seyrar undan hesum reinsiverkunum. Talið av hesum reinisverkum er umleið 8.

Sum liður í at dagføra hesi reinsverk var í 2022 farið undir at dagføra kloakkreinsiverkið á Mýrini, sí mál nr. 22/01107. Framhaldandi av hesum arbeiði verður mett, at reinsiverkið við Sanatoriivegin er næsta reinsiverk, sum skal dagførast ella gerast av nýggjum.

Reinsiverkið var gjørt ísv. útstykkingina oman Hoydalar, og eftirfylgjandi vóru útstykkingarnar fram við Flatavegi, millum Gilja og Eystan Gil bundin í reinsiverkið. Hetta førdi við sær stórar kloakktrupulleikar, og fyri at avlasta reinsiverkið var í 2007-08 farið undir at staðseta reinsiverk á p-plássinum vestan fyri Lívdina.

Kostnaðarmeting
Sambært fyribilsmetingum kann væntast, at kostnaðurin fyri ráðgeving og at dagføra ella útskifta reinsiverkið verður uml. kr. 2.200.000

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6875 | LK68999 | Kloakkir | 6875 | | | Nytt mekaniskt reinsiverk við Sanatoriivegin í Hoydølum | 2.200.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:
- at tikið verður undir við at prosjektera og at bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión.

- at játta kr. 2.200.000 til prosjektering og útbjóðing av Løgukarmi LK68999 Kloakkir, undir konto 6875 Kloakkir (íløgur), á nýggja verkætlan "Nýtt mekaniskt reinsiverk við Sanatoriivegin í Hoydølum" undir konto 6875 Kloakkir (íløgur).
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 13. apríl 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2026:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd, við teirri viðmerking at fíggjarnevndin tekur endaliga avgerð um tilboðini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. apríl 2026:** Útsett.

# 117/26 Rák-kanningar í Nólsoyarfirði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 13.04.2026 | 50/26 | 26/01675-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.04.2026 | 89/26 | 26/01675-1 |
| 3 Býráðsfundur | 30.04.2026 | 117/26 | 26/01675-1 |

**Upprunin til málið**
Málið snýr seg um at fremja rák-kanningar í Nólsoyarfirði fyri at greina rákviðurskiftini bæði á yvirflatu og á botni.

Endamálið er at tryggja, at komandi havleiðingar verða lagdar í økið við støðugum og nøktandi botnráki, sum førir spillivatnið burtur frá landi og tryggjar nøktandi fortynning.

**Lýsing av málinum**
Málið snýr seg um at fremja rák-kanningar í Nólsoyarfirði fyri at greina rákviðurskiftini bæði á yvirflatu og á botni.

Endamálið er at tryggja, at bæði verandi og komandi havleiðingar verða lagdar og tillagaðar í økið við støðugum og nøktandi botnráki, sum førir spillivatnið burtur frá landi og tryggjar nøktandi fortynning. Arbeiðið verður mett at kosta kr. 680.000.

Royndir vísa, at ónøktandi vitan um rákviðurskifti kann føra til óhepnar loysnir, har spillivatn verður liggjandi nær landi ella í ávísum førum ført aftur ímóti landi. Tí er neyðugt at hava eitt álítandi grundarlag fyri at meta um bæði staðseting og møguliga leingjan av leiðingum.

Rák-kanningarnar skulu tí nýtast sum grundarlag fyri at meta um, hvørt verandi leiðingar eru nøktandi staðsettar, og um tørvur er á at tillaga ella leingja tær, so tær røkka út í øki við betri rákviðurskiftum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 168 frá 16. desember 2021
Kunngerð nr. 111 frá 7. september 2009 um spillivatn

**Upplýsingar frá umsitingini**
Umsitingin metir, at rák-kanningar eru ein grundleggjandi fortreyt fyri at kunna staðseta havleiðingar á rættan hátt.

Neyðug vitan um botnrák er avgerandi fyri at tryggja, at spillivatn verður ført burtur frá landi og fortynt á nøktandi hátt.

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☐**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |

| | **Býráðsfundur**<br>30. april 2026 | Blað nr.: 437<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |
|---|---|---|---|---|

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

## Játtan:

Vanlig játtan ☒

Eykajáttan ☐

Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6875 | LK68999 | Kloakkir | 6875 | | | Rák-kanningar í Nólsoyarfirði | 680.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**:

Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- at tikið verður undir við at bjóða arbeiðið út til ráðgeva, at lýsa tørvin og at gera uppskot til loysn.
- at játta kr. 680.000 til prosjektering og útbjóðing av Løgukarmi LK68999 Kloakkir, undir konto 6875 Kloakkir (íløgur), á nýggja verkætlan "Rák-kanningar í Nólsoyarfirði" undir konto 6875 Kloakkir (íløgur).
- at leggja málið fyri nevndina aftur, tá tilboð fyriliggur.
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 13. apríl 2026:** Ein meiriluti, Bergur Robert Dam Jensen, Anja Weyhe, Guttormur í Skála, Birgir Nielsen, tekur undir við tilmælinum.

Tróndur Sigurðsson tekur ikki undir við tilmælinum, men vísir til tær kanningar, sum vórðu gjørdar í sambandi við útbyggingina av Tórshavnar havn.

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2026:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Kristianna Winther Poulsen, Heidi Lava Elgeirsdóttir og Høgni Vilhelmsen, tekur undir við meirilutanum í teknisku nevnd og beinir málið í býráðið.

Tróndur Sigurðsson tekur ikki undir við tilmælinum, men vísir til tær kanningar, sum vórðu gjørdar í sambandi við útbyggingina av Tórshavnar havn.

**Býráðsfundur 30. apríl 2026:** Útsett.

# 118/26 Hosufóðring 2026

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 13.04.2026 | 51/26 | 26/01677-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.04.2026 | 90/26 | 26/01677-1 |
| 3 Býráðsfundur | 30.04.2026 | 118/26 | 26/01677-1 |

**Upprunin til málið**
Tørvurin á at dagføra og betra verandi spillivatnsleiðingar í miðbýnum, har fleiri av leiðingunum eru gamlar og í ringum standi.

Av tí at leiðingarnar liggja í økjum við nógvari ferðslu og útbygdum økjum, er tað trupult at fremja arbeiðið við vanligari uppgraving.

**Lýsing av málinum**
Málið snýr seg um at halda fram við nýtslu av hosufóðring.
Henda loysn fevnir um, at ein fleksibul slanga, ið er gjørd úr glasfipri ella filt og imprægnerað við epoxy, verður førd inn í verandi rør, blást upp og herdað, soleiðis at eitt nýtt og tætt rør verður skapt inni í tí gamla.

Arbeiðshátturin er nýttur seinastu árini við góðum úrslitum, og verður nú endurtikin sum partur av framhaldandi viðlíkahaldi av kloakkskipanini.
Serliga í miðbýnum er hetta ein hóskandi loysn, tí hon sleppur undan, í nú verandi løtu, stórum uppgrevstri.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 168 frá 16. desember 2021
Kunngerð nr. 111 frá 7. september 2009 um spillivatn

**Upplýsingar frá umsitingini**
Umsitingin metir, at hosufóðring er ein væl egnaður og kostnaðareffektivur háttur at umvæla gamlar spillivatnsleiðingar.

Loysnin hevur víst seg at vera haldfør og á støði við at leggja nýggj rør, samstundis sum hon minkar um órógv og arbeiðstíð í økjum við nógvari ferðslu.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

| | **Býráðsfundur**<br>30. april 2026 | Blað nr.: 439 |
|---|---|---|
| | | Forkvinnunnar merki: |

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| 6875 | LK68999 | Kloakkir |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| 6875 | | | Hosufóðring 2026 |

| **Upphædd** |
|---|
| 7.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- at tikið verður undir við at bjóða arbeiðið út til ráðgeva, at lýsa tørvin og at gera uppskot til loysn.
- at játta kr. 7.000.000 til prosjektering og útbjóðing av Løgukarmi LK68999 Kloakkir, undir konto 6875 Kloakkir, á nýggja verkætlan "Hosufóðring 2026" undir konto 6875 Kloakkir (íløgur).
- at leggja málið fyri nevndina aftur, tá tilboð fyriliggur.
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 13. apríl 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2026:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd, við teirri viðmerking at fíggjarnevndin tekur endaliga avgerð um tilboðini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. apríl 2026:** Útsett.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>30. april 2026 | Blað nr.: 440 |
| | Forkvinnunnar merki: |

# 119/26 Spælipláss á Signabø - 23/06361

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Kollafjarðarnevndin | 05.03.2025 | 6/25 | 25/03603-2 |
| 2 Kollafjarðarnevndin | 20.05.2025 | 10/25 | 25/03603-2 |
| 3 Kollafjarðarnevndin | 13.11.2025 | 19/25 | 25/03603-2 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.04.2026 | 100/26 | 25/03603-2 |
| 5 Fíggjarnevndin | 22.04.2026 | 82/26 | 25/03603-2 |
| 6 Býráðsfundur | 30.04.2026 | 119/26 | 25/03603-2 |

**Upprunin til málið**
Tann 15. juni 2023 vísti staðbundna nevndin á, at teimum vantar eitt spælipláss á Signabø. Staðbundna nevndin skeyt upp, at eitt spælipláss verður gjørt omanfyri fótbóltsvøllin. Víst verður til mál nr. 23/06361.

**Lýsing av málinum**
Síðani upprunan av málinum hevur verið arbeitt við at keypa part av matr. nr. 280a, Signabøur, til at byggja spæliplássið á. Keypið varð framt í 2024, og er nú klárt at fara undir at íverkseta ítøkiliga spæliplássið.

Hjálpirót hevur gjørt uppskot til skipan av spæliplássinum – sí j.nr 25/03603-3, Náttúruspælipláss á Signabø.

Sostatt er klárt hjá grannalagnum at fara undir at íverkseta spæliplássið, tá fígging er fingin til arbeiðið.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Mannagongd – *Fríðkan av spæliplássum og grønum økjum – sí skjal nr.* 25/03603-4.
Henda mannagongd vísir, hvussu eigarafeløg og grannaløg kunnu søkja um fígging til gerð av spæliplássum og tilíkum.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Umsitingin mælir til, at grannalagið á Signabø, eigur eins og onnur grannaløg/eigarafeløg í Tórshavnar kommunu, sjálvi at standa fyri og leggja arbeiðsorku í at fáa teirra spælipláss íverksett. Rakstrarkontan kt. 6210, Fríðkan av býnum, er fyri 2024 raðfest, so neyðugt verður við aðrari fígging, um gongd skal setast á spæliplássið nú í 2025.

Av tí at talan er um rakstrarjáttan, er tað neyðugt, at grannalagið hevur ein ábyrgdarpersón, ið skal tryggja, at ætlanin verður sett í verk og framd.
Við hesum má grannalagið á Signabø leggja eina ætlan sum skjótast.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
23/06361 Spælipláss á Signabø

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Uppskot frá Hjálpirót – *23/06361-3.*
Tinglýst skeyti 05.02.25 – spælipláss á signabø – *25/03603-1.*
*Mannagongd – Fríðkan av spæliplássum og grønum økjum –* 25/03603-4.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
Enn er ikki avgjørt, hvussu spæliplássið skal fíggjast – Rakstrarjáttanin kt. 6210, Fríðkan av býnum, er raðfest fyri fíggjarárið 2025, og støða má tí takast til, um játtan skal finnast til arbeiðið av aðrari játtan, ella um grannalagið søkir kommununa um játtan fyri 2026.

**Tilmæli:**
Kunnað verður um málið í staðbundnu nevndini fyri Kollafjørð.

**Kollafjarðarnevndin 05. mars 2025:** Útsett.

**Kollafjarðarnevndin 20. mai 2025:** Kunnað og umrøtt. Nevndin kundi ynskt, at onkur frá kommununi var við til at byrja verkætlanina – eitt nú gera lendisarbeiðið, og at borgarar á staðnum síðani vóru við til at fremja verkætlanina.

Søkjast má um játtan til 2026 (freistin er 1. desember 2025).

**Ískoyti:**

Kommunan hevur í 2024 fyriskipað, at Hjálpirót hevur gjørt uppskot til skipan av spæliplássinum á Signabø, sí skjal nr. *25/03663-10, Uppskot til náttúruspælipláss á Signabø*.

Grannalagið á Signabø, eigur eins og onnur grannaløg/eigarafeløg í Tórshavnar kommunu, sjálv at standa fyri og leggja arbeiðsorku í at fáa staðbundna spæliplássið íverksett.

Søkjast kann um stuðul til arbeiðið, og skal umsóknin verða kommununi áðrenn 1. des.
Víst verður til skjal nr. *25/03603-11, Mannagongd ísv stuðul til grøn øki_spæliøki.*

Kunnað verður um málið.

**Kollafjarðarnevndin 13. november 2025:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Í samband við at eigarafelagið á Signabø hevur sent kommununi umsókn um stuðul til spælipláss á Signabø skal játtan fáast til hetta arbeiðið.

<u>Spælipláss</u>
Eigarafelagið á Signabø hevur sent kommununi umsókn um stuðul á kr. 400.000 til at gera spælipláss á Signabø.

| | **Býráðsfundur**<br>30. april 2026 | Blað nr.: 442 |
|---|---|---|
| | | Forkvinnunnar merki: |

Hjálpirót hevur teknað eina lendisætlan fyri spæliplássið, *skjal nr. 25/03603-3, Náttúruspælipláss á Signabø.*
Arbeiðið fevnir um lendisarbeiði, dren, gøtur, og spæliútgerð.
Arbeiðstakari skal gera lendisarbeiðið, spæliútgerð skal keypast frá veitara, og staðbundna fyritøkan BULUR skal leggja bygdafólkinum lag á at útføra nakað av arbeiðinum.
Verkætlanin verður eitt felagsarbeiðið fyri bygdafólkið á Signabø og á Oyrareingjum.

**Skjøl:**
*Skjal nr. 25/03603-3, Náttúruspælipláss á Signabø*

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6275 | LK62998 | Fríðkan av bygdunum | 6275 | L62052 | Fríðkan av bygdunum | | 400.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 400.000 |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2026 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- At kr. 400.000 verða játtaðar til spæliplássið á Signabø
- At játtaðar verða kr. 400.000 av LK62998, Fríðkan av bygdunum á kt. 6275, L62052, Fríðkan av bygdunum.

At málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. apríl 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2026:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. apríl 2026:** Útsett.

# 120/26 Útbjóðing av matr. nr. 203c í Kollafirði til raðhúsa- ella íbúðarbygging - 21/02624

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.06.2025 | 107/25 | 25/06231-2 |
| 2 Tekniska nevnd | 10.06.2025 | 42/25 | 25/06231-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 12.06.2025 | 108/25 | 25/06231-2 |
| 4 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 155/25 | 25/06231-2 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 21.11.2025 | 182/25 | 25/06231-2 |
| 6 Fíggjarnevndin | 03.12.2025 | 226/25 | 25/06231-2 |
| 7 Býráðsfundur | 11.12.2025 | 277/25 | 25/06231-2 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.04.2026 | 87/26 | 25/06231-2 |
| 9 Býráðsfundur | 30.04.2026 | 120/26 | 25/06231-2 |
| 10 Kollafjarðarnevndin | 19.05.2026 | 9/26 | 25/06231-2 |

**Upprunin til málið**
Hetta mál er framhald av máli nr. 21/02624, Útbjóðing av matr. nr. 203c í Kollafirði til raðhúsa- ella íbúðarbygging.
Gamla málslýsingin sæst í viðhefta skjali, *j.nr. 25/06231-3, Mál nr. 21_02624-2_Málslýsing_Útbjóðing av matr. nr 203c.*

**Lýsing av málinum**
Matr. nr. 203c bleiv í 2021 boðin út til raðhúsa- og/ella íbúðarbygging. Eitt tilboð varð móttikið, og varð tað samtykt at selja tilboðsveitara stykkið til raðhúsa- og íbúðarbygging. Men samráðingarnar rukku ikki á mál, og tí varð tilboðið avlýst.

Síðani varð økið boðið út í tveimum umførum í 2022, men grundað á, at eingi tilboð komu inn, varð samtykt at skipa økið til sethús, umframt at keypa nakað av lendi frá grannaognunum, soleiðis at sethúsaútstykkingin kundi skipast við grundstykkjum á 400 fermetar. Samráðingarnar við grannaognirnar komu væl ávegis, og økið varð boðið út til sethús.

Kommunan móttók tvey tilboð upp á at gera útstykkingina. Hallur Hansen, entreprenørur sp/f, vann útboðið, men grundað á, at kostnaðurin á sethúsastykkjunum gjørdist ov høgur, varð samtykt í býráðnum, at selja grundstykkini fyri kr. 500.000 pr. stk, og at játta kr. 2.500.000 fyri at fíggja írestandi fígging, sum kom at mangla í.

Kommunala eftirlitið tók málið upp og kom til ta niðurstøðu, at kommunur ikki kunnu fara undir útstykkingar, um tað frammanundan er greitt, at útstykkingin ikki kemur at hanga saman fíggjarliga og tær tí koma at áleggja skattgjaldaranum eyka útreiðslur

Samtyktin í býráðnum er tí ikki í samsvari við niðurstøðurnar frá kommunala eftirlitinum. Av hesi orsøk verður mælt til, at útboðið verður annullerað, og arbeiðstakarin loystur úr sínum skyldum mótvegis Tórshavnar kommunu, og møguligt endurgjald veitt honum í hesum sambandi.

Á várið 2025 varð arbeiðsbólkur settur at vísa á 7-10 átøk, sum kunnu gera sítt til at fremja málið um, at fleiri bústaðir verða bygdir komandi árini. Í hesum arbeiðinum lýsti átak E, at kommunur skuldu fáa loyvi til partvís at rinda fyri byggibúning. Tí verður mælt til, at farið verður aftur til upprunaætlanina við økinum, og harvið undir enn eina roynd at bjóða matr. nr. 203c út til bygging av raðhúsa- og/ella íbúðarbygging, har kommunan antin áðrenn ella samstundis luttekur í at skipa og gera vegin í økinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**

Nýggj serstøk byggisamtykt skal gerast fyri økið, tá ætlanin fyri økið er góðkend, og verandi serstaka byggisamtyktin, *SB_Kollafjørður_Lygnnes_2011_2_2011*, skal avtakast.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Málið eigur at verða lagt fyri staðbundnu nevndina í Kollafirði til kunningar, tá tað er samtykt í býráðnum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
*j.nr. 25/06231-3, Mál nr. 21_02624-2_Málslýsing_Útbjóðing av matr. nr 203c*

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei
Í núverandi støðu eru ongar fíggjarligar avleiðingar av málinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til:
- At verandi útboð til sethúsaútstykking verður avlýst, og arbeiðstakarin loystur úr sínum skyldum og møguligt endurgjald verður latið.
- At nýtt útboð fyri matr. nr. 203c verður skipað til bygging av íbúðum og/ella raðhúsum.
- At málið verður beint í býráðið umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 10. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, og at málið verður lagt fyri nevndina aftur til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2025:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Borgarstjórin setti fram soljóðandi broytingaruppskot:

Tikið verður undir við fíggjarnevndini við teirri broyting, at gjørdar verða keypsavtalur við ognararnar av matr. 209a, 308 og 309, og at játta upp til kr. 410.000 alt eftir endaligu fermetrunum íroknað tinglýsing og matrikulering av løgukontu L64022 útstykking Lygnnes.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið.

Fyri broytingaruppskotinum atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Guttormur í Skála, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Birgir Nielsen, Astrið Breckmann og Hildur Eyðunsdóttir.

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

Málið varð, soleiðis broytt, samtykt við 12 atkvøðum fyri, ongari atkvøðu ímóti og einari blankari atkvøðu.

**Ískoyti:**
Samráðingar hava verið við ymisku eigararnar av lendi niðanfyri matr. nr. 203c, Kollafjørður.

Viðvíkjandi matr.nr. 308
Søla av uml. 68 $m^2$, sum verður lagt afturat matr.nr. 308.
Keyp av uml. 418$m^2$, sum verður lagt afturat matr.nr. 203c.
Kostnaðurin fyri  hetta er áljóðandi: netto 350 $m^2$ x 350 kr/$m^2$ = 122.500 kr.
Samstundis søkir eigari av matr.nr. 308, um sundurbýti av einum grundstykki á 500 $m^2$ burturav matr.nr. 308.

Viðvíkjandi matr. nr. 309
Keyp av uml. 971 $m^2$ av matr. nr. 309, sum verður lagt saman við matr.nr. 203c.
Kostnaðurin fyri hetta er áljóðandi: 971$m^2$ x 350 kr/$m^2$ = 339.850 kr.

Samlaður netto keypsprísur: 122.00 kr + 339.850 kr = **462.350 kr.**

Neyðugt verður harumframt at leggja upp fyri útreiðslum til matrikulering og tinglýsing v.m., mettar útreiðslur.

Leyslig útrokning av kostnaði til matrikulering:

| | |
|---|---:|
| Grundgjald | 4.000,00 |
| 3. frábýttir lutir ( 3.000 x 3 ) = | 9.000,00 |
| Gjald fyri virði 2 % av 1.427 $m^2$ á 350 kr. $m^2$ = | 9.989,00 |
| Tilsamans | 22.989,00 |

Tinglýsingargjald:
Tinglýsing: 1 % + kr. av hvørjum skeyti

Torført er at meta um, hvussu hetta ítøkiliga málið verður avgreitt, men talan verður helst um 3 skeytir.

Samlaður mettur keypsprísur 462.350,00 kr. x 1 % = 4.623,50 kr.+ 3.000 kr. = 7.623,50 kr.

Samlaður mettur kostnaður verður hereftir  uml.        **492.962,5 kr.**

Møgulig onnur sakargjøld og møguligar endaligar víddir kunnu víkja frá, og verður tí søkt um at fáa eina fígging til vega á kr. 500.000 til avgreiðslu av hesum málinum.

Á býráðsfundinum 18. juni varð samtykt at játta upp til kr. 410.000, alt eftir endaligu fermetrunum, íroknað tinglýsing og matrikulering av løgukontu L64022, Útstykking Lygnnes. Nú tá samráðingarnar eru komnar á mál, so er tørvur á nakað hægri fígging til at fremja endaliga keypið. Sí journal nr. 25/06231-11, *"Kort. skjal. Keyp av lendi frá privatum, til útstykking á Lygnesi"*, sum sýnir, hvat ítøkiliga keypið fevnir um.

**Skjøl**
Journal.nr. 25/06231-11, *"Kort. skjal. Keyp av lendi frá privatum, til útstykking á Lygnesi"*

**Tilmæli**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, deildarleiðarin á Stjórnarskrivstovuni og býararkitekturin mæla til at hækka játtanina til keyp av lendinum við kr. 90.000 á løgukontu L64022, Útstykking Lygnnes, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 21. november 2025:** Samtykt at játta kr. 200.000 til at fremja keyp av matr.nr. 308, 309 og 209a á løgukontu L64022, Útstykking Lygnnes, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 03. desember 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Kristianna Winher Poulsen, tekur undir tilmælinum og beina málið í býráðið.
Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Høgni Vilhelmsen, tekur ikki undir við málinum.

**Býráðsfundur 11. desember 2025:** Atkvøtt varð um tilmælið, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri, fýra atkvøðum ímóti og eini blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Høgni Vilhelmsen og Rúni Reginsson Hammer.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen og Rúni Reginsson Hammer.

Atkvøddi blankt: Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti**
Á býráðsfundi 18. juni 2025 varð samtykt, at nýtt útboð fyri matr. nr. 203c í Kollafirði skal skipast til bygging av íbúðum og/ella raðhúsum.

Umsitingin hevur síðani arbeitt víðari við málinum. Samráðingar hava verið við nærmastu grannar, soleiðis at partar av teirra lendi er keypt og yvirtikið, og kann lendið sostatt verða partur av útbjóðingini.

Nýtt útboðstilfar er gjørt, sum leggur upp til, at partar av matr.nr. 203c, 308 og 209, uml. 5.772 m², verður boðið út til bústaðarbygging við íbúðum og/ella raðhúsum samsvarandi samtyktini hjá býráðnum. Sí skjal nr. *25/06231-30 Útbjóðingartilfar, matr. nr. 203c, 308 og 309, apríl 2026*.

Dentur verður lagdur á eina bústaðarbygging við góðari dygd, hóskandi býti millum rað- og íbúðarbygging og eigaraviðurskifti, samstundis sum kommunan tryggjar, at bústaðirnir í størstan mun koma røttum málbólki til gagns.

**Skjøl:**
Skjal nr. 25/06231-30 *Útbjóðingartilfar, matr. nr. 203c, 308 og 309, apríl 2026*

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at
- *Útbjóðingartilfar, matr. nr. 203c, 308 og 309, apríl 2026,* til bygging av íbúðum og/ella raðhúsum, skjal nr. 25/0623-30, verður samtykt,
- at umsitingini verður heimilað at bjóða økið út samsvarandi hesum
  at málið verður beint í býráðið

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. apríl 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 30. apríl 2026:** Útsett.

# 121/26 Útbjóðing av matr. nr. 1356, 1355 og 645a til lutaíbúðir - 21/04713

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.01.2025 | 12/25 | 25/02101-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 29.04.2026 | 104/26 | 25/02101-1 |
| 3 Býráðsfundur | 30.04.2026 | 121/26 | 25/02101-1 |

**Upprunin til málið**
Mál 21/04713 – Útbjóðing av matr. nr. 1355 og 1356, Tórshavn til lutaíbúðir, Sí skjal nr. *25/02101-4, Uppruna málslýsing 21-04713*.

**Lýsing av málinum**
Tann 21. Juni 2023 samtykti býráðið at selja tilboðsgevara matr. nr. 1355 og 1356 fyri kr. 10.000.000,- og at fremja søluna sambært eini nærri avtalaðari gjaldsætlan.

Samráðingar hava síðani verið við tilboðsgevaran um verkætlanina, og eitt skifti søkti tilboðsgevarin um at broyta verkætlanina, so tað skuldi bera til at selja part av íbúðunum í verktætlanini sum eigaraíbúðir. Hetta hevði verið ein broyting, sum hevði kravt góðkenning frá byráðnum, tí verkætlanin upprunaliga varð boðin út sum ein verkætlan við lutaíbúðum og leiguíbúðum.

Av tí at tilboðsgevarin er komin væl áleiðis við fyrireikingunum til at fara undir bygging á teimum báðum stykkjunum, matr. nr. 1355 og 1356, Tórshavn, og av tí at hann vil sleppa í gongd skjótast gjørligt, hevur hann slept ynskinum um at fáa avgreitt málið um, hvørt fyrsti blokkur av íbúðum kann seljast sum eigaraíbúðir.

Tilboðsgevarin er tískil sinnaður til at venda aftur til ta samtykt, sum býráðið gjørdi tann 21. juni 2023, har tikið var undir við einum tilmæli frá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini um at selja tilboðsgevaranum matr. nr. 1355 og 1356 fyri eina tillagaða tilboðsupphædd áljóðandi kr. 10.000.000,00 og at fremja søluna smb. eini nærri avtalaðari gjaldsætlan.
Fíggjarnevndin verður kunnað um umbønina frá tilboðsgevaranum um at venda aftur til upprunaligu samtyktina hjá býráðnum, so sølan kann avgreiðast við undirskriving av skeyti upp á tær báðar ognirnar.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
21/04713

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
*25/02101-4, Uppruna málslýsing 21-04713*

| | **Býráðsfundur**<br>30. april 2026 | Blað nr.: 448 |
|---|---|---|
| | | Forkvinnunnar merki: |

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | X | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | X | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

## Játtan:

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| | | | | | | | |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:** Mælt verður fíggjarnevndini til at umrøða kunningina um umbønina frá tilboðsgevaranum, og eru ongar viðmerkingar hesum viðvíkjandi, verður sølan av matr. nr. 1355 og 1356 avgreidd við undirskriving av skeyti upp á báðar ognirnar samsvarandi teirri samtykt, ið býráðið gjørdi 21. juni 2023. Keypspeningurin verður goldin eftir eini gjaldsætlan í trimum stigum.

**Fíggjarnevndin 22. januar 2025:** Málið umrøtt og tikið til eftirtektar.

**Ískoyti:**
Samráðingar hava verið millum RMP Projektmenning og Tórshavnar kommunu um ætlaðu leiguíbúðarbygging á Villingardalsvegi.

RMP Projektmenning er komin væl áleiðis við fyrireikingunum til at fara undir bygging á matr. nr. 1355, og hevur funnið íleggjarar til verkætlanina.

Byggjast skulu 119 leigubústaðir á matr. Nr. 1355, Tórshavn, í fyrstu syftu, og er ynski í aðru syftu at veita tilsøgn í trý ár til matr. Nr. 1356, Tórshavn.

Gjørt er uppskot til skeyti, har rindast skulu kr. 5.000.000 við undirskrivan av skeyti fyri matr. Nr. 1355, Tórshavn.

Í staðin fyri at keypa bæði stykkini beinanvegin, keypir felagið fyrst matr. nr. 1355 og fær tilsøgn (optión) upp á at sleppa at keypa matr. nr. 1356 seinni og innan trý ár.

Góðkennir býráðið broyttu treytirnar, verður matr. nr. 1356 lagt av til keyparan í trý ár, og er ein møgulig søla av hesum matriklinum treytað av, at felagið hevur hildið sínar skyldur um bygging á matr. nr. 1355.

Tá trý ár eru liðin, fellur tilsøgnin burtur, um keyparin ikki hevur keypt økið innan ta tíð.

Ásett er eisini, at kommunan átekur sær eina skyldu til at taka inn aftur óbygda partin av grundøkjunum og rinda aftur keypspeningin ella lutfalsliga partin av keypspeninginum, um keyparin ikki heldur sínar byggiskyldur og fremur alla byggiverkætlanina.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
1. at selja tilboðsgevara matr. nr. 1355 og veita tilsøgn í trý ár um keyp av matr. nr. 1356
2. at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 29. apríl 2026:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Kristianna Winther Poulsen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Høgni Vilhelmsen, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 30. apríl 2026:** Útsett.

# 122/26 Fyrispurningur um frábýti og byggiloyvi á matr. nr. 1341d, undir Krákugjógv 28, Tórshavn - 24/08980

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 21.11.2025 | 179/25 | 25/00828-2 |
| 2 Býráðsfundur | 11.12.2025 | 284/25 | 25/00828-2 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.04.2026 | 88/26 | 25/00828-2 |
| 4 Býráðsfundur | 30.04.2026 | 122/26 | 25/00828-2 |

**Upprunin til málið**
Fyrispurningur um sundurbýti og byggiloyvi á matr. nr. 1341d, undir Krákugjógv, varð í desembur 2024 frámælt av umsitingini, m.a. tí at matrikulin lá í 4. grundumráði, sí skjal *184/24 Samtykt Byggi- og býarskipanarnevndin, 11.12.2024.* Byggi- og býarskipanarnevndin samtykti í tí sambandi m.a. at broyta byggisamtyktina fyri útstykkingina, sum matr. nr. 1341d er partur av.

**Lýsing av málinum**
Matr. nr. 1341d er partur av útstykking, ið varð gjørd í seinnu helvt av 80'unum. Tá útstykkingarætlanin varð skipað, lá økið sum sethúsaøki í byggisamtyktini. Í sambandi við ætlanir um innkomuveg oman fyri økið, varð ovari partur av økinum í 90'unum broytt til 4. grundumráði. Ætlaninar við innkomuvegnum eru sum kunnugt broyttar, og neyðugt er tískil ikki at halda fast í vegalinjuni, ið varð løgd í 90'unum.

Av tí at talan er um útstykkingarætlan, ið varð góðkend av býráðnum í øki, sum lá í sethúsaøki, umframt at linjuføringin av innkomuvegnum varð broytt, verður mett ráðiligt at broyta byggisamtyktina fyri økið, soleiðis at øll útstykkingin liggur í A1 sethúsaøki.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri A1 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:

- Umráðisparturin verður lagdur til stakhús. Eftir serloyvi frá byggivaldinum kunnu eisini byggjast tvíhús, raðhús og tílíkir bústaðir fyri eitt húski. Stakhús og tvíhús kunnu eisini hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð.
- Í sambandi við bústaðarøki kann byggivaldið geva serloyvi til annað virksemi sum handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til, treytað av, at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum sethúsabýlingur og sum lúka treytirnar í flokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu.
- Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 500 m2 fyri stakhús og 300 m2 fyri hvønn partin av tvíhúsum ella raðhúsum. Fyri raðhús kann ein partur av minstuvíddini verða lagdur sum felagslendi, tó í mesta lagi 100 m2 fyri hvørt grundstykki.
- Útstykking verður einans loyvd sambært útstykkingarætlan fyri eitt natúrligt avmarkað øki.

Ásetingar fyri 4. grundumráði í almennu byggisamtyktini eru m.a.:
- 4. grundumráði verður lagt til landbúnað og alment frílendi og tílíkt.
- Loyvt verður einans at byggja fjós, úthús og annað, sum hevur við vanligt traða- og jarðarbrúk at gera.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Kommunan eigur tveir av matriklunum í útstykkingini, matr. nr. 1341c og 1341e. Í samtyktini frá byggi- og býarskipanarnevdnini frá 11. desember 2024, mál 24/08980, varð, umframt at broyta byggisamtyktina fyri økið, eisini samtykt, at kommunan skuldi fara undir at kanna, um til bar at fremja makaskifti, soleiðis at kommunan kundi fáa matr. nr. 1341h og 1341m í býti við stykkini, sum kommunan eigur. Hetta verður mett vera skynsamt í mun til eina framtíðar víðkan av vegnum undir Krákugjógv. Mælt verður til, at

stjórnarskrivstovan stendur fyri samráðingum hesum viðíkjandi, og at hetta verður lýst í nýggjum máli um makaskifti.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- *Fyrispurningur um frábýti og byggiloyvi á matr. nr. 1341d, undir Krákugjógv 28, Tórshavn*, journal nr. 24/08980.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

-

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**

- *Almenna byggisamtyktin – áðrenn broyting*, journal nr. 25/00828-4.
- *Almenna byggisamtyktin – eftir broyting*, journal nr. 25/00828-4.
- *AB 1982,* journal nr. 25/00828-4.
- *AB 1996*, journal nr. 25/00828-4.
- *184/24 Samtykt Byggi- og býarskipanarnevndin, 11.12.2024,* journal nr. 24/08980.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:

- at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr. 1341f, 1341d, 1341e, 1341c, 1341b og 1341g frá 4. grundumráði til A1 øki.
- at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 21. november 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 11. desember 2025:** atkvøtt varð um tilmælið, ið bleiv samtykt við tólv atkvøðum fyri og einari atkvøðu ímóti.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Rúni Reginsson Hammer og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson

**Ískoyti:**
Í sambandi við almennu hoyringina, sum var 16. desember 2025 til 7. februar 2026, komu tvær viðmerkingar – báðar frá eigarum av ognum í nærøkinum, ið føra fram ynski um at broyta byggisamtyktirnar fyri ognirnar frá landbúnaðarøki til A1 øki, sí skjal *kort, matr. nr. 1344a og 1233e.*

Í tí fyrstu viðmerkingini, sí skjal *Viðmerking – Tommy Jacobsen,* verður ynski ført fram um at matr. nr. 1233e somuleiðis verður broytt frá 4. Grundumráðið, landbúnaðarøki, til A1, sethúsaøki. Orsøkin er, at talan er um ogn við ástandandi sethúsum, og gera galdandi ásetingar fyri ognina tað trupult, tá umbyggingar og broytingar skulu gerast.

<u>Viðmerkingar frá umsitingini:</u>
Ognin er uml. 1700 $m^2$ til víddar. Í løtuni eru eini sethús á ognini. Um øll ognin verður broytt til A1 øki, kann ognin býtast í uml. 3 sethúsagrundstykki. Ognin liggur við endan á vegnum har Norðari Ringvegur og Oyggjarvegurin møtast, og verður tað mett óheppið, um fleiri ognir verða knýttar at júst hesum vegastrekkinum. Harumframt liggur ognin vestan fyri Oyggjarvegin, og eingi sethúsaøki eru hesumegin Oyggjarvegin, sum verður mettur at verða býarmarkið móti vestri/norði. Tískil verður mælt frá at ganga viðmerkingini á møti.

Seinna viðmerkingin, sí skjal *Viðmerking – Bjarni Beder o.fl.*, snýr seg um, at byggisamtyktin fyri matr. nr. 1344a verður broytt, soleiðis at øll ognin verður A1 sethúsaøki.

<u>Viðmerking frá umsitingini:</u>
Stórsti parturin av matr. nr. 1344a liggur frammanundan í A1 øki og økið, ið søkt verður um at broyta til A1 øki, liggur millum tvær útstykkingar, útstykkingin á Ryskigøtu og undir Krákugjógv. Soleiðis hevði ein tílík broyting fylgt eini natúrligari byggilinju móti vestri og niðan móti Húsahaga. Tískil verður mælt til at ganga umsóknini á møti.

**Skjøl**
- *Kort, matr. nr. 1344a og 1233e,* journal nr. 25/00828-15.
- *Viðmerking – Tommy Jacobsen,* journal nr. 25/00828-16.
- *Viðmerking – Bjarni Beder o.fl.,* journal nr. 25/00828-16.

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- Ikki at ganga ynskinum í skjal *Viðmerking – Tommy Jacobsen* á møti.
- at ganga ynskinum í skjal *Viðmerking . Bjarni Beder o.fl.* á møti.
- at loyva sundurbýti av matr. nr. 1341d, sum samtykt í byggi- og býarskipanarnevndini 11. desember 2024, mál 24/08980.
- beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. apríl 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 30. apríl 2026:** Útsett.

# 123/26 Umsókn at broyta serstaka byggisamtykt nr. 3 og almennu byggisamtyktina fyri matr. nr. 736æ, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.04.2026 | 90/26 | 25/06993-3 |
| 2 Býráðsfundur | 30.04.2026 | 123/26 | 25/06993-3 |

**Upprunin til málið**
Eigarin av ognini, sum hýsir politistøðini við R.C. Effersøesgøtu, ynskir at víðka um parkeringsplássið, og søkir í tí sambandi um at broyta byggisamtyktina fyri allan, ella part av matr. nr. 736æ, Tórshavn, soleiðis at hetta ber til, sí skjal *Umsókn, við tekningum*.

**Lýsing av málinum**
Matr. nr. 736æ liggur í D1 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sum er ætlað til almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál, umframt í øki C2 øki í serstøku byggisamtykt nr. 3, sum somuleiðis er ætlað til almenning, og skal ikki byggjast á økinum.

Um tað skal bera til at gera parkeringspláss á økinum, skulu tvær byggisamtyktrarbroytingar fremjast, ein av almennu byggisamtyktini, sum skal broytast til C1 miðstaðarbygging og ein av serstøku byggisamtykt nr. 3, sum skal broytast til B1 øki, sum somuleiðis er til miðstaðabygging.

Sambært umsóknini er ætlanin at brúka økið til at víðka um parkeringsøkið við 8-10 p-støðlum til starvsfólk hjá politinum. Kunnað verður um, at p-plássið skal ikki brúkast til politibilar/neyðsendarakfør ella til vitjandi, men einans til starvsfólk. Í umsóknini stendur harumframt, at verandi parkeringspláss ikki nøktar tørvin ið starvsfólkini hava til parkeringspláss.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri D1 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:
- Umráðisparturin verður lagdur til almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál.

Ásetingar fyri C1 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:
- Umráðisparturin verður lagdur til miðstaðarbygging.

Ásetingar fyri C2 øki í serstøku byggisamtykt nr. 3 eru m.a.:
- C2 verður lagt sum almenningur.
- A eind C2 skal ikki verða bygt.

Ásetingar fyri B1 øki í serstøku byggisamtykt nr. 3 eru m.a.:
- Eindirnar B1, B2 og B3 kunnu bert verða nýttar til handilsbúðir, skrivstovur, fyrisiting, heilsubótarhøli, byggingar til mentanar-endamál (bókasavn, kykmyndahøkk o.a.) og tílíkt.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tað er ikki eitt yvirskipað býarskipanarligt ynski at minka um D1 økini í býnum, av tí at hesi frammanundan eru fá í tali, og sama er galdandi fyri grøna økið, sum umsøkjari søkir um at broyta, soleiðis at økið kann nýtast til parkering.

Harumframt er hugsjónin viðvíkjandi parkering til ymiskt virksemi, sum liggur so sentralt, sum politistøðin ger, við at broyta seg tann vegin, at man heldur ynskir at raðfesta lendi til trivnað og býartættan, heldur enn at brúka dýrabart lendi til parkering. Henda umsóknin gongur beint ímóti teirri hugsjón, og tekur fríøki til parkeringspláss.

Økið liggur nær góðari almennari ferðslu og fleiri almenn parkeringspláss eru innan fyri eina rímiliga gongufrástøðu, t.d. parkeringsplássið í Gundadali, sum er uml. 300 m frá Politistøðini. Tað verður ikki mett

vera órímiligt, at starvsfólk nýta hesar møguleikar ístaðinfyri at minka um avmarkaðu fríøkini í býnum og leggja tey til parkering.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- *Útkoyring frá politistøðini í R.C. Effersøesgøtu,* journal nr. 25/06685.
- *Fyrispurningur um møguleika at gera parkeringspláss á matr. nr. 736æ, Politistøðin, Tórshavn,* journal nr. 24/08212.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

Í málinum *Útkoyring frá politistøðini í R. C. Effersøesgøtu,* verður fyrispurningur um sama parkeringspláss viðgjørdur av Teknisku deild. Tann viðgerðin snýr sum um til- og frákoyringarviðurskiftini, um parkeringingsplássið økist við 8-10 parkeringsplássum. Í mun til tað, mæla tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin til at taka undir við ætlanini at víðka parkeringsplássið. Málið er ikki viðgjørt politiskt enn.

Í málinum *Fyrispurningur um møguleika at gera parkeringspláss á matr. nr. 736æ, Politistøðin, Tórshavn* verður fyrispurningur frá politistøðini svaraður. Byggimálsdeildin svarar, at væntandi kann frávik gevast til at gera parkeringspláss á matr. nr. 736æ, men ætlanin má lýsast nærri, áðrenn endaligt loyvi kann gevast.

**Leggjast fyri staðbundna nevnd  Ja ☐  Nei ☒**

**Skjøl**

- *Umsókn við tekningum,* journal nr. 25/06993-5.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli**:

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla frá at ganga umsóknini á møti grundað á ynskið um at varðveita fríøkið, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. apríl 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 30. apríl 2026:** Útsett.

# 124/26 Broyting av ásetingum um byggi- og nýtlsutstig fyri A1 øki í almennu byggisamtyktini

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.04.2026 | 114/26 | 26/02792-1 |
| 2 Býráðsfundur | 30.04.2026 | 124/26 | 26/02792-1 |

**Upprunin til málið**
Umsitingin hjá Tórshavnar kommunu viðger í løtuni nakrar umsóknir um bústaðarbygging í umráðisparti A1, sum ikki eru í samsvari við almennu byggisamtyktina fyri økið, men sum annars politiskt og býarskipanarliga verða mettar sum ætlanir, ið gagna býnum, eru í samsvari við ymiskar ætlanir og politikkir, t.d. Bústaðarpolitikkin, umframt at tær eru í samsvari við yvirskipaða ynskið um at gagnnýta avmarkaða lendið í Tórshavnar kommunu á mest skynsama hátt og býartætta. Tá bygging ikki er í samsvari við almennu byggisamtyktina, men man annars tekur undir við ætlanini, er møguleikin fyri at gera serstakar byggisamtyktir mest nýtta býarskipanarliga amboðið. Almenna byggisamtyktin fyri umráðispartin skal tó heimila, at vikið verður frá ávísu ásetingini, og fyri umráðispart A1 er eingin heimild at víkja frá ásetingunum um byggi- og nýtslustig, sum tað annars verður loyvt í øðrum umráðispørtum.

**Lýsing av málinum**
Í øllum umráðispørtum í kommununi eru ásetingar um bygging so sum byggistig, nýtslustig og hæddir ásettar í almennu byggisamtyktini. Somuleiðis stendur lýst, hvørjum ásetingum víkjast kann frá, um serstøk byggisamtykt verður gjørd fyri eitt natúrligt avmarkað øki. Hetta er eitt nógv nýtt amboð í fleiri ymiskum byggiøkjum, og verður nýtt til at skipa tann avmarkaða umráðispartin nærri í mun til nærumhvørvi, politikkir og ætlanir í kommununi og tílíkt.

Fyri umráðispart A1 er ásett, at víkjast kann frá ásetingunum um nýtslu av økinum, minst loyvdu grundstykkjavídd og mest loyvdu hæddum. Mett verður, at tað somuleiðis átti at verið loyvt at vikið frá ásetingunum um mest loyvda byggi- og nýtslustig fyri eitt natúrligt avmarkað økið.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri umráðispart A1 í almennu byggisamtyktini eru m.a.:

1. Umráðisparturin verður lagdur til stakhús. Eftir serloyvi frá byggivaldinum kunnu eisini byggjast tvíhús, raðhús og tílíkir bústaðir fyri eitt húski. Stakhús og tvíhús kunnu eisini hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð.
5. Byggistigið skal ikki fara upp um 0,3.
6. Nýtslustigið skal ikki fara upp um 0,6 fyri stakhús og 0,7 fyri tvíhús, raðhús og íbúðir. Tó kann tað fyri grundstykkir til stakhús, sum eru minni enn 200 $m^2$ ella minni, fara upp til helvtina hægri og fyri stykkir millum 200 $m^2$ og 500 $m^2$ verða sett javnt minkandi soleiðis, sum mynd 3 vísir.
7. Hús skulu ikki verða bygd við meira enn tveimum hæddum umframt nýttum lofti. Kjallari verður roknaður sum húsahædd.
8. Hús við vanligari mønureising skulu ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg og 9 m til mønuna.
9. Verða hús bygd við einvegis takhalli ella sløttum taki, skal tann lægra síðan ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg og tann hægra síðan ikki vera hægri enn 7,5 til hægsta punkt við útvegg.
12. Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at byggja íbúðir.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tað kunnu vera fleiri orsøkir til, at hægri byggi- og nýtslustig er neyðugt fyri víðari menningina av bústaðarøkjum. T.d. eru fleiri bygningar í bústaðarøkjum, sum áður hava verið vinnubygningar, og høvdu verið væl egnaðir at broytt til íbúðarbygningar. Hesir eru ofta bygdir, áðrenn økið varð lagt til bústaðarøki, og hava hægri byggi- og nýtslustig enn annars loyvt í umráðispartinum. Galdandi ásetingar gera, at

byggiloyvi ikki kann gevast til nýggja virksemið, uttan at bygningurin minkar, so hann er í samsvari við mest loyvda byggi- og nýtslustig fyri umráðispartin, og hetta ger, at nógvar tílíkar verkætlanir detta niðurfyri.

Tað kunnu eisini verða viðurskifti so sum ynskið at byggja parkeringskjallara, og harvið hava størri fríøki. Parkeringskjallari telur við í nýtslustiginum, og tískil verður hetta ofta niðurraðfest av mennarum, hóast hetta annars býarskipanarliga verður mett vera skynsamt.

Av tí at mælt verður til at broyta ásetingina um, hvørjum víkjast kann frá í serstøkum byggisamtyktum í umráðisparti A1, verður somuleiðis mælt til at rætta ein feil í Kap. II, § 5, stk. 12. Í hesum punkti verður loyvt, at tað í serstakari byggisamtykt verður loyvt at víkja frá ásetingum um mest loyvdu hædd (stk. 8 og 9), men loyvt verður ikki, at vikið verður frá mest loyvdu hæddum (stk. 7). Ásetingarnar í stk. 7, 8 og 9 hanga saman, og tískil verður mælt til, at tað í serstakari byggisamtykt somuleiðis verður loyvt at víkja frá stk. 7.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**

- *Broyting í ásetingum fyri umráðispart A1*, journal nr. 26/02792-2.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at kap. II, § 5, stk. 12 verður broytt, soleiðis at tað í serstakari byggisamtykt fyri eitt natúrligt avmarkað økið somuleiðis verður loyvt at víkja frá ásetingum um byggistig (stk. 5), nýtslustig (stk. 6) og hæddir (stk. 7), og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. apríl 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 30. apríl 2026:** Útsett.

# 125/26 Broyting av almennu byggisamtyktini fyri matr. nr. 1435b við Varðagøtu. Frá A1 til A4.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.04.2026 | 91/26 | 26/00958-4 |
| 2 Býráðsfundur | 30.04.2026 | 125/26 | 26/00958-4 |

**Upprunin til málið**
Umsøkjari hevur, við heimild frá eigara, søkt um loyvi at byggja íbúðir á matr. nr. 1435b, Tórshavn.

**Lýsing av málinum**
Ognirnar liggja í A1 sethúsaøki, og hevur umsøkjari, í samráð við umsitingina, søkt um at broyta byggisamtyktina fyri økið til nýggja A4 økið, ætlað opnari/lágari íbúðarbygging, sum í løtuni liggur til góðkenningar hjá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri A1 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:

- Umráðisparturin verður lagdur til stakhús. Eftir serloyvi frá byggivaldinum kunnu eisini byggjast tvíhús, raðhús og tílíkir bústaðir fyri eitt húski. Stakhús og tvíhús kunnu eisini hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð.

Ásetingar fyri A4 øki smb. uppskoti til broyting av almennu byggisamtykini eru m.a.:

- Umráðisparturin verður lagdur til opna/lága bústaðabygging.
- Skipanin av økinum skal taka atlit til og hóska til kringsliggjandi bústaðarøki.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Í sambandi við yvirskipaða ynskið um at gagnnýta avmarkaða lendið í Tórshavnar kommuna á mest skynsama hátt og býartætta, verður mælt til, at tað í ávísum egnaðum sethúsaøkjum verða bygdar íbúðir ístaðin fyri sethús – hetta fyri at tryggja eina skynsama lendisnýtslu og burðardygga býarmenning. Uppskot um at gera nýggjan umráðispart til tílíka bygging í almennu byggisamtyktini, liggur í løtuni til góðkenningar hjá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum, sí mál *Nýggjur umráðispartur í almennu byggisamtyktini. A4 – opin og lág bústaðarbygging.* Møguleikin at leggja økið sum A4 øki er treytað av, at uppskotið verður góðkent.

Umsitingin metir, at matr. nr. 1435b er egnaður at skipa á ein tílíkan hátt. Av tí at talan er um íbúðarøki millum – ella tætt upp at – sethúsaøkjum, eru byggiregulerandi ásetingarnar fyri nýggja A4 økið at sammeta við tær fyri A1 – sethúsaøki. Tað vil millum annað siga, at mest loyvda byggistig er 0,30, mest loyvda nýtslustig er 0,70 og mest loyvda hædd er tann sama, sum í vanligum sethúsaøkjum. Munurin er, at tað í hesum nýggja umráðispartinum ber til at skipa økið sum íbúðarøki við t.d. felags parkeringsøki og hentleikum annars, umframt at til ber at sundurbýta íbúðirnar í eigaraíbúðir. Mett verður, at tað á matr. nr. 1435b í so fall kunnu byggjast uml. 20 bústaðir, ístaðin fyri 5-7 bústaðir.

Umsøkjari hevur sent tekning av, hvussu økið kann verða skipað, sí skjal *STØÐUMYND 200 – Layout1.* Um økið verður lagt sum øki til A4 íbúðarbygging, er ikki neyðugt at gera serstaka byggisamtykt, ið skipar økið neyvari, men verður málið avgreitt sum eitt byggimál. Hetta merkir, at umsøkjari í umsókn um broyting av byggisamtykt ikki nýtist at koma við neyvum tekningum av ætlanini, men bert lýsa ætlaninar yvirskipað. Hetta merkir somuleiðis, at hóast tekningar eru latnar inn í sambandi við umsókn um broyting av almennu byggisamtyktini, og hendan verður broytt, so er endaligt loyvi ikki givið til verkætlan sambært tekningunum, ið eru latnar inn.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- *Nýggjur umráðispartur í almennu byggisamtyktini. A4 – opin og lág bústaðarbygging,* journal nr. 25/10630.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Viðmerkingar frá Teknisku deild:
Atkoma til økið frá Varðagøtu norðanfyri stykkið kann gerast ein avbjóðing, av tí at vegurin er smalur og eingin gongubreyt er.

Atkoman frá Varðagøtu sunnanfyri stykkið kann somuleiðis vera avbjóðandi, av tí at tað í hesum økinum er stórur hæddarmunur.

Loysn má finnast á hesum tá verkætlanin er komin longri.

Viðmerkingar frá Byggimálsdeildini:
Ongar viðmerkingar vóru frá Byggimálsdeildini.

Umsøkjari hevur gjørt keypsavtalu við eigaran. Keypsavtalan er m.a. treytað av, at Tórshavnar kommuna gevur prinsipielt byggiloyvi til stykkið.

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**

- *Almenna byggisamtyktin – áðrenn broyting,* journal nr. 26/00958-5.
- *Almenna byggisamtyktin – eftir broyting,* journal nr. 26/00958-5.
- *STØÐUMYND 200 – Layout1,* journal nr. 26/00958-1.
- *SKURÐUR – Layout1,* journal nr. 26/00958-1.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta almennu byggisamtyktina fyri matr. nr. 1435b við Varðagøtu frá A1 øki til A4 øki smb. kortskjalinum *Almenna byggisamtyktin – eftir broyting*, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. apríl 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 30. apríl 2026:** Útsett.

# 126/26 Nýggj serstøk byggisamtykt fyri Rabarbukvarterið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 31.03.2025 | 58/25 | 25/00954-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 09.04.2025 | 71/25 | 25/00954-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 14.05.2025 | 93/25 | 25/00954-1 |
| 4 Býráðsfundur | 22.05.2025 | 131/25 | 25/00954-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.04.2026 | 89/26 | 25/00954-1 |
| 6 Býráðsfundur | 30.04.2026 | 126/26 | 25/00954-1 |

**Samanumtøka av málinum**
Hetta málið er eitt framhald av mál nr 24/03527.
Í 2006 varð skráseting gjørd av bygningum, sum eru bygdir áðrenn 1958. Bygningarnir fingu ásett varðveitingarvirði, og arbeiðið er skjalfest í Tórshavnar Býaratlassi. Býaratlassið verður brúkt sum eitt vegleiðandi býarskipanarligt amboð, men virkar ikki sum ítøkilig heimild í viðgerðini av t.d. byggimálum, har ætlanin er at broyta bygningar móti tilmælunum í Býaratlassinum. Til tess at varðveita býarumhvørvið tørvar Tórshavnar kommunu amboð, ið kunnu nýtast til at verja serstøku byggilistina, býarskipanina og mentunarsøguligu virðini í kommununi, áðrenn ov seint er.

12. desembur 2022 samtykti byggi- og býarskipanarnevndin, at umsitingin arbeiðir við at skráseta og raðfesta varðveitingarverd øki við at gera serstakar byggisamtyktir fyri hesi (sí mál nr. 22/06945). Í sama máli nevnir umsitingin fleiri økir í býnum, har varðveitandi byggisamtykt eigur at verða gjørd, av tí at hesi økini hava serstakt byggilistarligt, býarskipanarligt og søguligt virði. Ovarlaga á listanum er Rabarbukvarterið.

Tá ið matr.nr 828 varð keyptur í 2023, og nýggi eigarin hevði ynski um at sundurmatrikulera, soleiðis at umleið 315 $m^2$ stóri matrikulin á Tvørgøtu í framtíðini kundi rúma tveimum ognum, lat hetta seg ikki gera, tí galdandi byggisamtykt fyri økið, krevur grundstykkjavídd á minst 500 $m^2$ fyri stakhús (sí mál nr. 23/04734). Í býlinginum, sum upprunaliga varð útstykkjaður í 1920'unum, eru stórt sæð allar grundstykkjavíddirnar undir 500 $m^2$. Umsitingin metir, at galdandi ásetingar eru óhóskandi, og at varðveitandi byggisamtykt eigur at verða gjørd fyri Rabarbukvarterið. Í hesum sambandi bjóðaði eigarin av matr.nr 828 sær til at gera uppskot um eina varðveitandi serstaka byggisamtykt.

**Lýsing av málinum**
26. juni 2024 móttók umsitingin uppskotið til varðveitandi byggisamtykt, og hevur eftirfylgjandi tillagað tilfarið, við íblástri frá bæði útlendskum byggisamtyktum, serstøku byggisamtyktini fyri Tinganes og Reyn, og í góðum og tøttum samstarvi við Tjóðsavnið. Uppskotið, skjal *Serstøk byggisamtykt fyri Rabarbukvarterið 21.03.25,* hevur hesar týðandi broytingar við sær:

- Heimild verður fyri lutfalsliga smáum grundstykkjavíddum, og hóskandi ásetingar verða nágreinaðar fyri mest loyvdu hædd og byggi- og nýtslustig, við støði í siðbundnu húsunum í økinum.
- Krav verður um at varðveita garðar og byggilinjur, til tess at varðveita eyðkenda býarprofilin.
- Krøv verða sett til tilfarsnýtslu, snið og litir, sum samstundis tryggja, at húsaeigarar kunnu seta neyðugt viðlíkahald í verk og tillaga ognir til broyttar tørvir.
- Umsitingin mælir til stuðulsskipan, sum vit kenna frá Tinganesi og Reyni, har kommunan letur stuðul á 35% av upphæddini fyri siðbundið tilfar, sum serstaka byggisamtyktin krevur.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í A1 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sum er ætlað Bústaðarbygging, har ásetingarnar eru:

**§ 5. Ásetingar fyri umráðispart A1 í 3. grundumráði**

1) Umráðisparturin verður lagdur til stakhús. Eftir serloyvi frá byggivaldinum kunnu eisini byggjast tvíhús, raðhús og tílíkir bústaðir fyri eitt húski. Stakhús og tvíhús kunnu eisini hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð.

Í sambandi við bústaðarøki kann byggivaldið geva serloyvi til annað virksemi sum handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til, treytað av, at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum sethúsabýlingur, og sum lúka treytirnar í flokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu.

2) Virkini skulu kunna flokkast í umhvørvisflokki 1-2 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

3) Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 500 $m^2$ fyri stakhús og 300 $m^2$ fyri hvønn partin av tvíhúsum ella raðhúsum. Fyri raðhús kann ein partur av minstuvíddini verða lagdur sum felagslendi, tó í mesta lagi 100 $m^2$ fyri hvørt grundstykki.

4) Útstykking verður einans loyvd sambært útstykkingarætlan fyri eitt natúrliga avmarkað øki.

5) Byggistigið skal ikki fara upp um 0,3.

6) Nýtslustigið skal ikki fara upp um 0,6 fyri stakhús og 0,7 fyri tvíhús, raðhús og íbúðir. Tó kann tað fyri grundstykkir til stakhús, sum eru 200 $m^2$ ella minni, fara upp til helvtina hægri, og fyri stykkir millum 200 $m^2$ og 500 $m^2$ verða sett javnt minkandi, soleiðis sum mynd 3 vísir.

7) Hús skulu ikki verða bygd við meira enn tveimum hæddum umframt nýttum lofti. Kjallari verður roknaður sum húsahædd.

8) Hús við vanligari mønureising skulu ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg og 9 m til mønuna.

9) Verða hús bygd við einvegis takhalli ella sløttum taki, skal tann lægra síðan ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg og tann hægra síðan ikki vera hægri enn 7,5 til hægsta punkt við útvegg.

10) Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrliga avmarkað øki, verða loyvt at byggja íbúðir.

11) Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrliga avmarkað øki, verða loyvt, at grundstykkini til stakhús eru minni enn 500 $m^2$, tó í minsta lagi 400 $m^2$.

12) Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrliga avmarkað øki, verða loyvt at víkja frá ásetingunum í stk. 8 og 9.

Samsvar er ikki millum § 5, stk. 11 í galdandi almennu byggisamtyktini, ið ásetir at grundstykki ikki kunnu vera minni enn 400 $m^2$, og § 4, stk. 2 í uppskotinum til nýggja serstaka byggisamtykt fyri Rabarbukvarterið, ið sigur, at grundstykki í økinum skulu vera millum 150 og 250 $m^2$ til víddar. Fyri at fremja rætta dámin í hesum, og í líknandi økjum, er tískil neyðugt at broyta § 5, stk. 11 í almennu byggisamtyktini, soleiðis at tað gerst gjørligt, at hava grundstykkir, ið eru minni 400 $m^2$. Tað hevur tó týdning at tryggja, at henda ásetingin einans kann nýtast í verandi økjum, har tað er neyðugt fyri at tryggja dámin í økinum.

Tískil verður mælt til, at nýtt stk. 12 verður sett inn í § 5 í almennu byggisamtyktina, ið er soljóðandi:

“Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrliga avmarkað býarumhvørvi, verða loyvt at grundstykkini til stakhús eru minni enn 500 $m^2$, hetta fyri at varðveita dámin í økinum.”

**Upplýsingar frá umsitingini**

Umsitingin hevur afturvendandi mál, sum snúgva seg um, hvussu ávís økir í kommununi kunnu mennast uttan at missa søgulig og byggilistarlig virðir. Ætlanin við hesi byggisamtyktini er, at hon kann virka sum ein fyrimynd, tá líknandi byggisamtyktir skulu orðast aðrastaðni í býnum.

Av øðrum býarpørtum, har varðveitandi byggisamtykt kann verða gjørd, eru til dømis Jóannesar Paturssonargøta, Tinghúsvegurin, Tórsbyrgi, Tróndargøta/Bøgøta, Kilarakanalin, søguligir býlingar í bygdunum osfr.

Eitt annað skjal, ið er gjørt í sambandi við ynskið um at varðveita ávís býarøki í kommununi, er vegleiðingin “Heimbýlið títt”, sí skjal *Heimbýlið títt*. Hetta er ein vegleiðing til, hvussu farast skal fram, tá støða skal takast til umvælingar, umbyggingar og/ella nýbyggingar í økjum, ið eru varðveitingarverd. Í vegleiðingini er ein yvirskipað lýsing og frágreiðing um, hví vit varðveita, hvat vit skulu leggja til merkis, tá vit umvæla ella umbyggja og tílíkt. Harumframt verður komið nærri inn á ymisku húsasniðini í teimum ymisku varðveitingarverdu økjunum, og frágreiðing er um, hvat er serstakt við ymisku húsasniðunum. Í fyrsta umfari eru tey trý húsasniðini, sum í størstan mun myndað økið í Rabarbukvarterinum, traðarmannahús, skiparahús og stoypt hús, lýst, men ætlanin er, at vegleiðingin verður víðkað og húsasnið verða løgd afturat, so hvørt sum varðveitandi byggisamtyktir verða gjørdar fyri onnur varðveitingarverd øki í kommununi. Ynskið er, at vegleiðingin við tíðini fer at hava frágreiðing um øll tey ymisku húsasniðini, sum eru í kommununi.

Í serstøku byggisamtyktini fyri Rabarbukvarterið verður víst til vegleiðingina “Heimbýlið títt” og lýsingin av teimum viðkomandi húsasniðunum verður lagt sum fylgiskjal til serstøku byggisamtyktina. Vegleiðingin og lýsingin av teimum trimum húsasniðunum “traðarmannahús”, “skiparahús” og “stoypt hús” er ikki endaliga liðug, men verður klár áðrenn býráðsfundin 24. apríl 2025 og áðrenn uppskotið til serstaka byggisamtykt verður lagt til almenna og grannahoyring.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- *Varðveitingarverd øki og bygningar í kommununi,* journal nr. 22/06945.
- *Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 929. Tvørgøta 4. Tórshavntil ummælis,* Journal nr. 23/04734.
- *Nýggj serstøk byggisamtykt fyri Rabarbukvaterið,* journal nr. 24/03527

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Uppskotið til serstaka byggisamtykt verður sent eigarum av ognunum í økinum til hoyringar.

Vegleiðingin “Heimbýlið títt” er gjørd í samstarvi við Tjóðsavnið.

**Skjøl**

- *Kap. II, § 5 í almennu byggisamtyktini,* journal nr. 25/00954-2.
- *Serstøk byggisamtykt fyri Rabarbukvarterið 21.03.25,* journal nr. 25/00954-4.
- *Heimbýlið títt,* journal nr. 25/00954-3.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | **X** | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

Mælt verður til at stuðulsskipan, sum vit kenna frá Tinganesi og Reyni, har kommunan letur stuðul á 35% av upphæddini fyri siðbundið tilfar, sum serstaka byggisamtyktin krevur, somuleiðis verður gjørd fyri økið, sum serstaka byggisamtyktin fyri Rabarbukvarterið er galdandi fyri.

Ilt er at meta um, júst hvussu stórar fíggjarligar avleiðingar ein tílík skipan fer at hava, av tí at hetta velst um, nær – og hvussu stórar umvælingar eigarar av ognunum fara undir í framtíðini.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:

- at samtykkja uppskotið til serstaka byggisamtykt fyri Rabarbukvarterið sambært skjalinum "*Serstøk byggisamtykt fyri Rabarbukvarterið 21.03.25*." Fylgiskjølini "Traðarmannahús", "Skiparahús" og "Stoypt hús" verða endaliga liðug áðrenn býráðsfundin.
- at samtykkja uppskotið til nýggja áseting í almennu byggisamtyktini, ið við serstakari byggisamtykt loyvir, at grundstykki kunnu vera minni enn 500 m$^2$, hetta fyri at varðveita ein ávísan dám, sí skjal *Kap. II, § 5 í almennu byggisamtyktini*.
- at líknandi stuðulsskipan, sum er galdandi fyri Tinganes og Reyn, eisini verður galdandi fyri økið, sum varðveitandi byggisamtyktin fyri Rabarbukvarterið fevnir um, soleiðis at kommunan fær heimild at lata eigarum stuðul, svarandi til 35 % av upphæddini fyri tilfarskostnað, ið lýkur treytir fyri nýggj krøv um siðbundið tilfar, og at *konta 6211 Aðrar útreiðslur*, í hesum sambandi verður tillagað, til at eisini at umfata Rabarbukvarterið umframt Tinganes og Reyn.
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 31. mars 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 09. apríl 2025:** Málið útsett.

**Fíggjarnevndin 14. mai 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála, tekur undir við tilmælinum frá byggi- og býarskipanarnevndini við tí nágreining, at stuðul á 35% verður veittur fyri kostnaðarmunin ímillum siðbundið tilfar og tilfar, sum verður ynskt nýtt í Rabarbukvarterinum. Málið verður beint í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Høgni Vilhelmsen, tekur undir við at beina málið til hoyringar, men tekur ikki undir við at seta stuðulsskipanina í verk.

**Býráðsfundur 22. mai 2025:** Atkvøtt varð um tilmælið frá byggi- og býarskipanarnevndini við hesi broyting viðvíkjani stuðulsskipanini:

*Stuðul á 35% verður veittur til kostnaðarmunin ímillum vanligt tilfar og tilfar, sum verður ynskt nýtt í Rabarbukvarterinum.*
*Stuðulin verður avtikin stigvíst yvir 15 ár soleiðis:*
*- 5 ár eftir at byggisamtyktin er komin í gildi, verður stuðulin 25%.*
*- 10 ár eftir at byggisamtyktin er komin í gildi, verður stuðulin 15%.*
*- 15 ár eftir at byggisamtyktin er komin í gildi, verður stuðulin avtikin.*

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen, Annfinn Brekkstein, Kári Johansen og Tróndur Sigurðsson

Ongin atkvøða var blonk.

Uppskotið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri, 5 atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

**Ískoyti**

Í sambandi við almennu hoyringina av serstøku byggisamtyktini fyri Rabarbukvarterið, sum var 1. oktober til 12. november, komu fimm viðmerkingar – allar frá íbúgvum í økinum, sí skjøl *Viðmerking – Anfinn Frederiksen, Viðmerking – Hannes Gislason, Viðmerking – Kristjan Eiriksson, Viðmerking – Sigurd Christiansen* og *Viðmerking - Spf Petri*. Fleiri av viðmerkingunum snúgva seg um somu viðurskifti, og tískil eru viðmerkingarnar niðanfyri bólkaðar eftir evni, og eru viðmerkingarnar hesar:

1. Varðveita økið

- Taka yvirskipað undir við, at mest møguligt verður gjørt fyri at varðveita hetta serliga økið.
- Orsøkin til hesa byggisamtyktina er, at eigarin av matr. nr. 828 ynskir at sundurmatrikulera ogn sína, soleiðis at byggjast kunnu tvey smærri hús, heldur enn tað frammanundan størra húsið, ið frammanundan stendur á ognini. Hetta er ikki í samsvari við § 1, stk. 2a um at varðveita søguliga umhvørvið. Hetta er ei heldur í samsvari við § 7, stk. 6 um at endurbyggjast skal og byggjast skal við somu umvídd sum niðurtikin hús. Verandi hús standa við skjøldri javnfjart markalinju, og væl møguligt er at byggja við somu umvídd og á sama stað, sum tey niðurtiknu húsini.

Viðmerkingar frá umsitingini

- Tað er eitt politiskt ynski at varðveita nøkur av eldru grannaløgunum í býnum, og varð tað samtykt í byggi- og býarskipanarnevndini 12. desember 2022, at umsitining skuldi skráseta og raðfesta varðveitngarverd øki í býnum fyri at gera serstakar byggisamtyktir fyri hesi, sí mál *22/06945, Varðveitngarverd øki og bygningar í kommununi*. Serstaka byggisamtyktin fyri Rabarbukvarterið er tann fyrsta í røðini.
- Serstaka byggisamtyktin viðger ikki ítøkilig byggimál, men skapar karmarnar fyri tað, ið mett verður hóskar seg til økið – t.d. grundstykki, ið eru millum 150 og 250 $m^2$ til víddar og um ummatrikuleringar skulu/kunnu gerast, skal tað verða í samsvari við fylgiskjal 2 í serstøku byggisamtyktini. Ummatrikuleringar kunnu einans gerast, um byggingin eftir ummatrikulering rúmast á ognini, tað merkir t.d., at byggistig og nýtslustig framvegis er undir tí, ið loyvt er.

2. Ferðsla og parkering:

- Ringt at finna parkeringspláss.
- Mælir til at steingja Sjúrðargøtu uppi við Heygsbreyt, so eingin gjøgnumkoring verður, og hava innkoyring til Heygsbreyt frá Dalavegnum, og innkoyring til Brekkugøtu og Tvørgøtu verður frá Tróndargøtu inn í Sjúrðargøtu, sum tað er í dag. So kunnu íbúgvar parkera í gøtunum og gøturnar kunnu pyntast við blomsturkassum og spæliplássum v.m.
- Eigur at verða møguligt hjá fólki at fáa sær bilpláss á stykkinum.
- Parkeringsviðurskiftini eru ótíðarhóskandi og ótrygg. Parkeraðir bilar fram við gonguteigunum gera økið ótrygt. Tí er avgerandi, at byggisamtyktin framvegis loyvir einum parkeringsplássi á grundstykkjum, har tað er møguligt, at grundstykki ikki missa byggirætt grundað á hetta, og at kommunan skipar smærri felags parkeringsøki, t.d. við gomlu brandstøðina.
- Fer at vera munur á byggirætti og møguleikum hjá íbúgvum innan fyri sama kvarter. Øll skulu hava somu møguleikar til smærri útbygging og parkeringsloysnir. Nú verður tað tey, ið bygdu út áðrenn og eftir serstøku byggisamtyktina.

Viðmerkingar frá umsitingini

- Ásetingin um, at parkeringspláss ikki skulu vera inni á ognunum, er gjørd grundað á ynskið um at varðveita grøna dámin í økinum. Tá grundstykkini eru so lítil, og parkeringspláss skulu gerast, er ikki nógv rúm fyri vøkstri. Umsitingin metir tó, at loyvi kann gevast til 1 parkeringsplássi inni á ognini, um so er at tey kunnu vísa, at § 6, stk. 1 um, at í minsta lagi 50% av óbygda økinum á ognini ikki er álagt hátún, verður hildið.
- Ongar ætlanir eru um at broyta ferðslumynstrið í Rabarbukvarterinum. Um Sjúðrargøta uppi við Heygsvegin verður stongd, broytir tað munandi um ferðslumynstrið, og mugu neyðugar kanningar gerast, áðrenn ein tílík avgerð kann takast.

3. Vinnuligt virksemi í økinum:

- Rabarbukvarterið var eitt arbeiðarakvarter – ikki eitt urtagarðskvarter. Hetta eigur at verða varðveitt í byggisamtyktini.
- Spurnartekin verður sett til, um endamálið at varðveita siðsøguligu virðini í økinum verður rokkið, tá forboð verður sett fyri virksemi, sum hevur verið partur av økinum í eina góða øld – helst líka frá byrjan.
- § 3 og § 5 eiga at verða broyttar, soleiðis at parkeringsøki á privatum matrikli og virkir í umhvørvisflokki 1 og 2 framhaldandi verða loyvd í økinum, í samsvari við ásetingarnar í Almennu byggisamtyktini. Hetta tryggjar, at gjørdar íløgur í verandi vinnubygningar og parkeringsøki ikki missa virði, og at økið heldur fram at vera virkið og livandi.
- Verandi uppskot setur forboð fyri næstan øllum vinnuvirksemi og privatari parkering í økinum.
- Verandi uppskot fer at taka burtur møguleikan at nýta verandi vinnubygningar, um fyritøkan flytur ella eigarin broytist. Óvissa verður fyri framtíðar íløgur og avmarkar vilja at betra um atkomu, t.d. hjá fólki við skerdum førleikum.

Viðmerkingar frá umsitingini

- Tikið verður undir við at broyta ásetingarnar fyri vinnuligt virksemi í økinum, soleiðis at tær verða tær somu sum tær vóru áðrenn, og í vanligum sethúsaøkjum, A1 økjum, annars.
  "Í sambandi við bústaðarøki kann byggivaldið geva serloyvi til annað virksemi sum handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til, treytað av at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum sethúsabýlingur og sum lúka treytirnar í flokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu.
  Virkini skulu kunna flokkast í umhvørvisflokki 1-2 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu."
- Viðvíkjandi viðmerking um parkering verður mælt til, at hildið verður fast í, at einans 1 parkeringspláss kann skipast á hvørjari ogn sambært nýggja uppskotinum til § 6, stk. 2, hetta fyri at tryggja grøna dámin í økinum.

4. Reinhaldið

- Skapa ójavnvág, tí kommunan sjálv rekur vinnu á matr. nr. 808d (gamla brandstøðin), ið er tikið burtur úr samtyktini, hóast virksemið har hevur hægri umhvørvisávirkan (flokkur 3-5).
- Gamla Brandstøðin og økið hjá Reinhaldinum eiga at verða fevnd av byggisamtyktini. Virksemið virkar sera illa saman við gamla býliginum við illa ljóðisoleraðum húsum. Fyrr lógu bústaðir út til vegin.
- Virksemið hjá Reinhaldinum elvir til stóran larm, støv, sápulukt og óreinleika. Kundið verið flutt t.d. til Vestaru bryggju, og harvið betrað munandi um fagurfrøðiligu heildarmyndina av Rabarbukvarterinum.
- Gamla brandstøðin eigur at verða umvæld til bústaðarendamál, ella møguliga parkeringsøki, um ætlanin er at avmarka tann møguleikan hjá íbúgvunum í økinum.

Viðmerkingar frá umsitingini

- Henda serstaka byggisamtyktin snýr seg fyrst og fremst um at skipa sethúsabyggingina í Rabarbukvarterinum við traðarmannahúsunum, fiskimannahúsunum og stoyptu húsunum. Mett verður ikki, at gamla brandstøðin er partur av tí økinum.
- Býarskipanarliga metir man, at virksemið hjá Reinhaldinum í gomlu brandstøðini er óheppið staðsett, eisini í mun til ynskta dámin í økinum sum heild. Flyting av verandi virksemi í Brandstøðini hevur fleiri

ferðir verið viðgjørt, tó uttan at ein haldgóð loysn er funnin. Nærleikin til innara part av býnum hevur avgerandi týdning fyri virksemið hjá Reinhaldinum, og tað er ikki eydnast at finna aðra staðseting til hetta virskemið. Bygningsdeildin hevur í 2025 latið gjørt uppskot um høvuðsumvæling og betran av umstøðunum í Brandstøðini, við m.a. innandura vaskiplássi. Um uppskotið verður framt í verki, hevði tað hjálpt munandi um árinini av virkseminum.

5. Matriklar, byggi- og nýtslustig

- Tað, at tað ber til at deila summi grundstykki í tvey (fylgiskjal 2) ger, at byggistig fyri verandi hús á hesum grundøkjum verður hækkað munandi.
- Ætlanin leggur upp til sersømdir ella undantaksloyvir fyri sera fáar eigarar í Rabarbukvarterinum, fyri at kunna gjøgnumføra lýstu ætlanina um sundurbýting av grundøkjum smb. § 4, stk. 3 og fylgiskjali 2.
- Broytingar eiga at vera gjørdar í mest loyvda byggistigi, sum gagna øllum í Rabarbukvarterinum, eisini teimum við smáum grundstykkjum. At loyva teimum lítlu húsunum at byggja hús síni eitt sindur størri, fer ikki at broyta dámin á økinum munandi.
- Ynskja byggistig á 0,4.
- Byggisamtyktin nevnir grundstykkjavíddir á 158 m$^2$ við húsum, ið hava grundvíddir á 60 m$^2$. Hetta gevur byggistig á 0,38. Fleiri hava eisini munandi hægri byggistig enn 0,4.
- Mett verður ikki, at byggisamtyktin gevur eigarum við smærri húsum á smáum grundøkjum nóg góðar møguleikar at innrætta rímiligar bústaðir.

Viðmerkingar frá umsitingini

- Tað fer einans at bera til at býta sundur grundstykki, um so er, at byggistigið á teimum sundurbýttu grundstykkjunum somuleiðis verður yvirhildið, eftir at sundurbýtið er farið fram. Hetta verður viðgjørt í teimum ítøkiligu málunum.
- Skráseting av bygdum fermetrum í økinum vísir, at flestu ognirnar eru við hægri byggistigi enn 0,3 – av 68 ognum. Um byggistigið verður hækkað til t.d. 0,4, kunnu 42 av ognunum gera tilbyggingar, og verður mett, at hetta fer at broyta dámin á økinum munandi. Endamálið við serstøku byggisamtyktini er at varðveita dámin á økinum, og er broyting av byggistiginum so statt ikki í samsvari við endamálið.
- Nevnast kann, at á ognum, sum eru 158 m$^2$ ber, við einum byggistigi á 0,3, til at byggja 47,4 m$^2$ í grundvídd. Nýtslustigið á ognum, sum eru 158 m$^2$ er 0,9, og er tí møguligt at byggja 142,2 m$^2$ í alt. Hendan støddin verður mett, sum ein rímiligur bústaður til eina vanliga familjustødd.

6. Fíggjarligur stuðul

- Fíggjarligi stuðulin átti ikki at verið avtikin eftir 15 ár, men verið óavmarkaður, eins og úti á Reyni. Annars verður mismunur.

Viðmerkingar frá umsitingini

- At avtaka fíggjarliga stuðulin yvir ár er ein politisk avgerð, og hevur býráðið samtykt, at fíggjarligi stuðulin verður avtikin stigvíst yvir 15 ár soleiðis:
  *- 5 ár eftir at byggisamtyktin er komin í gildi, verður stuðulin 25%.*
  *- 10 ár eftir at byggisamtyktin er komin í gildi, verður stuðulin 15%.*
  *- 15 ár eftir at byggisamtyktin er komin í gildi, verður stuðulin avtikin.*

7. Ymiskt

- Manglar áseting um mest loyvdu hædd á trøum. Hetta í mun til trygd og sólargang. Ynskja greiðar ásetingar um viðlíkhald av urtagørðum, so trø ikki kunnu vaksa óavmarkað stór.
- Marghháttligt, at banna sólpanelum á húsatekjum, sum eru ein skjótt vaksandi partur av grøna orkuskiftinum.

Viðmerkingar frá umsitingini

- Býarksipan og byggisamtyktir eru fevndar av býarskipanarlógini, og í hesari er ikki heimild at áseta mest loyvdu hædd á trøum í byggisamtyktum. Kommunan hevur gjørt vegleiðingina "Plantið eitt træ

í góðum grannalag", sum lýsir, hvussu trø og runnar mest skynsamt verða plantað og hildin í grannaløgum.

- Sólpanel verða loyvd á úthúsum, skúrum og líknandi. Mett verður, at um sólpanel verða løgd á tekjur á meginhúsum, fer hetta at gera seg ov nógv inn á søguliga sniðið, sum serstaka byggisamtyktin roynir at varðveita.

Umframt almennu viðmerkingarnar, hevur umsitingin hesar innanhýsis viðmerkingar.

Stórigarður
Stórigarður gongur fram við norðara marki av byggisamtyktarøkinum og lutvíst vestara marki. Stórigarður er ikki friðaður við lóg, men Tórshavnar kommuna lat í 2018/2019 gera eina støðulýsing og heildarætlan fyri garðin, við tí fyri eyga at varðveita hann, sí mál *18/01974, Stórigarður* . Stórigarður verður ikki umrøddur í áður framlagda uppskotið, og mett verður, at áseting, ið varðveitir Stóragarð, eigur at verða í nýggja uppskotinum, sí § 6, stk. 6 í skjalinum *Serstøk byggisamtykt fyri Rabarbukvarterið 21.01.26*.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- *22/06945, Varðveitngarverd øki og bygningar í kommununi*
- *18/01974, Stórigarður*

**Skjøl**

- *Viðmerking – Anfinn Frederiksen,* journal nr. 25/00954-30
- *Viðmerking – Hannes Gislason,* journal nr. 25/00954-30
- *Viðmerking – Kristjan Eirksson,* journal nr. 25/00954-30
- *Viðmerking – Sigurd Christiansen,* journal nr. 25/00954-30
- *Viðmerking – Spf Petri, journal nr. 25/00954-30*
- *Serstøk byggisamtykt fyri Rabarbukvarterið 05.03.26,* journal nr. 25/00954-32

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja uppskotið til serstøku byggisamtyktina fyri Rabarbukvarterið 05.03.26, við m.a. hesum broytingum í mun til áður framlagda uppskot:

- Loyvi til 1 parkeringspláss inni á ognunum, um so er at § 6, stk. 1 verður hildið.
- Loyvi til vinnuligt virksemi í umhvørvisflokki 1-2.
- Áseting, ið verjir Stóragarð.
- Og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. apríl 2026:** Ein meiriluti, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Birgir Nielsen og Kári Johansen, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 30. apríl 2026:** Útsett.

# 127/26 Nýggj serstøk byggisamtykt fyri matr. nr 1458a, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 26.01.2026 | 28/26 | 25/01005-16 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.04.2026 | 113/26 | 25/01005-16 |
| 3 Býráðsfundur | 30.04.2026 | 127/26 | 25/01005-16 |

**Upprunin til málið**
Galdandi serstaka byggisamtyktin fyri 1458a (eitt øki ið er umleið 11.000 $m^2$ til støddar) kom í gildi í 2011. Byggisamtyktin lýsir eina ætlan við vegi og 18 grundøkjum til stakhús í einari hædd við felagsøki og felags parkeringsplássi *(sí Galdandi serstøk byggisamtykt fyri 1458a).* Sambært umsøkjara er upprunin til hesa ætlan, at byggifrøðiligir trupulleikar høvdu verið við størri íbúðarverkætlanum, eitt nú á Heimasta Horni, og tí var ætlanin og ynski tá at byggja sethús, sum eru smærri og lægri eindir. Støðan er nú ein onnur, og ynskir eigarin at gagnnýta bygdu fermetrarnar til fulnar.

7. mars 2024 móttók kommunan umsókn vegna eigara av trøðni á matr.nr. 1458a við ynski um at broyta galdandi byggisamtykt, A3-øki við serstakari byggisamtykt, til C3, ætlað miðstaðarbygging og íbúðir. Umsitingin mælti frá at broyta matr. nr. 1458a til C3, grundað á at C3 øki í almennu byggisamtyktini eru ætlað miðstaðarbygging, sum savnar íbúðar- og handilsvirksemi fyri bústaðardeplarnar, og at Sortudíki ikki telist millum bústaðardeplarnar, sambært Kommunuætlanini (sí mál *24/01497- Umsókn um broyting av byggisamtykt fyri matr. nr. 1458a - frá A3-øki til C3-øki*).

Eftir hesa niðurstøðuna søkti umsøkjari um at broyta serstøku byggisamtyktina fyri ognina, soleiðis at eigari kann byggja annað enn sethús. Hetta málið snýr seg tískil um uppskot um nýggja serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 1458a, Tórshavn.

**Lýsing av málinum**
Umsitingin hevur síðani august 2024 havt leypandi fundir við umsøkjara, umframt at arbeitt hevur verið við eini dagførdari býarskipan fyri kommununa, sum tekur atlit til bygging av fleiri bústøðum, samstundis sum fyrilit verður tikið fyri náttúru, lívmargfeldi og trivnaði. (sí mál *Býarskipan 2025*).

Í samskiftinum við umsøkjara hevur umsitingin lagt dent á, at ein størri íbúðarverkætlan í økinum skal tryggja, at atlit verður tikið til:

- Nøktandi fríøki millum bygningarnar
- Løkurin skal í størsta mun varðveitast, og bygging skal taka atlit til skógfriðaða økið á grannaognini (matr. nr. 1452c)
- Ein møgulig gøtuskipan skal á ómakaleysan hátt knýta bústaðirnar við hentleikarnar kring økið.
- Íbúðir skulu byggjast í sundurskiltum eindum og við virðiligum støddarlutfalli, soleiðis at bygging ikki kemur at standa í ov stórari andsøgn til býlingarnar í nærumhvørvinum.

Seinasta uppskotið frá ráðgevum lýsir íbúðarverkætlan við 96 íbúðum í 8 bygningum í tveimum og trimum hæddum, harumframt einum felagshúsi. Umsøkjari kallar uppskotið um nýggja býlingin fyri Ternutún (sí skjal *25/01005-23 - 20251215 Ternutún)*. Uppskotið lýsir ein býlingsveg við tveimum smáum svingum, og kring íbúðarbygningar er avlagt umleið 3000 $m^2$ til grønt fríøki, sum liggur upp at skógfriðaða økinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri umráðispart A3 í 3. grundumráði eru m.a.:

- Umráðisparturin verður lagdur til blandaða bústaðar- og miðstaðarbygging.
- Stakhús og tvíhús kunnu eisini hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð.

- Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 400 $m^2$ fyri stakhús, 300 $m^2$ fyri tvíhús og 250 $m^2$ fyri raðhús. Ein partur av teirra minstuvídd kann verða lagdur sum fríøki, tó í mesta lagi 100 $m^2$ fyri hvørt grundstykki.
- Útstykking verður einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt fyri eitt natúrligt avmarkað øki.
- Byggistigið skal ikki fara upp um 0,3.
- Nýtslustigið skal ikki fara upp um 0,6 fyri stakhús og 0,7 fyri tvíhús, raðhús og íbúðir. Tó kann tað fyri grundstykkir, sum eru 200 $m^2$ , fara upp til helvtina hægri og fyri stykkir millum 200 $m^2$ og 500 $m^2$ verða sett javnt minkandi niður til vanliga ásetta minstuvídd.
- Hús skulu ikki verða bygd við meira enn tveimum hæddum umframt nýttum lofti. Kjallari verður roknaður sum húsahædd.
- Hús við vanligari mønureising skulu ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg og 9 m til mønuna.
- Verða hús bygd við einvegis takhalli ella sløttum taki, skal tann lægra síðan ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg og tann hægra síðan ikki vera hægri enn 7,5 m til hægsta punkt við útvegg.
- Í serstakari byggisamtykt kann nýtslustigið verða roknað út frá heildarbyggingini fyri eitt natúrligt avmarkað øki.
- Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at víkja frá ásetingunum í stk. 4, 6, 7, 8, 9 og 10, og fyriskipað, at
- húsini verða sett í veglinju ella byggilinju.

Serstaka byggisamtyktin "Serstøk byggisamtykt fyri matr. nr. 1458a við Sundsvegin, Tórshavn, staðfestir m.a.:
- Útstykkingin hevur 18 grundøki til stakhús, felagsøki og felags parkeringspláss
- Á útstykkingini er einans loyvi at byggja stakhús

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tørvur er á fleiri bústøðum í høvuðstaðnum, og tí er umráðandi, at verandi byggilendi verður gagnnýtt á mest skynsaman hátt.

Umsitingin metir, at tað er meira skynsamt at matr. nr. 1458a verður lagt av til íbúðarbygging heldur enn til 18 sethús, og hevur gjørt nýtt uppskot um serstaka byggisamtykt út frá tilfarinum frá ráðgevum. Í sambandi við at nýggj serstøk byggisamtykt verður gjørd fyri øki, er neyðugt at galdandi serstaka byggisamtykt verður avlýst.

At avlýsa eina byggisamtykt krevur somu tilgongd sum at gera eina byggisamtykt, og tískil skal hetta somuleiðis lýsast alment og sendast Umhvørvismálaráðnum til góðkenningar.

Til tess at verja upprunalendið er, umframt byggistig á 0,30, løgd áseting afturat, sum skal tryggja, at bygging hóskar til verandi jørðildi.

Fyri at tryggja at útsjónd í økinum, sum liggur upp at skógfriðaðum øki, og tætt við Norðurlandahúsið, verður í § 6 stk. 1. ásett, at øll bygging í økinum, sum byggisamtyktin fevnir um, skal gerast í samráð við byggimyndugleikan. Endamálið er at tryggja, at snið og framsíður hóska til kringumstøðurnar.

Í tilfarinum frá ráðgevum verður víst á góða busssambandið í økinum, og hentleikarnar í grannalagnum. Umsitingin metir, at hetta kann nýtast sum grundgeving fyri einum parkeringsnormi á 1 parkeringspláss per bústaðareind. Hetta er millum annað grundað á, at verkætlanin tryggjar nøktandi samband við lendisgøtuskipanina kring økið, umframt at økið er tætt við buss og aðrar gerandishentleikar.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- *24/01497- Umsókn um broyting av byggisamtykt fyri matr. nr. 1458a - frá A3-øki til C3-øki*
- *25/04377 - Býarskipan 2025*

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Málið er viðgjørt í samstarvi við Byggimálsdeildina, Teknisku deild og Umhvørvisdeildina.

Viðmerking frá Stjórnarskrivstovuni:
Kommunan hevur ein tinglýstan rætt at hava kloakkleiðingar í lendinum, vísandi til skeyti fyri 1458a, Tórshavn. Kloakkleiðingin kann tí ikki metast sum gestur í lendinum.

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**

- *25/01005-22 - Galdandi serstøk byggisamtykt fyri 1458a*
- *25/01005-17 - 20251215 Ternutún*
- *25/01005-18 - Uppskot um nýggja serstaka byggisamtykt, des 2025*

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at:
- góðkenna uppskotið um nýggja serstaka byggisamtykt fyri matr. nr 1458a, Tórshavn, sambært skjal nr. *25/01005-18, Uppskot um nýggja serstaka byggisamtykt, des 2025,*
- avlýsa galdandi serstøku byggisamtykt fyri matr. nr. 1458a
- og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. januar 2026:** Málið útsett, meðan tillagingar verða gjørdar.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur samskift við umsøkjara, forkvinnu í byggi- og býarskipanarnevndini, og borgastjóra til tess at tillagað uppskotið, so tað í størri mun samsvarar við politisku ynskini frá nevndini.
Nevndin ynskti at broyta uppskotið, soleiðis at byggingin í størri mun tekur atlit til lendið og kringliggjandi gøtuskipan, at parkeringin fyllir minni og at bygningarnar í útsjónd passa betri til serstaka økið.

29. mars móttók umsitingin dagført skitsuppskot (sí Ternutún) og hevur umsitingin tillaga byggisamtyktaruppskotið út frá hesum.

Uppskotið er broytt soleiðis at:
- íbúðatalið er lækkað úr 90 til 84
- bygningseindirnar eru fluttar, til fyrimun fyri útsýnis- og ljósviðurskiftir og soleiðis at atgongd til kringliggjandi øki gerst meira náttúrlig
- bygningar hava mønu

- parkeringin er í størri mun skipað millum eindirnar

Nýggja uppskotið (*Serstøk byggisamtykt fyri matr. nr. 1458a við Sundsvegin mars 2026)* er harvið ein roynd at bæði útnytta lendið til fleiri búeindir og samstundis verja og virða serstaka økið.

**Nýggj skjøl**
*25/01005-31 – Ternutún*
*25/01005-32, Serstøk byggisamtykt fyri matr. nr. 1458a við Sundsvegin mars 2026*

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at:

- góðkenna uppskotið um nýggja serstaka byggisamtykt fyri matr. nr 1458a, Tórshavn, sambært skjal nr. 25/01005-32, *Serstøk byggisamtykt fyri matr. nr. 1458a við Sundsvegin mars 2026,*
- avlýsa galdandi serstøku byggisamtykt fyri matr. nr. 1458a
- og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. apríl 2026:** Ein meiriluti, Anja Weyhe, Heidi Lava Elgeirsdóttir og Birgir Nielsen, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Bergur Robert Dam Jensen og Kári Johansen, tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðsfundur 30. apríl 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í byggi- og býarskipanar-nevndini, ið varð samtykt við tíggju atkvøðum fyri, tveimum atkvøðum ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Jón Kragesteen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen,

Blankt atkvøddu: Bergur Robert Dam Jensen

# 128/26 Broyting av serstøku byggisamtykt nr. 4 fyri Tinganes og gomlu Havnina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.06.2025 | 101/25 | 25/01086-2 |
| 2 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 160/25 | 25/01086-2 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.04.2026 | 93/26 | 25/01086-2 |
| 4 Býráðsfundur | 30.04.2026 | 128/26 | 25/01086-2 |

**Upprunin til málið**
Í 2017 móttók umsitingin umsøgn um byggiloyvi til hotellíbúðir Undir Bryggjubakka. Byggiloyvið varð útskrivað 7. juli 2021. Nærmastu grannarnir kærdu avgerðina, og 1. november 2022 fekk Tórshavnar kommuna skriv frá Føroya Kærustovni við avgerðini at ógilda byggiloyvið.

Skal byggingin lata seg gera við tí nýtslu, sum søkt er um, so er neyðugt at broyta serstøku byggisamtyktina.

**Lýsing av málinum**
Galdandi sertaka byggisamtykt er upprunaliga frá 1972 og hevur til endamáls at varðveita dámin, sum sermerkir Tinganes og gomlu Havnina, og at byggja og endurbyggja á ein hátt, sum ikki stríðir ímóti tí gamla.

Økið Undir Bryggjubakka (kallað D1 í sersøku byggisamtyktini), hevur síðani 1972 verið lýst sum byggilendið. Ætlaða byggifeltið til hotellíbúðirnar fer tó út um linjunar, soleiðis sum tær eru lýstar í fylgiskjali 4 (sí Fylgiskjal 4 - Galdandi). Byggiøkini eru upprunaliga tillagað táverandi sjólinju, men í dag er bryggjan útbygd og plássið er betur millum bygningar og bryggjukantin. í viðgerð av byggiloyvinum (sí mál 17/01760), metti byggimálsdeildin, at tað er natúrligt, at bygd verður út um byggiøki í mun til grannabygningarnar og verandi bryggju, og at byggingin fylgdi verandi bygging á staðnum.

Í mun til nýtstluna í økinum loyvir galdandi byggisamtykt, vinnulívsendamálum og ítøkiliga: skrivstovu-, umsitingar-, og handilsvirksemi, serliga tílíkum, ið hevur við havnina og fiskivinnu at gera (sí SB_Tórshavn_TinganesReyn_1972_4_2022 - Galdandi.pdf). Vinnuliga er tað serliga ferðavinnnan, ið er vaksin nógv síðani hesa áseting, og Tinganes og gamla Havnin teljast millum høvuðsferðmál í Føroyum. Umsitingin metir tað vera hóskandi at broyta ásetinginarnar fyri D eindirnar, soleiðis at hesar eisini loyva bústøðum, og at loyva gistingarhúsum í D1. Umsitingin metir, at hetta kann menna ein meira fjølbroyttan og livandi býarpart.

Málið snýr seg tí um at broyta omanfyri standandi lutir, soleiðis at ætlanir fyri hotellíbúðir undir bryggjubakka kunnu fremjast. Hetta krevur tekstligar broytingar í serstøku byggisamtyktini, sí broytingarnar við reyðum/grønum á síðu 3 í skjalinum *Eindirnar D - Við rættingum.* Hetta krevur eisini eina dagføring av fygliskjali 4 (sí *Fylgiskjal 4 - Dagført*).

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í 2. grundumráði í almennu byggisamtyktini og í eindini D1 í serstøku byggisamtykt nr. 4 fyri Tinganes og gomlu Havnina.

<u>Í almennu byggisamtyktini er ásett í kap. 4, § 3:</u>

*2. grundumráði verður alt, sum tað er, lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging. Miðstaðabyggingin má einans vera hús, sum heilt ella lutvís verða innrættað til handlar, smáhandverk, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.*

Í serstøku byggisamtyktini nr. 4 fyri Tinganes og gomlu Havnina er ásett fyri eindina D2:

2. gr. Nýtsla økisins, eindirnar D: Vinnulívsendamál:

a. Eindirnar D1 og D2 skulu við teimum undantøkum, ið niðanfyri eru nevnd, einans verða nýttar til vinnulívsendamál og byggingin skal vera kannað skrivstovu-, umsitingar-, og handilsvirksemi, serstakliga tílíkum, ið hevur við havnina og fiskivinnu at gera. Eisini kann býráðið loyva at byggingin verður nýtt til goymslur og pakkhús. Uttandura goymslur kunnu bert verða gjørdar við serloyvi frá býráðnum.
b. Í ovastu húsahædd er loyvt at innrætta íbúðir.
c. Á ognunum kann ikki verða framt nakað slag av virki, sum við roki, royki, deymi, gangi ella ristingum ella sum við útsjónd síni, ella á annan hátt eftir meting býráðsins kann vera teimum, sum uttanum búgva, til ampa.
d. Í D1 økinum skal niðasta hædd í bygninginum hava útvent virksemi, t.d. kafé, matstova, handil v.m.

5. gr. Stødd og staðseting húsanna o.a., Eindirnar D

a. Byggingin skal verða løgd í tey á fylgiskjalið IV strikumerktu byggiøkini og skulu bygningarnar innan byggiøkini verða samanbygdir. Byggiøkini skulu, er tað gjørligt, byggjast fult.
b. Í eindini D1 skal hæddin á bygninginum, roknað frá hægsta jørðildi móti vegnum a-b til yvirgrindina (har húsasíðan og tak koma saman, skjøldrar ikki íroknaðir) ikki vera minni enn 3 m og ikki meira enn 4 m.
c. Í eindini D2 skal hæddin á bygninginum, roknað frá bryggjuni til yvirgrindina ikki vera meira enn 9 m.
d. Í eindini D1 skulu yvirgrindir og mønur vera javnfjarar við vegin a-b. Í báðum endunum D skal reisingin vera millum 30° og 45° reyst. Loyvt er at seta kvistar um so er at teir samsvara við vegleiðandi skurðir, sum sýndir eru á fylgiskjalið IV.
e. Ikki er loyvt á ognunum at byggja bilskúrar, úthús og onnur tílík smáhús.
f. Leiðingaløg skulu sum meginregla verða løgd í samsvari við vegleiðandi skipanina, sum sýnd er á fylgiskjalið III, ið er til skjals hjá býarverkfrøðingarskrivstovuni.

6. gr. Útsjónd húsanna

a. ......Allar lýsingar, eisini í eindunum D skulu vera góðkendar av serstaka byggiráðnum.
e. Í eindunum D1 og D2 skulu til framsíður, skjøldrar og tekjur ikki nýtast litir og tilfar, ið eftir meting serstaka byggiráðsins kann lýta økið.

### Upplýsingar frá umsitingini

### Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið

- *Umsókn um byggiloyvi til bygning á matr. nr. 168a og 156, Tórshavn. undir Bryggjubakka og Rektaragøta journal nr. 17/01760*
- *Kæra um avgerð hjá hjá TK um givið byggiloyvi á matr. nr. 168a, Tórshavn (hotellíbúðir undir Bryggjubakka/Rektaragøta)* Journal nr. 21/04171

### Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)

### Skjøl

- *SB_Tórshavn_TinganesReyn_1972_4_2022 - Galdandi.pdf,* journal nr. 23/03101-5
- *SB_Tórshavn_TinganesReyn_1972_4_2022 – Rættað 28.02.2024,* journal nr. 23/03101-5
- *Eindirnar D - Við rættingum ,* journal nr. 23/03101-3
- *Fylgiskjal 4 - Galdandi,* journal nr. 23/03101-4
- *Fylgiskjal 4 - Dagført,* journal nr. 23/03101-6

### Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>30. april 2026 | Blað nr.: 473<br><br>Forkvinnunnar merki: |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:** Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta serstøku byggisamtykt nr. 5 sambært skjalinum *SB_Tórshavn_TinganesReyn_1972_4_2022 – Dagført 28.02.2024*, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. apríl 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 24. apríl 2024:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**

Broytingaruppskotið til serstøku byggisamtyktina lá til hoyringar í tíðarskeiðinum 3. mai 2024 til 14. juni 2024.

Tá ið hoyringsfreistin var farin, 14. juni, hevði kommunan móttikið trý hoyringsskriv. Tvey eru frá grannum búgvandi á Reyni, og eitt er frá Tjóðsavninum. Heilt yvirskipað verður mælt frá, at byggja á matr. nr. 168a og at ein meira ítøkilig heildarætlan við árinskanningum verður gjørd í samstarvi við grannar og serstaka byggiráðið.

Tey trý hoyringsskrivini mótmæla ítøkiliga hesum viðurskiftum:

1. <u>Partar eru ikki hoyrdir/tiknir við í viðgerina</u>

Ført verður fram, at tað vil ikki vera rætt at gera størri broytingar í serstøku byggisamtyktini, uttan at serstaka byggiráðið verður uppi í hesum arbeiðinum.
Somuleiðis verður víst á, at serstaka byggiráðið varð hoyrt í samband við byggimálið, og í 2017 høvdu tey hesar viðmerkingar til byggimálið:

- *Serstaka byggiráðið metir ikki at intentiónirnar í byggisamtyktini og tilhoyrandi fylgiskjølum verða fylgdar.*
- *Serstaka byggiráðið ynskir at ein árinskanning verður gjørd í mun til øki á Reyni og tey ið har búgva viðv. sólarljós/skugga, innilokan av bústaðarøkinum, økt ferðsla, larmur o.a.”*

Funnist verður at, at hesar viðmerkingarnar ikki eru tiknar við, í mun til uppskotið um broyting av serstøku byggisamtyktini.

2. <u>Hæddin á bygninginum er ov høg</u>

Hotellíbúðarbygningurin, sum broytingarnar í serstøku byggisamtyktini fyrihalda seg til, er ikki lýstur alment í hesum málinum. Á kunnandi fundum og eftir at hava umbiðið innlit, hava partar sæð fyriliggjandi tekningar. Hæddarásetingin er ógreið, men fer væl upp um lýsingina í Fylgiskjali IV, sambært mótmæli.

3. <u>Økt ferðsla</u>

Virksemið í nýggja bygninginum fer sannlíkt at økja um bilaferðsluna. Í hoyringskrivunum verður gjørt vart við, at hetta fer at hava neiliga ávirkan á íbúgvar. Rektaragøta verður mett ov smøl til inngongd til nýggja bygningin, og økta ferðslan fer at minka um ferðslutrygdina. Ynskið er tí um at fáa ferðsluviðurskifti greinaði nærri.

4. <u>Ynskja ikki gistingarhús</u>

Mótmælt verður eisini at broyta endamálið við D1 eindini, so tað í framtíðini eisini kann nýtast til hotellvirksemi. Sambært mótmælunum uppliva íbúgvar á Reyni og Tinganesi longu neiligt trýst av øktari ferðavinnu. Tá ið nýtslan framyvir fer at loyva gistingarhúsum, er vandi fyri, at virksemið í økinum verður einsháttað og einans nýtt til ferðavinnulig endamál.
Víst verður somuleiðis á, at verandi byggisamtykt ikki loyvir virki, sum við roki, royki, deymi, gangi ella ristingum....ella á annan hátt eftir meting býráðsins kann vera teimum, sum uttanum búgva, til ampa. Og ført verður fram, at hotelíbúðirnar fara at hava hesar neiligu ávirkanir á tey sum grannar.

5. Byggilinjan skal varðveitast

Mælt verður frá, at broyta byggilinjuna, tí henda er ein týðandi partur av skapinum á Tinganesi. Víst verður eisini á, at sambært upprunaligu byggisamtyktini var ætlanin ikki at D-økini skuldu vera fult útbygd, soleiðis sum ætlanin nú fyriliggur, har bygningurin er breiðari enn upprunaligu tekningarnar á fylgiskjalið IV vísa. Eisini verður viðmerkt at upprunaliga byggifeltið framvið bryggjubakka vísir trýggjar bygningsrondir, og somuleiðis trýggjar passagur millum Rektaragøtu og Bryggjubakka. Av tí at verandi bygging í økinum ikki hevur fylgt hesi ætlan fer talið av passagum at minka frá 3 til 1, og úrslitið at Reyn verður "sperra inni".

**Umsitingin hevur hesar viðmerkingar til hoyringsskrivini:**

Til nr 1: Partar eru ikki hoyrdir/tiknir við í viðgerina

Serstaka byggiráðið, sum er sett við umboði fyri Tórshavnar kommunu, Føroya Fornminnissavn/Føroya landsstýri og grannum í økinum, hevur til uppgávu at vegleiða býráðið, tá mál verða viðgjørd, ið koma inn undir fyriskipanir í serstøku byggisamtyktini.

Talan er sostatt um eitt ráð, sum verður hoyrt og skal vegleiða í samb. við byggimál.
Umsitingin hevur ikki mett, at serstaka byggiráðið eigur at verða hoyrt, tá serstaka byggisamtyktin verður broytt – ei heldur hevur hetta verið siðvenja at gera, tá serstaka byggisamtykt nr. 4 er broytt áður.

Viðv. at gera árinskanning av sólarljós/skugga, innilokan av bústaðarøkinum, øktari ferðslu, larmi o.ø, so metir kommunan ikki at neyðugt er at gera eyka kanningar hesum viðvíkjandi, tá talan er um bygging á einum matrikkli, sum longu er byggilendi, og tá mett verður, at byggingin annars í støðd og vavi fylgir teimum ásetingum, sum eru galdandi fyri økið.

Til nr. 2: Hæddin á bygninginum er ov høg

Í byggimálinum, mál nr 17/01760, hevur Føroya Kærustovnur tikið støðu til at hæddarásetingarnar eru í lagi í mun til tað sum byggiloyvi er givið til.
Somuleiðis hevur byggiharrin eftir áheitan frá kommununi lækkað byggingina síðani Føroya Kærustovnur tók støðu til málið.

Yvirskipað samsvara verandi fylgiskjøl í byggisamtyktini frá 1972 ikki tí bygda undir Byggjubakka, og fer kommunan í næstum at dagføra hesi skjøl, soleiðis at tey samsvara verandi umstøður.

Til nr. 3: Økt ferðsla

Umsitingin er vitandi um at verandi vegir í økinum eru smalir og lúka ikki vegastandardir fyri vegir, sum verða gjørdir í dag. Og umsitingin er somuleiðis vitandi um, at serliga undir Bryggjubakka er ferðslurok um sumrarnar, tá fólk og bilar ferðast í økinum hvørt um annað. Hetta er allarhelst eisini galdandi fyri Rektaragøtu.

Matr. nr. 168a er í dag óbygdur og verður brúktur til parkering av 13 akførum. Hotelíbúðarvirksemið kemur helst at økja nakað um ferðsluna í økinum, av tí at meira lív kemur í økið, og fólk fara at ferðast til og frá hotelíbúðunum.
Byggimyndugleikin hevur sett sum krav, at niðasta hædd skal innrættast við fýra parkeringsplássum, tvs. at ferðsluliga í mun til akfør, so verður minni bilaferðsla út undir Bryggjubakka, tá tað verða munandi færri parkeringspláss í økinum, og tá hesi 4 parkeringsplássini verða partur av ítøkiliga hotelvirkseminum.

Umsitingin arbeiðir áhaldandi við átøkum fyri tryggja trygdina í økinum, t.d. kann vísast á átakið við pullertum fyri at minka um bilaferðsluna út undir Bryggjubakka.
Helst eiga ferðsluviðurskiftini at verða nærri nágreinaði, soleiðis at hóskandi ferðsluátøk fyri trygdina í økinum kunnu verða sett í verk, men hóast ynskiligt er at fara undir hesa greining av økinum, so kann hon ikki forða eini bygging á matr. nr. 168a, tí økið er lagt út til bygging í núverandi byggisamtykt, og tá ítøkiliga virksemið ikki verður mett at økja meir um ferðsluna í mun til um okkurt annað virksemið verður bygt á økinum. Umsitingin vil vísa á, at øll bygging í økinum vil økja nakað um ferðsluna.

Til nr. 4: Ynskja ikki gistingarhús
Í verandi byggisamtykt verður loyvt virksemi til vinnulívi, so sum skrivstovu-, umsitingar- og handilsvirksemi. Eisini kann býráðið loyva goymslur og pakkhús.

Umsitingin metur ikki, at nýtslubroytingin til somuleiðis at fevna um bústaðir og gistingarhús í øki D1, fer at hava meiri neiliga ávirkan á grannalagið í mun til verandi loyvda virksemi. Hinvegin framleiðir gistingarhús helst minni ferðslu enn bústaðarbygging og skrivstovuvirksemi.

Í mun til rok, royk, deym, gang ella ristingar, so verður víst á, at talan er um hotelíbúðir, sum kunnu samanberast við vanligar bústaðareindir, tó at tey búgvandi verða ferðafólk.

Til nr. 5: Byggilinjan skal varðveitast
Umsitingin hevur tikið støðu til at broyta byggilinjuna samsvarandi verandi bygningar í økinum. Hesir eru ikki bygdir samsvarandi verandi byggisamtykt og fylgiskjali IV.

Tjóðsavnið førir fram, at innvikið her er ein týðandi partur av sjálvum skapinum av Tinganesi, og eigur ikki at kámast burtur við at flyta byggilinjur út.

Fylgiskjal 4 í galdandi byggisamtykt sýnir ikki at byggingin upprunaliga skuldi fylgja verandi matrikkulmarkið, heldur sýnir fylgiskjalið eina bygningsrond, sum leggur seg uppat Rektaragøtu og fyriheldur seg til upprunaliga bryggjukant. Hendan bygningsrondin er rættiliga greið og markant, og vildi tað verið óheppið at broti hetta við at kravt eitt innvik í ætlaðu byggingina á matr. nr. 168a.

Verandi matrikkul nr. 168a hevur eitt heldur óheppið skap í mun til verandi byggisamtykt, tí um bygt verður eftir núverandi matrikkulmarki, so kemur endamálið við verandi byggisamtykt við at skapa eina bygningsrond framvið Rektargøtu og upprunaliga bryggjukantinum ikki at kennast aftur. Somuleiðis er bryggjukanturin broyttur síðani byggisamtyktin upprunaliga varð gjørd, og tískil gevur innvikið ikki meining í mun til núverandi bryggjukant.

Sambært tekningunum av hotellbygninginum verður trappa bygd, og tí verður sambandið millum Rektaragøtu og Bryggjubakka fyri gongufólk økt.

**Viðmerkingar frá umsitingini:**
Byggiloyvið varð upprunaliga givið umsøkjara, grundað á, at umsitingin metti, at umsóknin fyrihelt seg til verandi ásetingar í serstøku byggisamtyktini.

Tá Føroya Kærustovnur broytir hesa niðurstøðu, og tá umsitingin annars hevur hildið og viðgjørt umsóknina út frá metingini, at virksemið býarskipanarliga hóskar seg á staðnum, og at tað tænir økinum býarskipanarliga at bygningsrondin verður inntakt, so verður mett neyðugt at broyta ásetingarnar í serstøku byggisamtyktini, soleiðis at bygningsrondin undir Bryggjubakka kann byggjast fult út.

**Nýggj skjøl**
Ummæli til Tórshavnar kommunu.pdf, journal nr 23/03101-9.
Hoyringssvar í sambandi við ætlaða broyting av byggisamtykt nr 1839563_1_1.PDF, journal nr 23/03101-10.

20240614-Braev_ut-TSF_t_Tk-Hoyringssvar_broyting_serstaka_byggisamtykt_nr_4.docx
1839781_1_1.PDF, journal nr 23/03101-11.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- at staðfesta ætlaðu broytingarnar í serstøku byggisamtykt nr. 4 sambært skjalinum *SB_Tórshavn_TinganesReyn_1972_4_2022 – Rættað 28.02.2024,*
- at málið verður beint í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum við tí broyting, at punkt d. undir eindunum D. verður strikað.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Borgarstjórin setti fram soljóðandi broytingaruppskot:

Tikið verður undir við byggi- og býarskipanarnevndini við teirri viðmerking til D økið, at har tað stendur at mest loyvda hædd til yvirtrom er 3-4 metrar, skal hetta vera 3 metrar, umframt at smogur verða uttan tak og sjónligar í fylgiskjalinum.

Fyri broytingaruppskotinum atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Birgir Nielsen, Astrið Breckmann og Guttormur í Skála

Ímóti broytingaruppskotinum atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Hildur Eyðunsdóttir og Kári Johansen.

Soleiðis broytt varð sostatt samtykt at taka undir við tilmælinum frá byggi- og býarskipanarnevndini við 9 atkvøðum fyri, 4 atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

**Ískoyti**
Broytingaruppskotið (sí skjal sí *Serstøk byggisamtykt nr 4 - D1 og D2 broytingar 04.09.2025* og *Fylgiskjal 4 - Broytingaruppskot 04.09.2025*) lá frammi til almenna hoyring millum 4. september og 16. oktober 2025. Tá ið hoyringstíðarskeiðið var farið hevði kommunan móttikið 3 mótmælir og broytingaruppskot, umboðandi 16 grannar, Tjóðsavnið og Jónas Tór Næs, advokat, umboðandi tveir eigara. (sí skjal *Viðmerkingar og broytingaruppskot, 2025*).

Í skrivunum verður funnist at fleiri viðurskiftum, sum vóru viðgjørd eftir fyrra hoyringstíðarskeið. Harímillum at partar ikki hava verið hoyrdir, byggifeltið eigur at varðveitast, og at talið av passasjum/smogum eigur at vera varðveitt. Harafturat verður m.a. mælt til ikki at byggja upp um veghædd á Rektaragøtu, at dagføra heildarætlan fyri økið, og at greiningar av ferðslu, ljósviðurskiftum og volumenkanningar verða gjørdar.

Umsitingin ásannar, at ein heildardagføring av serstøku byggisamtyktini fyri Tinganes og Reyn hevði verið ynskilig at framt. Mett verður, at hetta arbeiðið eigur at vera framt í serskiltum máli, og at umsitingin í hesum málinum tekur støðu út frá viðmerkingunum, sum ítøkiliga snúgva seg um broytingarnar fyri D1 eindinar.

Niðanfyri er samanumtøka av viðmerkingum og svar frá umsitingini:

<u>1. Bygging á D1 økinum skal ikki byggjast uppum veghæddina á Rektaragøtu</u>
Grannar (16 undirskriftir) mótmæla bygging omanfyri veghæddina á Rektaragøtu. Orsøkin er at bygningurin fer at byrgja fríøkið og spæliplássið inni. Bygningurin fer at virka sum ein múrur, ið forðar

sjónliga sambandið millum gomlu Havnina og økið kring Vestaruvág, og er harvið í andsøgn við endamálið við byggisamtyktini, sum er at varðveita sermerkta dámin í økinum.

*Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:*
*Umsitingin er ikki samd í, at bygging omanfyri veghæddina á hesum økinum er í andsøgn við endamálið við byggisamtyktini. Orsøkin er at økið í upprunaligu byggisamtyktini hevur verið lýst sum byggiøki, við møguleika at byggja upp um veghædd. Bygging í hesum økinum og omanfyri veghædd, verður mett at skapa eina samanhangandi rond og andlit út móti Vestaruvág, sum er í samsvari við galdandi serstøku byggisamtykt.*

2. Byggingin verður ov høg
Bygningurin verður ov høgur í mun til intentiónina í galdandi byggisamtykt. Grundgivið verður út frá serstakari byggisamtykt við Húsabrúgv, sum somuleiðis hevur til endamáls at varðveita dámin. Framvið Áarvegnum ásetur byggisamtyktin at mest loyvda hædd javnt lækkar, tess tættari bygd verður móti Reyn. Tískil stríðir hæddarásetingin framvið Bryggjubakka ímóti hesi grundhugsan, við at loyva hækkandi bygging, út móti Tinganesi.

Víst verður á, at tá eigarar av matr.nr. 156 løgdu saman teir matriklar, sum eina ferð vóru fleiri í tali, gjørdist ein avleiðing, at møguliga hæddin á bygningi á samanløgdu matriklunum kann hækka 1,8 m í mun til støðuna áðrenn. Orsøkin er, at byggisamtyktin ásetur, at hædd á bygningum í D1 skal roknast frá hægsta jørðildi móti vegnum til yvirgrindina. Heitt verður á kommununa um at broyta tekstin í byggisamtyktini, soleiðis at orðingin "hægsta jørðildi" ikki verður brúkt, men ístaðin "miðal jørðildi" ella annað sum ger, at andlitið úteftir Vestaruvág verður javnt og í samsvar við byggingina innast undir Bryggjubakka, og á tann hátt sambært upprunaligu ætlanini við byggisamtyktini.

*Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:*
*Í mun til serstøku byggisamtyktina fyri Húsabrúgv verður henda samanberingin ikki mett at vera viðkomandi. Orsøkin er, at onki byggisamtyktarkrav er um, at bygging sum heild skal vera lækkandi, tess nærri bygt verður móti Tinganesi.*

*Tað er rætt, at samanlegging av matriklum, tá støði verður tikið í hægsta jørðildi heldur enn miðaljørðildi, í hesum førinum elvir til nakað hægri loyvda bygging í støðum. Av tí at Rektaragøta er eitt vet hægri enn Bryggjubakki, so verður byggingin loyvd hægri enn elstu bygningarnir Undir Bryggjubakka. Umsitingin metir, at hetta er ein fyrimunur í mun til galdandi byggiteknisk krøv, tí byggingin verður, eins og elsti bygningurin móti Vágsbotni, í fýra hæddum, íroknað loftshæddina.*

*Somuleiðis er hæddin lækkað nakað, tá býráðið 18. juni 2025 samtykti at broyta hæddarásetingarnar undir Eindunum D, stk. 2, har upprunaliga kravið var, at hæddin á bygningum, roknað frá hægsta jørðildi móti vegnum a-b til yvirgrindina ikki at verða minni enn 3 m og ikki meira enn 4 m.*

*Núverandi uppskot ásetur, at bygningar í mesta lagi kunnu byggjast 3 m til yvirgrindina. Samanumtikið verður mett, at byggingin ikki lækkar virðið á samlaðu framsíðuni móti havnarlagnum, men heldur hækkar um virðið.*

3. Krøv um bústaðarskyldu
Mælt verður til, at bústaðarskylda verður ásett, og mælt verður frá at byggja gistingarhús og hotellíbúðir á hesum økinum. Kommunan verður biðin um at svara, um ætlanin er at loyva hotellíbúðum í økinum og hvat allýsingin fyri hesum er.

Mælt verður eisini til at halda fast við galdandi áseting fyri punkt b, um at tað í ovastu húsahædd er loyvt at innrætta íbúðir, ella at leggja nýggja orðing afturat, sum t.d. sigur: "Ovara helvtin av samlaðu hæddunum er loyvt at innrætta til bústaðir". Orsøkin er, at skurðir, sum vísa møguliga innrættan fyri eindirnar D, hava vísa eina góða dispositión, sum ásetingin skal fyrihalda seg til.

*Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:*

*Kommunan hevur ikki heimild at krevja bústaðarskyldu í privatum byggiverkætlanum sambært § 5a í býarskipanarlógini. Í galdandi ásetingum verður útvent virksemi kravt í niðastu hædd móti havnarlagnum. Mett verður, at tað er óneyðugt at hava ásetingar sum krevja, at "í ovastu húsahædd er loyvt at innrætta íbúðir", tá ið nýtslan fyri D eindirnar framyvir verður kannað* vinnulívsendamáli og bústaðarendamáli.

*Hotellíbúðir veita meira pláss og fleiri hentleikar enn vanlig gistingarhús, sum ikki eru loyvd í D1 eindunum. Endamálið er at veita umstøður til fólk, sum vitja í eitt longri tíðarskeið, og gerst málbólkurin tískil einstaklingar ella familjur, sum ferðast í arbeiðisørindum. Møguleiki verður at byggja og nýta bygning til hetta endamálið, sambært uppskotinum um byggisamtykt.*

<u>4. Væntandi atlit til útsjónd og krav um at dagføra heildarætlan</u>
Galdandi fylgiskjal IV lýsir væntaða útsjónd móti Vestaruvág, tá økið er fult bygd. Uppskotið er frá 1972 og lýsir bygging har yvirgrindir og mønur eru javnfjarar við vegin. Mælt verður til at broyta byggisamtyktina, soleiðis at fyri partin av eindini D1, kunnu mønir liggja uppá tvørs, um hetta gevur snøggari bygningsloysnir og er til fyrimuns fyri økið frammanfyri og aftanfyri. Grundgevingin fyri hesum er við íblástri frá Tyske Bryggen í Bergen, og at sambært gomlum tekningum hava bygningar staðið við takrygginum uppá tvørs av Tinganesi. Hetta kann eisini skapa betri ljósviðurskifti á Rektaragøtu og í passasjuni millum Rektaragøtu og Vestaruvág.

Spurt verður, um kommunan ætlar sær at gera eina heildarætlan, og um ikki, verður kommunan biðin um at grundgeva fyri hesum. Víst verður á manglandi tilfar, sum lýsir útsjónd við støði í dagførdum árinskanningum, volumenstudie og sólargangskanningum, til tess at lýsa væntaðar avleiðingar fyri økið og fyri íbúgvarnar, tá bygging verður framd sambært uppskotinum um broyting í byggisamtyktini.

*<u>Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:</u>*
*Upprunaliga uppskotið, sum fekk byggiloyvi í 2021 (sí mál 17-01670) hevði takmønur ið vendu vinkulrætt við Rektaragøtu, og ikki javnfjart, sum serstaka byggisamtyktin krevur. Mett var tá, eins og mótmæli omanfyri vísir á, at frávikið viðv. mønu hevði verið viðvirkandi til at bøta um ljósviðurskiftini á staðnum.*

*Eftir at byggimálið varð kært og Føroya Kærustovnur hevði tikið avgerð, varð m.a. staðfest at mønurnar ikki vóru í samsvari við ásetingar í serstøku byggisamtyktini. Ráðgevar hava síðani broytt uppskotið við at minka kvistar á eystursíðuni, lækka yvirgrindina 1 m á eystursíðuni og gjørt tekjuna javnfjara við Rektaragøtu. Viðkomandi tekningar og skuggadiagrammir, sum lýsa upprunauppskotið eru at finna í skjølunum HUB uppskot við kvistum og longsgangandi mønu 230224_A3 liggjandi og Skuggadiagramm kl 09, 12, 15, 18.pdf*

*Umsitingin ásannar at fleiri serstakar byggisamtyktir, harímillum serstaka byggisamtyktin fyri Tinganes og Gomlu Havnina, treingja til eina heildardagføring. Vegna væntandi starvsfólkatilfeingi og raðfesting er hetta arbeiðið ikki sett í gongd. Umsitingin metir at fyriliggjandi uppskot er í samsvari við intentiónina í serstøku byggisamtyktini og at ein størri dagføring av heildarætlanini er óneyðug, áðrenn støða verður tikin til hetta málið. Mælt verður tí til at halda fast í hesi broyting, grundað á at vavið og nýtslan eru í samsvari við galdandi byggisamtykt.*

<u>5. Ikki nøktandi hoyring</u>
Mótmælið førir fram, at ein uppgáva hjá serstaka byggiráðnum er at vegleiða kommununa um byggisamtyktina við tí fyri eyga at varðveita dámin í Tinganesi og gomlu Havnini. Um broytingar verða gjørdar í byggisamtyktini uttan at taka Serstaka Byggiráðið við upp á ráð, so verður uppgávan hjá ráðnum ómøgulig. Tá ið søkt verður um bygging eftirfylgjandi, er tað ov seint og kravt verður tí, at serstaka byggiráðið verður hoyrt.

Serstaka byggiráðið varð hoyrt í sambandi við upprunaliga byggimálið, og á fundi tann 5. juli 2017 mælti serstaka byggiráðið frá verkætlanini m.a. vísandi til, at ferðsluviðurskiftini ikki eru lýst, og at hetta tykist at vera í andsøgn við verandi hugburð hjá kommununi, har kommunan heldur roynir at avmarka ferðsluna í økinum. Harafturat hevur serstaka byggiráðið viðmerkt, at "bústaðarøkið á Reyni kemur at liggja í skugganum av ætlaðu høgu byggingini, og at fatanin av, at býlingurin liggur á einum reyni, hvørvur."

*Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:*
*Víst verður svar Til nr 1: Partar eru ikki hoyrdir/tiknir við í viðgerina í fyrra hoyringsumfarinum:*
*Serstaka byggiráðið, sum er sett við umboði fyri Tórshavnar kommunu, Føroya Fornminnissavn/Føroya landsstýri og grannar í økinum, hevur til uppgávu at vegleiða býráðið, tá mál verða viðgjørd, ið koma inn undir fyriskipanir í serstøku byggisamtyktini.*
*Talan er sostatt um eitt ráð, sum verður hoyrt og skal vegleiða í sambandi við byggimál.*
*Umsitingin hevur ikki mett, at serstaka byggiráðið eigur at verða hoyrt, tá serstaka byggisamtyktin verður broytt – ei heldur hevur hetta verið siðvenja at gera, tá serstaka byggisamtykt nr. 4 er broytt áður.*

*Í mun til niðurstøðuna frá 2017 og kravið um at lýsa ferðsluviðurskiftini nærri, verður somuleiðis víst til svar til Til nr. 3: Økt ferðsla í fyrra hoyringsumfarinum, tá umsitingin svaraði soleiðis:*

*Viðv. at gera árinskanning av [...] øktari ferðslu, larmi o.ø, so metir kommunan ikki at neyðugt er at gera eyka kanningar hesum viðvíkjandi, tá talan er um bygging á einum matrikkli, sum longu er byggilendi, og tá mett verður, at byggingin annars í stødd og vavi fylgir teimum ásetingum, sum eru galdandi fyri økið. Umsitingin er vitandi um at verandi vegir í økinum eru smalir og lúka ikki vegastandardir fyri vegir, sum verða gjørdir í dag. Og umsitingin er somuleiðis vitandi um, at serliga undir Bryggjubakka er ferðslurok um sumrarnar, tá fólk og bilar ferðast í økinum hvørt um annað. Hetta er allarhelst eisini galdandi fyri Rektaragøtu.*

*Matr. nr. 168a er í dag óbygdur og verður brúktur til parkering av 13 akførum. Hotelíbúðarvirksemið kemur helst at økja nakað um ferðsluna í økinum, av tí at meira lív kemur í økið, og fólk fara at ferðast til og frá hotelíbúðunum.*
*Byggimyndugleikin hevur sett sum krav, at niðasta hædd skal innrættast við fýra parkeringsplássum, tvs. at ferðsluliga í mun til akfør, so verður minni bilaferðsla út undir Bryggjubakka, tá tað verða munandi færri parkeringspláss í økinum, og tá hesi 4 parkeringsplássini verða partur av ítøkiliga hotelvirkseminum.*

*Umsitingin arbeiðir áhaldandi við átøkum fyri at tryggja trygdina í økinum, t.d. kann vísast á átakið við pullertum fyri at minka um bilaferðsluna út undir Bryggjubakka.*
*Helst eiga ferðsluviðurskiftini at verða nærri nágreinað, soleiðis at hóskandi ferðsluátøk fyri trygdina í økinum kunnu verða sett í verk, men hóast ynskiligt er at fara undir hesa greining av økinum, so kann hon ikki forða eini bygging á matr. nr. 168a, tí økið er lagt út til bygging í núverandi byggisamtykt, og tá ítøkiliga virksemið ikki verður mett at økja meir um ferðsluna í mun til um okkurt annað virksemið verður bygt í økinum. Umsitingin vil vísa á, at øll bygging í økinum vil økja nakað um ferðsluna.*

6. Byggifeltið eigur at vera varðveitt
Tjóðsavnið metir ikki, at víðkaða bryggjan er haldfør grundgeving fyri at víðka og broyta byggifeltið, og at tað er skeivt at rætta út bygningslinjuna. Innvikið, sambært galdandi byggisamtykt, er ein týðandi partur av søguliga skapinum av Tinganesi, og eigur ikki at kámast burtur við at flyta byggilinjuna. Strekkið millum innasta bygning í Vágsbotni og ytsta bygningin undir Rektaragøtu er um 170 m, og er økið við Tinganes og Reyn ov gott til einsrætting og beinar strikur og beinar kaikantar.

Við hesi broyting víðkar kommunan breiddina á komandi bygging, so at talan um ein stóran og óhóskandi bygningsmassa í ytra partinum av Bryggjubakka.

*Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:*
*Um byggifeltið framyvir skal fyrihalda seg til bryggjuskapið í dag ella søguliga innvikið, er ein grundleggjandi spurningur, um byggisamtyktin skal taka støði í galdandi umstøðum ella søguligum sporum. Sum víst hevur verið á, er endamálið við byggisamtktini at varðveita, men samstundis hevur byggisamtyktin eisini upprunaliga havt til endamáls at menna økið.*

*Ein einføld og bein byggilinja umboðar skynsama nýtslu av byggilendinum, og fyriheldur seg til núverandi bryggjukant og byggilinju. Av tí at byggifeltið verður víðkað kann bygningur á matr. nr. 168a byggjast við somu breidd sum grannabygningarnir, og metir umsitingin hetta vera hóskandi.*

7. Tal av passasjum fer frá 3 til 2:
Talið av passasjum (smogum) millum Reyn og bryggjuna verður sambært uppskotinum, samanborið við galdandi fylgiskjal IV, lækkað úr trimum til tvær. Hetta sperrar íbúgvarnar frá økinum Undir Bryggjubakka og haldast skal fast við uppruna talið av passasjum. Ein skal í hesum sambandi leggja til merkis orðingar í viðmerkingunum til byggisamtyktina um at hugsa langsiktað og gera broytingar, tá hús verða endurnýggjaði.

*Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:*
*Smogan, ið sipað verður til, er staðsett millum elsta partin av Bryggjubakka og matr. nr 178a, har Føroya Fiskimannafelag húsast í dag. Hesin bygningurin er sambært býaratlasinum bygdur um 1930.*

*Fylgiskjalið frá 1972 lýsir tískil eina skipan, sum enn ikki er framd, og er umsitingin samd í viðmerkingini og upprunaligu intentiónini, um at ein møgulig passasja á hesum staðnum hevði verið hóskandi. Orsøkin er, at hon hevði brotið longsta bygningsmassan sundur, sum er umleið 80 m. Tí er møguliga skilagott at varðveita hesa ætlan í eini dagførdari heildarætlan fyri økið. Í mun til uppskotið og fyri ytra partin av bryggjubakka tekur broytingin útgangstøði í verandi skipan, og verður talið av passasjum sambært byggiætlanini í veruleikanum økt frá einari til tvær (ella frá 3 til 4, um gongusambandið í ytru endunum telur við), Bygningsrondin í ytra partinum av Bryggjubakka verður tá ongastaðni longri enn umleið 40 m, og hetta verður mett hóskandi.*

**Nýggj skjøl:**
- j.nr. 25/01086-7 - *Serstøk byggisamtykt nr 4 - D1 og D2 broytingar 04.09.2025*
- j.nr. 25/01086-7 - *Fylgiskjal 4 - Broytingaruppskot 04.09.2025*
- j.nr. 25/01086-13 - *SB_Tórshavn_TinganesReyn_1972_4_2026 – Rættað 04.09.2025*
- j. nr. 25/01086-12 – *Viðmerkingar og broytingaruppskot, 2025*
- j. nr. 17/01760-108 - *HUB uppskot við kvistum og longsgangandi mønu 230224_A3 liggjandi*
- *j.nr. 17/01760-5 - Skuggadiagramm kl 09, 12, 15, 18.pdf*

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- at staðfesta ætlaðu broytingarnar í serstøku byggisamtykt nr. 4 sambært skjalinum *SB_Tórshavn_TinganesReyn_1972_4_2026 – Rættað 04.09.2025*
- at málið verður beint í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. apríl 2026:** Ein meiriluti, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Birgir Nielsen, tekur undir við tilmælinum.

Kári Johansen tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 30. apríl 2026:** Útsett.

# 129/26 Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.02.2025 | 30/25 | 25/01104-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.02.2025 | 63/25 | 25/01104-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 31.03.2025 | 60/25 | 25/01104-1 |
| 4 Býráðsfundur | 24.04.2025 | 111/25 | 25/01104-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.01.2026 | 4/26 | 25/01104-1 |
| 6 Býráðsfundur | 29.01.2026 | 11/26 | 25/01104-1 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.03.2026 | 63/26 | 25/01104-1 |
| 8 Býráðsfundur | 19.03.2026 | 82/26 | 25/01104-1 |
| 9 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.04.2026 | 101/26 | 25/01104-1 |
| 10 Býráðsfundur | 30.04.2026 | 129/26 | 25/01104-1 |

**Samanumtøka av málinum**
Hetta málið er eitt framhald av málinum Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað (21/03382), sí skjalið *Upprunaliga málið – Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað*.

Í 2020 varð samtykt at endurskoða byggisamtyktirnar fyri allar bygdirnar í kommununi (20/04243). Upprunaliga var ætlanin at endurskoða tær galdandi serstøku byggisamtyktirnar, sum í fleiri førum ikki hava verið endurskoðaðar síðani kommunusamanlegging.

Endamálið er at broyta ásetingar, soleiðis at tær bæði samsvara betri millum bygdirnar í kommununi (javnseta bygdirnar) og við almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu, harafturat verður í ávísum førum viðmælt at tillaga byggisamtyktarmørk. Á hendan hátt er tað bæði lættari at skilja og umsita byggisamtyktirnar fyri bygdirnar í kommununi.

Fyrsta uppskotið um at endurskoða serstøku byggisamtyktina fyri Velbastað varð samtykt 28. oktober 2021 og lá til almenna hoyring millum 1. nov. 2021 til 13. des. 2021. Kommunan móttók 3 mótmælir og mælti umsitingin frá at ganga teimum á møti.

Málið varð samtykt og síðani sent landsmyndugleika til góðkenningar. Í skrivi frá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum, dagfest 27. september 2022, verður heitt á kommununa, at bygdirnar í Tórshavnar kommunu framyvir vera reguleraðar í almennu byggisamtyktini, ella við hvør sínari almennari byggisamtykt. Umsitingin hevur síðani gjørt uppskot um almenna byggisamtykt fyri Velbastað, sí skjal *Almenna byggisamtyktin – Velbastaður, rættað*.

**Lýsing av málinum**
Uppskotið varð samtykt í byggi- og býarskipanarvendini 12 februar í 2024, men varð av misgáum ikki lagt aftur fyri Velbastaðnevndini fyrr enn í desember 2024. Umsitingin sendi tilfarið umvegis teldupost og Velbastaðnevndin hevði hesar viðmerkingar:

**Viðmerkingar frá velbastaðarnevndini:**

*Málið hevur verið fyri hjá okkum fyrr, og kunnu vit vísa til tær viðmerkingar sum eru gjørdar tá. Eisini hava vit hesar viðmerkingar at leggja afturat:*

1) *Vit ynskja at hetta málið verður viðgjørt eins og málið í Kirkjubø. Málið á Velbastað er sent til staðbundnu nevndina, meðan í Kirkjubø er sent til almenna hoyring.*
2) *Rættast hevði verið við einari almennari kunning í báðum bygdunum.*
3) *Í nýggju byggisamtyktini hevur man broytt økið F (Almenn fríøki) til D2 (Almennir stovnar og*

*mentan). At taka fríøki úr samtyktini ger, at tú hevur møguleika at byggja á hesum økjum, og sostatt eru ongi almenn fríøki á Velbastað. Hesum mótmæla vit.*

4) *Í fleiri av ásetingunum verður orðingin «og tilíkt» nýtt, og meta vit at hetta er óheppið, tá tað hetta kann boyggjast og vendast, alt eftir hvørji áhugamálini eru.*

Umsitingin svaraði Velbastaðnevndini 16. desember 2024.

*Til 1 og 2:*
*Málið verður eftir ætlan lagt fyri býráðið í januar 2025, og fer síðani, eins og endurskoðanin av Kirkjubø, út til almenna hoyring í minst 6 vikur. Í hoyringstíðarskeiðnum er ætlanin at umsitingin leggur uppskotið fram, og borgarar fáa høvið at spyrja inn til og viðmerkja málið, á kunnandi borgarafundi í Velbastað.*

*Til 3:*
*Hesa viðmerking ynskja vit at fáa lýsta nærri, tí sambært viðmerkingini verður øki F í verandi byggisamtykt lagt til almenn fríøki, meðan verandi byggisamtykt lýsir F sum alment frítíðarøki (ítróttarvøllir, spæliplássútiveruplássúo.t.).*
*Sambært uppskotinum kemur D2 ístaðin fyri bæði E (almennir stovnar) og F (almenn frítíðarøki), og metir umsitingin at D2 (almennir stovnar og mentan) rúmar bæði endamál.*

*Til 4:*
*Orðingin "og tilíkt" er afturvendandi fyri allar almennu byggisamtyktirnar í Tórshavnar kommunu, umframt galdandi byggisamtykt fyri Velbstað og Kirkjubø. Endamálið er at avmarkað talið av økispørtum og at varðveita ein ávísan fleksibilitet í umsitingini, sum kann vera ein fyrimunur bæði í samband við byggimálsviðger og fyri menning av bygdini. Tað er tó lætt at ímynda sær at orðingin verður brúkt til at fevna um nýtslu, sum ikki hóskar, og verður viðmerkingin tikin til eftirtektar.*

Umsitingin mælir til at leggja uppskotið, sum lýst í hesum málinum fyri býráðið og síðani til almenna hoyring.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022

**Upplýsingar frá umsitingini**
Í málinum 25/00818, verður mælt til at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr. 50ø, Velbastaður, frá E (almennir stovnar) til B (sethús) sambært galdandi serstøku byggisamtykt. Hetta er í sambandi við at frískúlin niðurleggur virksemið, og ynskið er at selja ognina.

Sambært uppskotinum um endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað, verður matr. 50ø broyttur frá E øki til D2 økið (almennir stovnar), og tískil kemur hetta ikki at samsvara við tilmælið í máli 25/00818, um broytingin til sethús verður góðkend.

Umsitingin mælir til, at atlit verður tikið til mál nr 25/00818, soleiðis at tilfarið sum verður sent til endaliga viðgerð, annaðhvørt lýsir matr. nr 50ø sum A bústaðarøki ella sum E almennir stovnar, treytað av endaligu viðgerðini av máli nr 25/00818.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- *Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað,* journal nr. 21/03382
- *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar,* journal nr. 20/04243
- *Fyrispurningur um broyting av byggisamtykt, galdandi fyri matr. nr. 50ø, Velbastaður - 24/08611,* journal nr. 25/00818

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

## Skjøl

- *Almenna byggisamtyktin – Velbastaður, rættað,* journal nr. 25/01104-2.
- *Kort – áðrenn broyting,* journal nr. 25/01104-2
- *Kort – eftir broyting,* journal nr. 25/01104-2.
- *Velbastað – áðrenn og eftir– Tekstur,* journal nr. 25/01104-2.
- *Upprunaliga málið – Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað,* journal nr. 25/01104-4

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja uppskotið til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað sambært skjølunum *Almenna byggisamtyktin – Velbastaður, rættað* og *Kort – eftir broyting*, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. februar 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Býráðsfundur 27. februar 2025: Atkvøtt varð um uppskot frá Tróndi Sigurðsson um at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina.

Uppskotið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti:**

**Viðmerkingar frá Kirkjubøar/Velbastaðarnevndini:**

*Viðmerkingar til mál 21/03382. Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað.*

*Málið hevur verið fyri hjá okkum fyrr, og kunnu vit vísa til tær viðmerkingar sum eru gjørdar tá. Eisini hava vit hesar viðmerkingar at leggja afturat:*

*1) Vit ynskja at hetta málið verður viðgjørt eins og málið í Kirkjubø. Málið á Velbastað er sent til staðbundnu nevndina, meðan í Kirkjubø er sent til almenna hoyring.*

*2) Rættast hevði verið við einari almennari kunning í báðum bygdunum.*

*3) Í nýggju byggisamtyktini hevur man broytt økið F (Almenn fríøki) til D2 (Almennir stovnar og mentan). At taka fríøki úr samtyktini ger, at tú hevur møguleika at byggja á hesum økjum, og sostatt eru ongi almenn fríøki á Velbastað. Hesum mótmæla vit.*

*4) Í fleiri av ásetingunum verður orðingin «og tílíkt» nýtt, og meta vit at hetta er óheppið, tá tað hetta kann boyggjast og vendast, alt eftir hvørji áhugamálini eru.*

Á býráðsfundinum 27. februar 2025 gjørdu býráðslimir vart við viðmerkingarnar frá staðbundnu nevndini, og ivamál var, um byggi- og býarskipanarnevndin hevði tikið viðmerkingarnar til eftirtektar. Víst verður til viðmerkingarnar omanfyri.

Býráðslimir mettu, at av tí at talan er um ógreið viðurskiftir og stórar prinsipiellar broytingar, so var best, at uppskotið varð dagført samsvarandi viðmerkingunum frá staðbundnu nevndini, og at uppskotið harvið verður meira klárt, áðrenn uppskotið verður lagt til almenna hoyring.

Umsitingin ásannar, at broytingar av galdandi byggisamtykt krevja gjølla viðgerð, harímillum móttiknu viðmerkingarnar frá staðbundnu nevndini. Umsitingin viðmælir tó, at verandi uppskot, sum er lýst í hesum málinum, verður lagt fyri býráðið og síðani til almenna hoyring. Í hoyringstíðarskeiðnum verður almennur borgarafundur fyriskipaður á Velbastað, soleiðis at borgarar kunnu fáa neyðugt innlit í málið, og síðani viðmerkja. Á henda hátt verður møguleiki at samla so nógvar viðmerkingar og sjónarmið sum gjørligt, áðrenn endaliga viðgerðin av málinum verður gjørd og møguligar dagføringar av uppskotinum verða gjørdar.

Hetta er sami leistur, sum hevur verið nýttur í sambandi við endurskoðanina av byggisamtyktunum fyri Kirkjubø, Nólsoy, Hvítanes og Kaldbak.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja uppskotið til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað sambært skjølunum *Almenna byggisamtyktin – Velbastaður, rættað* og *Kort – eftir broyting*, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 31. mars 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 24. apríl 2025:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Uppskotið lá til almenna hoyring í tíðarskeiðnum 19. juni til 10. september 2025. Í hesum sambandi var kunnandi borgarafundur á Velbastað 3. september 2025. Tá ið freistin at viðmerkja var farin, hevði kommunan móttikið tvey hoyringarskriv (sí skjal *Viðmerkingar og broytingaruppskot*). Niðanfyri er ein samanumtøka av viðmerkingunum og svar frá umsitingini.

**Mótmæli frá Dánjal Paula í Búðini, Ólavi Brimnes og Sveini Zachariasen umboðandi part av staðbundnu nevndini:**

1. Frámælt at 5 F økir (alment frítíðarøki) verða broytt til D2 (almennar stovnar)

*Í galdandi byggisamtykt er munur á F-økið, (almenn frítíðarøkið) og E-økið (almennir stovnar). Í nýggja uppskotinum eru øll F-økini broytt til D2 (almennar stovnar, ítrótt, mentanarlig endamál v.m.). Hetta verður mett at vera óheppið og óhóskandi fyri fleiri av økjunum (ítøkiliga verður víst á 5 økir), og áttu hesi økini ístaðin fyri at verið broytt til D1 (frílendi), soleiðis at tey verða varðveitt sum frílendi. Sambært skrivinum eru økini í dag virðismikil náttúruøkið sum børn og onnur hava gleði av, og er ynskið at tey vera varðveitt til hetta endamálið.*

Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:
Ætlan er ikki at staðseta almennar stovnar í teimum 5 F-økjunum, sum víst verður til í hoyringsskrivinum. Umsitingin er tískil samd í, at D1 er hóskandi áseting fyri hesi økini, og verður uppskotið tillagað sambært tilmælinum.

2. K-økið (Landbúnaður) verður broytt til 4. grundumráði

*Mett verður, at tað ikki er rætt at broyta galdandi K-økið til 4. grundumráði. Orsøkin er at ásetingar fyri 4. grundumráði víðka um heimildirnar fyri hvat kann byggjast uttan fyri bøgarðarnar. Í nýggja uppskotinum verður 4. grundumráði lýst soleiðis:*

*“4. grundumráði verður lagt til landbúnað og alment frílendi og tílíkt.”,*

*Orðið “tílikt” kann boyggjast í mun til hvør lesur tað, og funnist verður somuleiðis at hesi orðing:*

*“Onnur bygging og virksemi, sum ikki hóskar seg at liggja í bygdum øki, kann staðsetast í 4. grundumráði.”*

*Mælt verður til, at halda seg til verandi áseting sum er galdandi fyri K, har tað er greitt at umráðisparturin er lagdur til landbúnað.*

Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:
Umsitingin er samd í, at heimildin fyri nýtslu í 4. grundumráði er sera breið og tískil ikki lýsir nágreiniliga, hvat kann og hvat ikki kann byggjast. Munur er eitt nú á landbúnaðarvirksemi, smærri bygging í sambandi við ferðavinnu og vindmyllur, sum er alt virksemið sum sambært byggisamtyktini kann rúmast í umráðispartinum.

Tó verður mælt frá at varðveita ásetingarnar fyri K-øki í haganum kring Velbastað. Orsøkin er, at nýtslan í galdandi áseting somuleiðis er breið, og ein varðveitan av økispartinum K stríðir ímóti endamálinum um, at ásetingar, sum í størri mun samsvara við almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu og hinar bygdirnar í kommununi, skulu vera eins. Um hagin kring Velbastað hevur aðrar ásetingar enn hagin kring aðrar bygdir í kommununi, verður hetta í fyrstu atløgu umsitingarliga fløkjasligt at umsita og at dagføra í eini heild.

Mælt verður til, at umsitingin í nýggjum máli fer undir at lýsa og nágreina nýtsluna í 4. grundumráði í síni heild fyri alla kommununa, sambært eini lendisætlan. Í hesum málinum skulu viðmerkingarnar í sambandi við 4. grundumráði í hesum málinum, takast til eftirtektar.

3. Víðkan av D1 økinum við Mýandalsá

*Í galdandi byggisamtykt er økið við Mýandalsá H: Frílendi broytt til D1: Frílendi. Í broytingaruppskoti verður mælt til at víðka hetta økið norðureftir.*

Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:
Mett verður, at náttúruvakra økið fram við ánni hóskar sum D1 frílendi, og er nýtt uppskot gjørt, har D1 økið er víðkað norðureftir sambært broytingaruppskotinum.

**Í mótmæli við 78 undirskriftum:**

1. F-økini skulu broytast til D1 heldur enn D2.

*Eins og í viðmerking 1 verður víst á, at fleiri D2 økir sambært uppskotinum, høvdu hóskað betur sum D1 økir.*

Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:
Vísandi til viðmerking 1 hevur umsitingin gingið hesi viðmerking á møti.

2. Bústaðarøki sunnanfyri Mýandalsá

*Bústaðarøki sunnan fyri Mýandalsá (á matr 50a) er alt ov tætt við ánna og fossin, og eigur at verða minkað tilsvarandi, soleiðis at tað lýkur krøvini um frástøðu frá áum og fossum, og verður partur av D1 øki.*

Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:
Stóra óbygda byggiøkið hevur mark við ánna, og hevur umsitingin í uppskoti rættað markið, soleiðis at byggiøkið verður flutt frá ánni eftir marki, sum verður mett hóskandi. Harafturat hevur umsitingin broytt E øki (almennur stovnur) til A øki, av tí at ongin útstykkingarætlan er fyri økið, og harvið er ikki greitt, júst hvar ein møguligur stovnur hevði hóskað seg, um tað eina ferð í framtíðini verður ústykkjað.

3. Mint verður á orðing í samanleggingarsáttmálanum millum Kirkjubøar og Tórshavnar kommunu

*Orðingin er soljóðandi:*
*"Kirkjubøur og Velbastaður verða varðveittar sum bóndabygdir og koma at bera dám av hesum. Dyrkað jørð, bæði innan og uttangarðs, eigur í hesum sambandi, í mest møguligan mun, at verða varðveitt sum landbúnaðarjørð. Fyrilit skal vísast fyri dyrkbærum lendi, sum, í mest møguligan mun, eigur at verða arðveitt sum lendi, ið kann dyrkast."*

Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:
Henda orðing hevur týdning fyri byggisamtykt, í mun til hvørt langtíðarendamálsynski er um at røkka, og mælir umsitingin til, at orðingin, frá samanleggingarsáttmálanum verður varðveitt undir innleiðandi brotinum «Endamál» í uppskotinum um byggisamtykt fyri Velbastað.

4. K økið skal varðveitast

*At enda verður, eins og í viðmerking 2, staðiliga mælt til, at § 10, áseting fyri 4. grundumráði skal strikast.*

*Trupulleikin við ásetingum fyri 4. grundumráði er, at møguliga nýtslan í økispartinum er víðopin, Víst verður til málið um matstovu/gistingarhús við Fossdalsgjógv, tá ið Tk gjørdi uppskot um serstaka byggisamtykt fyri Fossdalsgjógv vísandi til, at allar bygdir í Tórshavnar kommunu vóru í 4. grundumráði. Hetta hevði TK, sambært mótmælinum ikki heimild til, tí at byggisamtyktin fyri Velbastað er galdandi og harvið øki K.*

Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:
Víst verður til viðmerkingarnar, sum umsitingin hevði til pkt. 2 í fyrra hoyringsskrivinum.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Byggimálsdeildin viðmerkti uppskotið um endurskoðan av Kaldbak og Kirkjubø, og hevur umsitingin í hesum sambandi gjørt fylgjandi broytingar í sambandi við endurskoðanina av Velbastað:
1) Byggi- og nýtslustigini eru broytt frá einum til tveir desimalar.
2) Upplýsingar til møguliga heildarætlan eru nágreinaðar og lagdar afturat í breddanum.
3) P-krøvini eru broytt, soleiðis at tey eru galdandi fyri bústaðarøkir burturav (Kap III § 3).

**Nýggj skjøl**
*j.nr. 25/01104-13 Kort – Velbastað eftir broyting, nov 2024*
*j.nr. 25/01104-11 Viðmerkingar og broytingaruppskot*
*j.nr. 25/01104-12 Kort - Velbastað eftir broyting, dagf. des. 2025*
*j.nr. 25/01104-12 Almenna byggisamtyktin fyri Velbastað, uppskot des 2025*
*j.nr. 25/01104-12 Almenna byggisamtyktin Velbastað uppskot des 2025 – við markeraðum broytingum*

**Tilmæli**
Tekniski stjóri og býararkitekturin mæla til at broyta uppskotið sambært skjalinum *Kort - Velbastað eftir broyting, dagf. des. 2025* og *Almenna byggisamtyktin Velbastað dafg, des 2025* og beina málið í býráðið.

Mælt verður til, at umsitingin fær heimild at stovna mál, har farið verður undir at broyta ásetingar fyri 4. grundumráði fyri alla kommununa, har viðmerkingarnar í hesum málinum vera nærri viðgjørdar

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. januar 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 29. januar 2026:** Annfinn Brekkstein legði fram broytingaruppskot um at beina málið aftur í nevnd.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri og seks ímóti.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen, Annfinn Brekkstein, Anja Weyhe og Bergur Robert Dam Jensen.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Elin Heðinsdóttir Joensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Kristianna Winther Poulsen og Lilja Blaasvær.

**Ískoyti**
Býráðið samtykti at beina málið aftur í nevnd.
Viðgerðin í býráðnum vísti á, at møgulig broyting av galdandi K øki (landbúnaður) til 4. grundumráði, kann gerast óheppin, tá tað í verandi løtu ikki er greitt hvussu dagførdu ásetingarnar fyri 4. grundumráðið verða orðaðar, og tá tað í dag er møguligt við serstakari byggisamtykt at loyva øðrum virksemið í hesum økisparti.

Arbeiðið at dagføra byggisamtyktirnar fyri bygdirnar handlar um at gera eins ásetingar fyri allar bygdir. Býarskipanin fyri kommununa er soleiðis skipað, at ymiskar ásetingar eru galdandi fyri bygda økið, meðan hagin millum bygdir og bý er í økispartinum 4. grundumráðið.

Umsitingin metir at ásetingar fyri 4. grundumráði sambært uppskotinum eru hóskandi, tí hóast tær eru lutfalsliga víðfevnandi, so verður verandi landbúnaðarvirksemi kring bygdirnar varðveitt, umframt at møgulig umsókn um broytta nýtslu, í samb. við t.d. bygging av vindmyllum, grótbroti ella matstovu/gistingarhúsi, skal til politiska viðgerð, almenna hoyring og góðkennast av landsmyndugleikum, áðrenn tílík broyting verður galdandi.

Um umsitingin, í samband við endurskoðanina av Velbastað, skal fremja eina meira nágreinandi býarplan fyri nýtslu í haganum kring Velbastað nú og í framtíðini, er hetta arbeiðið at meta sum ein yvirskipaða lendisætlan, og hóast tað verður mett neyðugt at fremja, fer tað sannlíkt at seinka málið um endurskoðan munandi.

Umsitingin hevur tískil 3 møguleikar:
- At varðveita K økið (verandi áseting)
- At broyta til K til 4. grundumráði (sambært uppskotinum)
- At gera eina lendisætlan fyri hagan kring Velbastað.

Av hesum møguleikum mælir umsitingin til at halda fast í uppskotinum, har verandi K øki verður broytt til 4. grundumráði, grundað á áðurnevnda aðalmál, um at javnstilla byggisamtyktirnar fyri Tórshavnar kommunu, og tí at ásetingin fyri 4. grundumráði varðveitir verandi nýtslu, og krevur serstaka byggisamtykt, sum skal ígjøgnum drúgva tilgongd, um annað virksemið skal loyvast í hesum økispartinum.

**Aðrar viðmerkingar frá umsitingini**
Umsitingin hevur í málinum um byggisamtykt fyri Kirkjubø móttikið viðmerkingar frá Búnaðarstovuni og Bóndafelag Føroya, sum vísa á eina avmarkandi ávirkan, um H frílendi (frílendi) í bygdini, sum bæði í Kirkjubø og á Velbastað er galdandi fyri innangarðsjørð, verður broytt til D1-frílendi. Orsøkin er at D1 ásetingar ikki nevna at økið verður tilskilað landbúnðarvirksemi. Umsitingin mælir tí til at broyta býarplanin soleiðis at H økini í Velbastað (og Kirkjubø) vera broytt til 4. grundurmáði (sí *Kort - Velbastað eftir broyting, uppskot feb 2026*).

H1 økið, sum sambært galdandi byggisamtykt er lagt til friðað øki av mentunar- og søguligum grundum, verður sambært uppskotinum broytt til D1 øki, og á tann hátt lýsir byggisamtyktin meira nágreiniliga hvørji økir í bygdini hava serligt fornfrøðiligt ella varðveitingarvert virði.

**Nýggj skjøl**
*j. nr. 25/01104-16 Kort - Velbastað eftir broyting, uppskot feb 2026*

**Tilmæli**
Tekniski stjóri og býararkitekturin mæla til at broyta uppskotið sambært skjalinum *Kort - Velbastað eftir broyting, uppskot feb 2026* og *Almenna byggisamtyktin Velbastað dafg, des 2025* og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. mars 2026:** Anja Weyhe og Annita á Fríðriksmørk taka undir við tilmælinum.

Bergur Robert Dam Jensen, Birgir Nielsen og Kári Johansen taka ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 19. mars 2026:** Atkvøtt varð um tilmæli frá umsitingini, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, seks atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Gunnar Djurhuus, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Elin Heðinsdóttir Joensen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Bergur Robert Dam Jensen,Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti**
Av misgáum var ikki samsvar millum málslýsing og viðhefta kortskjal til seinastu viðgerð. Ítøkiliga er talan um broytingaruppskotið, sum umsitingin gekk á møti, har F økir vera broytt til D1. Umsitingin hevur tískil viðheft nýtt kortskjal, har feilurin er rættaður (sí *Kort - Velbastað eftir broyting, uppskot mars 2026)*.

**Nýggj skjøl**
*j. nr. 25/01104-19 Kort - Velbastað eftir broyting, uppskot mars 2026*

**Tilmæli**
Tekniski stjóri og býararkitekturin mæla til at broyta uppskotið sambært skjalinum *Kort - Velbastað eftir broyting, uppskot mars 2026* og *Almenna byggisamtyktin Velbastað dafg, des 2025* og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. apríl 2026:** Ein minniluti, Anja Weyhe, Heidi Lava Elgeirsdóttir, tekur undir við tilmælinum.

Ein meiriluti, Bergur Robert Dam Jensen, Birgir Nielsen, Kári Johansen, tekur ikki undir við timælinum.

**Býráðsfundur 30. apríl 2026:** Útsett.

# 130/26 Nýggj serstøk byggisamtykt fyri matr. nr. 1122a, Tórshavn - 22/05642

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.04.2026 | 94/26 | 25/05032-8 |
| 2 Býráðsfundur | 30.04.2026 | 130/26 | 25/05032-8 |

**Upprunin til málið**
Í 2022 móttók kommunan mál frá Umhvørvisstovuni til ummælis, um at sundurbýta matr.nr. 1122a í fýra stykkir. Talan er um ein matrikkul á umleið 12.500 $m^2$, og umsøkjarar vísa á, at endamálið við sundurbýtinum er at fáa arv býttan millum arvingar. Umsitingin kann ikki viðmæla sundurbýtið, uttan at serstøk byggisamtykt er galdandi, ið lýsir eina framtíðar heildarskipan av økinum.

**Lýsing av málinum**
Í 2022 varð 1122a broyttur frá 4. grundumráði til A2 øki, ætlað íbúðarbygging í fleiri hæddum. Umsitingin mælti til hesa broyting, av tí eystanfyri er býlingurin á Heimasta Horni við íbúðarhúsum upp móti skráanum og vestanfyri liggur økið Miðhorn, har ætlanir somuleiðis eru at byggja íbúðarhús í fleiri hæddum. Tískil tala býarskipanarligu umstøðurnar fyri, at matr. nr 1122a við líknandi lendi og bygging í framtíðini kann binda hesar býlingarnar saman.

A2 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavn ásetur at útstykking verður einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt, ið lýsir vavið á byggingini, og sum tryggjar nøktandi atkomu og frílendi. Heildarætlanin skal somuleiðis geva kommununi ábendingar um, í hvønn mun ætlanin hevur ávirkan á kommunalar tænastur og undirstøðukervi.

Á heysti 2025 sendu eigarar kommununi uppskot uppá serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 1122a. Uppskotið lýsir tveir atkomuvegir til økið og eina skipan við annaðhvørt 4 ella 8 íbúðarbygningum í 4 og 5 hæddum, har veghædd verður tilskilað parkering.
Umsitingin viðmælir eina skipan við 8 íbúðarbygningum og bað um skitsur, sum lýsa uppskotið, og viðmerkti eisini, at skipanin eigur at fyrihalda seg meira skynsamt til lendishallið í vestara endanum, so bygging fylgir hæddarkurvum. Umsøkjari sendi dagført tilfar og skitsur 15. Mars (sí *visual var 2a* og *Stødumynd og skurdur 5-4*), og hevur umsitingin út frá tilfarinum, gjørt eitt uppskot uppá serstaka byggisamtykt. Sí skjal *Uppskot serstøk byggisamtykt Millum Horna 1122a - apríl 2026.*

**Lógir, ásetingar o.a.**
*Ásetingar fyri umráðispart A2 í 3. grundumráði eru*

1) Umráðisparturin verður lagdur til hús í fleiri hæddum til bústaðabygging.

2) Útstykking verður einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt fyri eitt natúrligt avmarkað øki.

3) Byggistigið skal ikki fara upp um 0,25.

4) Nýtslustigið skal ikki fara upp um 0,8.

5) Hús skulu ikki verða bygd við meira enn 5 hæddum umframt nýttum lofti. Kjallari verður roknaður sum húsahædd.

6) Hús skulu ikki vera hægri enn 15 m til hægsta punkt við útvegg og 18 m til mønuna.

**Upplýsingar frá umsitingini**

Økið er umleið 12.590m$^2$, og sambært uppskotinum um nýggja serstaka byggisamtykt verður møguleiki at byggja 8 íbúðarbygningar, býtt í økini A og B. Øki A umboðar ovaru bygningarnar, sum kunnu byggjast upp í 5 hæddir. Øki B verður avmarkað til 4 hæddir, til tess at tryggja nøktandi ljós og útsýni.

Sambært uppskotinum verður møguleiki at parkera í veghæddini. Vega og bústaðarskipanin leggur upp til eitt byggistig, sum er 0,5 stig lægri enn krøvini annars eru fyri A2 økir.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
21/03374 - Umsókn um broyting av byggisamtykt á matr. nr. 1122a, Tórshavn
22/05642 - Umsókn til ummælis um sundurbýti av matr. nr. 1122a, Tórshavn

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☐**

**Skjøl**
*J.nr. 25/05032-12, visual var 2a*
*J.nr. 25/05032-12, Stødumynd og skurdur 5-4*
*J.nr. 25/05032-13, Uppskot serstøk byggisamtykt Millum Horna 1122a - apríl 2026*

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli**:
Tekniski stjóri og býararkitekturin mæla til at góðkenna serstøku byggisamtyktina fyri matr. nr. 1122a skjalinum *Uppskot serstøk byggisamtykt Millum Horna 1122a - apríl 2026* og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. apríl 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum. Nevndin vil, at yvirskipaðu viðurskiftini í sambandi við íbindingina millum Marknagilsvegin og Velbastaðvegin verða viðgjørd, herundir at íbúgvar undir Gráasteini og millum Horna fáa trygg atkomuviðurskifti.

**Býráðsfundur 30. apríl 2026:** Útsett.

| | Blað nr.: 491 |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>30. april 2026 | Forkvinnunnar merki: |

## 131/26 Skráseting av náttúrusløgum í TK

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 02.06.2025 | 43/25 | 25/05927-1 |
| 2 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 09.03.2026 | 25/26 | 25/05927-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 17.03.2026 | 63/26 | 25/05927-1 |
| 4 Býráðsfundur | 19.03.2026 | 88/26 | 25/05927-1 |
| 5 Býráðsfundur | 30.04.2026 | 131/26 | 25/05927-1 |

**Upprunin til málið**
TK arbeiðir fyri at náttúran og lívmargfeldið skal verjast og styrkjast, og at náttúrufyrilit takast, tá verkætlanir setast í verk.

Við støði í hesum hevur umhvørvisdeildin havt fundir við Tjóðsavnið, NIBIO í Norra, Umhvørvisstovuna o.o. fyri at fáa størri innlit í arbeiðið við uppbyggjan av leisti/mannagongdum til náttúruskrásetingar og árinsmetingar í TK.

Umhvørvisdeildin hevur í hesum sambandi umbiðið verkætlanaruppskot og kostnaðarmeting frá Tjóðsavninum fyri arbeiðið at menna leist í TK ísv. skráseting av náttúrusløgum í TK. Skrásetingin skal kunna nýtast, tá avgerðir skulu takast um, hvat tey ymisku lendini skulu brúkast til, soleiðis at náttúruatlit altíð verður tikið við í metingina.

**Lýsing av málinum**
Náttúruskráseting er eitt amboð, sum kann leggja lunnar undir burðardyggari fyrisiting av lendinum og verða partur av eini lendisætlan. T.d. kann ein byggiverkætlan fáa eina góða byrjan, um náttúran er væl skrásett frammanundan. Náttúruskrásetingin er fyrsta stigið til eina umhvørvisárinsmeting.

Skrásetingin av náttúrusløgum er ein systematisk uppbygging av náttúruvitan, sum gevur innlit í hvørjum standi náttúran er í, hvørji náttúrusløg eru vanlig, og hvørji eru meira sjáldsom og viðkvom og hvørji sløg hava tørv á vernd.

Lívmargfeldið og lendi er í stórari minking, tí økir verða tikin til bygging, avveitt, uppdyrkað og taðað. Hetta minkar um mótstøðuførið hjá náttúruni mótvegis broytingum uttanífrá, og náttúran er tískil meira viðbrekin fyri m.a. farsóttum og veðurlagsbroytingum.

Verður náttúruvitanin uppbygt og kortløgd í Tórshavnar kommunu, kann vegakervi og bygging tillagast í góðari tíð, og soleiðis ber til at minka um inntriv og avleiðingar á náttúruna og harvið tryggja eina skynsamari bygging og burðardyggari býarmenning.

Verkætlanin er býtt upp í 3 stig:

1. Stig (2025): Ráðlegging og menning av skrásetingarleisti.
   Heildarmeting verður gjørd, sum fevnir um undankanningar í økjum í Tórshavnar kommunu, og frágreiðing um úrslit av náttúrustandi og týdningin av lívmargfeldi verður skrivað við tí endamáli at verða løgd fyri býráðið.

2. Stig (2026): Skrásetingar halda fram, og skrásetingarleisturin verður eftirmettur.
   Fyrireikingar av feltarbeiðnum verður tikið uppaftur um várið, síðani fer feltarbeiðið í gongd aftur á sumri 2026. Tá verða fyrstu ítøkiligu skrásetingarnar gjørdar, og síðani verður mett um skrásetingarleistin. Heystið

verður nýtt uppá at tillaga arbeiðshátt hareftir, og innsavnaðu dáturnar vera viðgjørdar. Frágreiðing verður skrivað.

3. Stig (2027): Skrásetingar halda fram.
Skrásetingararbeiðið heldur fram, nú við eini meira endaligari mannagongd. Kanningararbeiðið kann tískil gerast uppá ein systematiskan hátt, sum tryggjar góða góðsku og fleiri økir kunnu tá skrásetast uppá eitt styttri tíðarskeið. Dátur verða viðgjørdar og frágreiðing verður skrivað.

Tjóðsavnið fremur verkætlanina í samstarvi við NIBIO í Norra. Verkætlanin gevur TK møguleika at menna eina náttúru skrásetingarskipan tillagað føroysk viðurskifti, sum kann liggja sum grundarlag undir politiskari ráðlegging.

Kostnaðurin fyri verkætlanina er mettur til 142.300 kr. í 2025, 350.000 kr. í 2026 og 352.300 kr. í 2027.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Mælt verður til at seta 1. stig í verk í ár, sum er ráðlegging og menning av skrásetingarleisti. Kostnaðurin fyri stig 1 er kr. 142.300, harav kommunan skal gjalda kr. 122.300.

Viðmerkjast skal, at við at gera stig 1, fær kommunan ein leist fyri heildarmeting í sambandi við undankanning í økjum í Tórshavnar kommunu. Tá hetta arbeiði er gjørt, kann støða takast til, um farast skal víðari til stig 2 og 3.

**Skjøl**
25/05927-2 Tjóðsavnið, kortlegging av náttúrusløgum í Tórshavnar Kommunu

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | x | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á Umhvørvisdeildini mæla til, at tikið verður av tilboðnum frá Tjóðsavninum stig 1, og at hetta verður fíggjað av rakstri, konto 6610, Umhvørvistiltøk v.m.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 02. juni 2025:** Ein meiriluti, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála og Anja Weyhe, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein og Birgir Nielsen, tekur ikki undir við tilmælinum, grundað á at kommunan ikki skal fíggja rakstrarstøð hjá landsins stovnum, og at avgerðarrætturin verður fluttur til Tjóðsavnið.

**Ískoyti:**
Náttúruskráseting í Tórshavnar Kommunu (stig 1):

Í 2025 hevur umsitingin saman við Tjóðsavninum arbeitt við stig 1 av verkætlanini Skráseting av náttúrusløgum í Tórshavnar kommunu. Hetta er eisini samsvarandi yvirlýsing frá 2007, har borgarstjórar og kommunur úr øllum heiminum undirskrivaðu eina altjóða yvirlýsing um lívfrøðiligt margfeldi í bygdum økjum, skipað av UNEP.

Í grannalondum okkara er náttúrukortlegging eitt grundleggjandi amboð, sum verður nýtt og altíð er ein partur av lendisætlanum. Um orka verður løgd í hetta arbeiðið, kann øll kommunan verða kortløgd innanfyri eitt ávíst áramál og við tí kunnu kommunalar avgerðir takast á einum góðum og tilvitaðum vitanarstøðið. NIBIO í Norra kortleggir sum dømi eitt økið á støðd við Føroyar á hvørjum árið.

Endamálið við stig 1 hevur verið at:

- leggja lunnar undir at menna ein fakligan og haldføran leist
- meta um mannagongdir fyri skráseting og kortlegging av náttúrusløgum
- fáa royndir, áðrenn verkætlanin verður víðkað. Hetta fyri, at tryggja at feltdagar og kanningararbeiðið verður so effektivt sum gjørligt framyvir.

Stig 1 er at meta sum undanverkætlan, har tvey útvald øki verða lýst og samanborin í frágreiðingini frá Tjóðsavninum, sum er hjáløgd í málinum (j.nr. 25/05927-10). Í frágreiðingini verður eisini týdningurin av náttúrukortlegging, sum eitt amboð hjá Tórshavnar kommunu, lýstur.

Náttúruskráseting í Tórshavnar Kommunu (stig 2):
Stig 2 í verkætlanini er at halda fram og víðka skrásetingina av náttúrusløgum í Tórshavnar Kommuna. Í mun til stig 1, har tað var Tjóðsavnið, sum stóð fyri skrásetingini, er fyri stig 2 ætlanin at brúka NIBIO (Norsk institutt for bioøkonomi), sum kemur at standa fyri skrásetingini í eini royndarverkætlan í samstarvi við Tórshavnar Kommunu og Tjóðsavnið.

NIBIO hevur 25 ára royndir frá líknandi verkætlanum í Norra og hevur tí serfrøði innan økið. Samstarvið við NIBIO skal tryggja eina skjóta og dygargóða skráseting og skal eisini verða við til at menna førleikar hjá Tórshavnar Kommunu og Tjóðsavninum innan náttúruskráseting. Ætlanin er, at 3 starvsfólk frá NIBIO skulu skráseta útvald øki í 2026. Víst verður til skriv frá NIBIO dagfest 24. februar 2026, j.nr. 25/05927-11. Umframt verkætlanarlýsingina frá Tjóðsavninum j.nr. 25/05927-2.

Kostnaður fyri stig 2 er mettur til uml. kr. 400.000,-

Samstundis sum stig 2 fer av bakkastokki, verður stig 3 av verkætlanini fyrireikað. Í stig 3 er ætlanin at halda fram og víðka náttúruskrásetingina. Í hesum verkætlanarstigi verður eisini arbeitt við at søkja stuðul úr grunnum og gera samstørv innan økið. Tað hevur stóran týdning at uppbyggja førleikar í Føroyum og tí verða lívfrøðilesandi tikin við í kanningararbeiðið, saman við umsitingini í Tórshavnar kommunu og Tjóðsavninum.

Endamálið er, at tá stig 3 er liðugt, hevur Tórshavnar Kommuna og samstarvsfelagar ment mannagongdir og førleikar innan náttúruskráseting í Føroyum. Nátturuskráseting skal koma í fasta legu í Tórshavnar Kommunu og skal gerast týðandi amboð innan burðardygga kommunala umsiting.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Skjøl**
25/05927-10 Frágreiðing, Kortlegging av náttúrusløgum stig 1 (2025)
25/05927-11 Tilbud Naturtypekartlegging Torshavn i DKK 2026.pdf

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒

| | **Býráðsfundur**<br>30. april 2026 | Blað nr.: 494 |
|---|---|---|
| | | Forkvinnunnar merki: |

Eykajáttan ☐

Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| 6675 | | Umhvørvistiltøk o.a. (íløgur) | 6675 | | | Skráseting av náttúrusløgum | 400.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**

Tekniski stjórin og leiðarin á Umhvørvisdeildini mæla til:

- at seta "stig 2" í verk, av náttúruskráseting í Tórshavnar Kommunu, soleiðis at arbeiðið við at skráseta kann fara í gongd á sumri 2026
- at játtaðar verða kr. 400.000 til arbeiðið av løgukonto 6675 Umhvørvistiltøk o.a. (íløgur) á nýggja verkætlan – Skráseting av náttúrusløgum.
  at beina málið umvegis fíggjarnevndina í býráðið.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 09. mars 2026:** Í sambandi við fíggjarætlanararbeiði varð avtalað, at arbeiði viðvíkjandi skráseting av náttúrusløgum skuldi uppraðfestast við 1 mió. kr. Í fíggjarætlanini fyri 2026 er henda milliónin endað á íløgukonto 8175 Vegir. Neyðugt er tí at rætta hetta mistak og at flyta hesa milliónina á konto 6610 Umhvørvistiltøk o.a.

Tilmæli verður tí broytt til soljóðandi:

Tekniski stjórin og leiðarin á Umhvørvisdeildini mæla til:

- at seta "stig 2" í verk, av náttúruskráseting í Tórshavnar Kommunu, soleiðis at arbeiðið við at skráseta kann fara í gongd á sumri 2026.
- at játtaðar verða kr. 400.000 til arbeiðið av konto 6610 Umhvørvistiltøk o.a.
- at kr. 1 mió. verða fluttar av løgukarmi LK81999 Vegaverkætlanir undir konto 8175 Vegir, á konto 6610 Umhvørvistiltøk o.a.
- at beina málið umvegis fíggjarnevndina í býráðið til tvær viðgerðir.

Ein meiriluti, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Anja Weyhe, tekur undir við tilmælinum.

Annfinn Brekkstein tekur ikki undir við tilmælinum og vísir til avgerð sína 2. juni 2025.

**Fíggjarnevndin 17. mars 2026:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Kristianna Winther Poulsen, tekur undir við náttúru- og umhvørvisnevndini og beinir málið í býráðið til tvær viðgerðir.

Ein minniluti, Høgni Vilhelmsen, tekur støðu á býráðsfundi.

**Býráðsfundur 19. mars 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við fyrstu viðgerð við átta atkvøðum fyri, fimm atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Gunnar Djurhuus, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Elin Heðinsdóttir Joensen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

**Býráðsfundur 30. apríl 2026:** Útsett.

| | **Býráðsfundur**<br>30. april 2026 | Blað nr.: 496<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

# 132/26 Leigumál. Kommunan leigar lendi til Transformarastøð. SEV. Øki á Bøllureyni. matr.nr. 139a, Tórshavn.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.04.2026 | 93/26 | 25/09219-3 |
| 2 Býráðsfundur | 30.04.2026 | 132/26 | 25/09219-3 |

**Upprunin til málið. SEV hevur søkt um byggiloyvi til eina transformarastøð á matr.nr. 139a, Hoyvík. Á Bøllureyni við Oyggjarvegin.**

**Lýsing av málinum**
Kommunan hevur givið byggiloyvi til Transformarastøðina 29.09.2025.
Náttúrufriðingarnevnd Streymoyar Sýslu, hevur givið sýtt samtykki til bygging/staðseting 19.08.2025, og hevur hin 28.september 2025, givið loyvið.

Vísandi til at talan er um festijørð, krevur Búnaðarstovan at leigusáttmáli verður gjørdur, og at Tórshavnar kommuna stendur fyri leigumálinum.
Kostnaður. Byrjan kr. 2.500,- og ein árlig leiga á 500 kr.

Búnaðarstovan hevur sent kommununi eitt uppskot til ein 10 ára leigusáttmála.

**Lógir, ásetingar o.a.**

Matrikkullógin og viðtøkur fyri SEV.

Sambært grein 10 stk. 1, í viðtøkunum fyri SEV framgongur, at hvør limakommuna letur innanfyri kommunumark felagnum ókeypis til handa ta vídd, ið tørvar til háspennings- og lágspenningsleiðingar, transformarastøðir og til vegir til støðirnar.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl** 25/09219-1 Leigusáttmáli.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>30. april 2026 | Blað nr.: 497 |
| | Forkvinnunnar merki: |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

## Játtan:

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| **Játtast av:** | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| | | |

| **Játtast á:** | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| | | 6111 | |

| **Upphædd** |
|---|
| 2500 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 2500 |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 500 |

**Tilmæli**:
Kommunustjórin mælir býráðnum til umvegis fíggjarnevndina, at leiga lendið frá Búnaðarstovuni í 10 ár, sí sáttmála skjal 25/09219-1

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

Kristianna Winther Poulsen og Tróndur Sigurðsson vóru ikki við í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 30. apríl 2026:** Útsett.

| | **Býráðsfundur**<br>30. april 2026 | Blað nr.: 498<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

# 133/26 Nevndarlimur Visit Tórshavn 2026

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.04.2026 | 133/26 | 26/03040-2 |

**Upprunin til málið**
Býráðið skal velja ein nevndarlim og ein tiltakslim í nevndina fyri Visit Tórshavn í 2026. Felagið Tórshavn (Visit Tórshavn) hevur havt aðalfund tann 28. apríl 2026.

**Lýsing av málinum**
Nevndin hjá felagnum Tórshavn telur fimm limir, ið sita tvey ár í senn. Annaðhvørt ár standa tveir nevndarlimir fyri vali, og annaðhvørt ár standa tríggir limir fyri vali.

Tveir nevndarlimir verða valdir beinleiðis av Tórshavnar kommunu og tríggir verða valdir av Felagnum Tórshavn á aðalfundi. Teir nevndarlimir, ið kommunan velur, og tveir av nevndarlimunum, ið Felagið Tórshavn velur, skulu verða persónar, sum eru leiðarar ella stjórar innan ferðavinnu, handilsvinnu, matstovuvinnu og møguliga aðra vinnu, sum ein ein viðkomandi leiklut í ferðavinnuhøpi.

Triði nevndarlimurin, sum Felagið Tórshavn velur, umboðar Felagið Tórshavn, og kann verða valdir millum limir felagsins ella umboðandi almennan ella privatan stovn, savn, mentanarlív ella líknandi.

Nevndarlimir kunnu ikki vera býráðslimir. Nevndarlimir kunnu verða valdir aftur.
Fyri hvønn nevndarlim verður tiltaks nevndarlimur valdur.
Nevndin skipar seg sjálva við formanni og næstformanni.

Samgongan valdi í 2025 nevndarlim og tiltakslim. Í 2026 er tað andstøðan, sum skal velja nevndarlim og tiltakslim.

Í ár standa Sóley Heradóttir Hammer og Sunnvá Dahl Høgfeldt fyri vali um sum umboð fyri Tórshavnar kommunu.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☐**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>30. april 2026 | Blað nr.: 499<br>Forkvinnunnar merki: |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli**:
Kommunustjórin mælir til, at Býráðið velur lim og nevndarlim fyri Felagið Tórshavn, sum andstøðan mælir til.

**Býráðsfundur 30. apríl 2026:** Útsett.

# 134/26 Framflytingar fyri roknskaparárið 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.03.2026 | 72/26 | 26/02479-1 |
| 2 Býráðsfundur | 19.03.2026 | 95/26 | 26/02479-1 |
| 3 Býráðsfundur | 30.04.2026 | 134/26 | 26/02479-1 |

**Upprunin til málið**
Sambært játtanarreglunum hjá Tórshavnar kommunu verða meir- og minninýtslur fluttar fram til komandi ár. Framflytingar skulu játtast sum eykajáttan í býráðnum, tvs. skulu hava tvær viðgerðir.

Meirnýtsla, sum í mesta lagi kann vera 5% av nettojáttanini, verður flutt til næsta ár. Meirnýtsla skal vera burtur innan trý ár.

Minninýtsla, sum í mesta lagi kann vera 10% av nettojáttanini, verður flutt til næsta ár. Um serlig viðurskifti gera seg galdandi, og ynski er at flyta meira enn 10% til árið eftir, kann ein umbøn um hetta sendast avvarðandi fyrisitingarstjóra.

**Lýsing av málinum**
Ársroknskapurin fyri 2025 er gjørdur upp, og gjørt er eitt yvirlit yvir rakstrar- og íløgujáttanir at flyta fram til 2026.

Samlaða framflytingin íroknað Tórshavnar Havn er í alt kr. 112,0 mió. Fyri rakstur er upphæddin kr. 24,3 mió. netto og fyri íløgur kr. 87,7 mió.

Tórshavnar havn hevur harumfamt staðfestar meirinntøkur í 2025 á kr. 11,3 mió. Biðið verður um at fáa hesa upphædd framflutta á íløgukarmin P00.

| | **Rakstur** | **Íløgur** | **Meirinntøkur** |
|---|---|---|---|
| TK | 18,1 mió | 5,9 mió | |
| TH | 6,2 mió | 81,8 mió | 11,3 mió |
| **Íalt** | **24,3 mió** | **87,7 mió** | **11,3 mió** |

Samlaða minninýtslan á rakstrarsíðuni fyri Tórshavnar kommunu frároknað Tórshavnar havn er kr. 6,2 mió. kr. Á § 1,2,5,6 og 7 er talan um minninýtslu, í meðan tað á § 3 og 4 er talan um meirnýtslu.

**Lógir, ásetingar o.a.**
**Upplýsingar frá umsitingini**
**Onnur mál**
**Lógir, ásetingar o.a.**
**Upplýsingar frá umsitingini**
**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

| | Blað nr.: 501 |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>30. april 2026 | Forkvinnunnar merki: |

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☐**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| Ymiskar | | Framflutt 2025 | Ymiskar | | Játtan 2026 | | 112,0 mió |
| 7410 | TH | Meirinntøkur | 7475 | TH | Íløgukarmur P00 2026 | | 11,3 mió |

**Tilmæli**:
Stjórnin mælir til at játtað framflyting á 24,3 mió. kr. til rakstur og 87,7 mió. kr. til íløgur. Eisini verður mælt til at staðfestar meirinntøkur hjá Tórshavnar Havn á kr. 11,3 mió verða fluttar á íløgukarmin P00.

Møguligar broytingar í framflytingum koma við til aðru viðgerð.

**Fíggjarnevndin 17. mars 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 19. mars 2026:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

**Býráðsfundur 30. apríl 2026:** Útsett.

# 135/26 Ársroknskapur fyri Tórshavnar kommunu 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 29.04.2026 | 106/26 | 26/02478-1 |
| 2 Býráðsfundur | 30.04.2026 | 135/26 | 26/02478-1 |

**Upprunin til málið**
Kommunustýrislógin inniheldur ásetingar um grannskoðan av kommununum.

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**
Kommunustýrislógin:

Sambært §45-47 er tað eitt krav, at kommunur hava óhefta og sakkøna grannskoðan, ið er ríkisgóðkend ella skrásett.

Sambært §38, stk 3, nr 4 hevur fíggjarnevndin ábyrgd av at leggja grannskoðaðan roknskap saman við grannskoðanarfrágreiðingini (grannskoðanarprotukollin, red) fyri kommunustýrið til góðkenningar og undirskrivingar.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd  Ja ☐  Nei ☐**

**Skjøl**
- Grannskoðanarprotokoll fyri ársroknskapin 2025
- Ársroknskapur 2025

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli**: Stjórnin mælir býráðnum umvegis fíggjarnevndina til at góðkenna grannskoðaða ársroknskapin fyri 2025.

**Fíggjarnevndin 29. apríl 2026:** Góðkent.

Tróndur Sigurðsson var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 30. apríl 2026:** Útsett.

| | **Býráðsfundur**<br>30. april 2026 | Blað nr.: 504<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

# 136/26 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2026

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 18.02.2026 | 48/26 | 26/00100-1 |
| 2 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 67/26 | 26/00100-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 17.03.2026 | 73/26 | 26/00100-1 |
| 4 Býráðsfundur | 19.03.2026 | 96/26 | 26/00100-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 22.04.2026 | 99/26 | 26/00100-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 29.04.2026 | 107/26 | 26/00100-1 |
| 7 Býráðsfundur | 30.04.2026 | 136/26 | 26/00100-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 13.05.2026 | 125/26 | 26/00100-1 |

**Upprunin til málið**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd  Ja ☐  Nei ☐**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>30. april 2026 | Blað nr.: 505 |
| | Forkvinnunnar merki: |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2026:** Framlagt.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 17. mars 2026:** Framlagt.

**Býráðsfundur 19. mars 2026:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mars verður lagt frá á fundinum.

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2026:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 29. apríl 2026:** Framlagt.

Tróndur Sigurðsson var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 30. apríl 2026:** Útsett.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>30. april 2026 | Blað nr.: 506<br><br>Forkvinnunnar merki: |

# 137/26 Umsókn um leingjan av leigusáttmálanum matr. nr. 970n, Álakeri 20, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 17.02.2026 | 6/26 | 25/09934-3 |
| 2 Havnanevndin | 10.03.2026 | 14/26 | 25/09934-3 |
| 3 Havnanevndin | 16.03.2026 | 23/26 | 25/09934-3 |
| 4 Býráðsfundur | 30.04.2026 | 137/26 | 25/09934-3 |

**Upprunin til málið**
Umsókn frá P/F Mariebase og P/F Bátatænastuni d.f. 3.november 2025.

**Lýsing av málinum**
P/F Mariebase leigar eitt grundøki matr. 970n í Álakeri frá Tórshavnar havn. Á grundøkinum stendur bygningur, sum P/F Bátatænastan nýtir til bátaverkstað og handil, ið selur ymiska útgerð til bátaútgerð. Harumframt verður ein partur av bygninginum leigaður út til málingahandil, og loftið verður leigað út til skrivstovu hja bilútleigufyritøku.

P/F Mariebase og P/F Bátatænastan søkja í skrivi d.f. 3.november 2025 um at leingja leigusáttmálan. Orsøkin er, at P/F Bátatænastan ætlar at keypa allan partapeningin í P/F Marine Base, sum framhaldandi skal standa sum leigari í leigusáttmálanum.
Núverandi eigarar í P/F MarineBase eru P/F Bátatænastan, ið eigur 1/3, meðan Ruth Holding Aps eigur 2/3.

Peningastovnur hvur játtað teimum fígging, tó treytað av, at leigusáttmálin við Tórshavnar havn verður longdur. Umsøkjarin søkir um at longja sáttmálan í 25 ár.

Formliga er tað P/F Marine Base, sum er leigari, og soleiðis avtaluparturin hjá Tórshavnar Havn, og hava sostatt broytingar í partaeigaraskarðanum einki við leigusáttmálan ella Tórshavnar Havn at gera.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Leigumálið kom í gildi 23. oktober 2007 og kann tað ikki, um sáttmálin ikki verður mishildin, sigast upp av eigaranum fyrr enn 25 ár ár eru farin, t.v.s. til 23. oktober 2032. Eftir hetta kann leigumálið sigast upp við 1 ára freist til ein av ásettu gjaldsdøgunum, sum eru 1.januar ella 1.juli.
Tá leigumálið er at enda komið, skal økið latast eigaranum aftur slættað og ruddað fyri alt.
Er virksemið á økinum, tá ið tey 25 árini eru farin, ið lýkur treytirnar í § 3 (handil/skrivstova/verkstað hjá leigaranum, umvæling av smábátum og annað virksemi knýtt at sjóvinnuni), og eigarin ikki ynskir at taka økið til egið brúk (...), hevur leigarin rætt at leingja leigumálið við 10 árum aftrat.
Aftaná at hesi 10 árini eru farin, hevur leigarin fyrsta rætt til at gera nýtt leigumál, um eigarin ikki nýtir rættin at taka økið til egið brúk.
Ynskir eigarin at taka bygningar á økinum til egið brúk, hevur hann rætt til at gerast eigari av hesum fyri 50% av tí metingarvirðinum.

Sostatt er leigumálið óuppsigiligt fram til 1. januar 2034, og um kommunan tá ikki skal nýta økið til annað endamál, kann leigumálið halda áfram til 2044, og síðani kann leigarin gera nýtt leigumál, um kommunan tá ikki skal nýta økið til annað endamál.

| | Blað nr.: 507 |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>30. april 2026 | Forkvinnunnar merki: |

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**
J.Nr. 25/09934-1 : Umsókn um at leingja leigusáttmála
J.Nr. 25/09934-6 : Leigusáttmáli

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Stjórin í Tórshavnar havn mælir frá at ganga umsóknini um at leingja leigumálið við 25 árum á møti, vísandi til, at tað er betri fyri kommununa og Tórshavnar havn at hava møguleikan opnan at taka økið til aðra nýtslu í framtíðini (í 2034), um tørvur skuldi verið á tí.

**Havnanevndin 17. februar 2026:** Útsett til komandi fund.

**Havnanevndin 10. mars 2026:** Útsett til eykafund 16.03.26 í havnanevndini.

**Havnanevndin 16. mars 2026:** Útsett.

Kári Johansen og Birgir Nielsen krevja málið fyri býráðið.

**Býráðsfundur 30. apríl 2026:** Útsett.

# 138/26 Umsókn um útstykkingarloyvi á matr. nr. 1233a og 1233b, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.04.2026 | 111/26 | 26/02510-8 |
| 2 Tekniska nevnd | 13.04.2026 | 59/26 | 26/02510-8 |
| 3 Býráðsfundur | 30.04.2026 | 138/26 | 26/02510-8 |

**Upprunin til málið**
Eigari søkir um útstykkingarloyvi til íbúðarbygging.

**Lýsing av málinum**
Eigarin hevur ætlanir um størri íbúðarverkætlan. Núverandi málið snýr seg um útstykking av tveimum grannamatriklum til íbúðarbygging. Matriklarnir eru ávikavist 424 og 3.256 fermetrar til víddar. Ætlaða útstykkingin er sostatt 3.680 fermetrar til víddar.

Útstykkingarætlanin fevnir um hesi skjøl, sum eru hjáløgd:

- Umsókn, sum yvirskipað lýsir verkætlanina
- Støðumynd, sum m.a. vísir byggifelt, vegaføring, parkering og fríøki
- Skurður ígjøgnum býlingin
- Uppskot til skipan av fríøki

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ognirnar eru staðsettar í umráðisparti A1 í 3. grundumráði sambært almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Almenna byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu, kap. II, § 5, stk. 4, er soljóðandi:
> "Útstykking verður einans loyvd sambært útstykkingarætlan fyri eitt natúrligt avmarkað øki."

Almenna byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu, kap. III, § 1, stk. 1, er soljóðandi:
> "Tá útstykkingar verða gjørdar, skal, umframt øki til vegir, parkering, reinsiverk o.l., hóskandi øki uppá í minsta lagi 10% av samlaðu víddini verða lagt til felagsøki, herundir spælipláss."

Almenna byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu, kap. III, § 2, stk. 1, er soljóðandi:
> "Óbygd øki, sum eru løgd av og góðkend sum tilhaldspláss o.a. sambært ásetingum, eru ikki loyvd at nýta til onnur endamál, enn tey vóru avløgd til. Tá ið óbygd øki, ið gagnlig eru til endamál, ið eru tilskilað í hesum kapitli, eru við eini hús, sum eru bygd áðrenn ásetingarnar komu í gildi, er byggivaldinum heimilað at seta forboð fyri, at tey verða bygd ella nýtt á slíkan hátt, at tey verða til bága fyri hesi endamál."

Ognirrnar eru eisini fevndar av serstøku byggisamtyktini millum Skotarók og Oyggjarvegin. Uppskot til broyting av teirri serstøku byggisamtyktini er í umbúnað.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Komandi byggingin verður væntandi býtt í tvey byggistig. Fyrra byggistigið verður væntandi íbúðarbygging oman ímóti Ringvegnum, meðan seinna byggistigið verður íbúðarbygging niðan ímóti Oyggjarvegnum. Býtið í tvey byggistig er grundað á, at fyrra byggistigið er ætlað at rúmast innan fyri núverandi byggisamtykt, meðan seinna byggistigið bíðar eftir, at tann ætlaða broytingin av serstøku byggisamtyktini er framd.

Útstykkingarmálið snýr seg tó ikki um sjálva byggingina. Útstykkingarmálið snýr seg einans um yvirskipaðu skipanina í økinum við eini útstykkingarætlan og seinni einari tekniskari verkætlan. Verður eitt ústykkingarloyvi játtað og ein teknisk verkætlan góðkend, kann umsøkjari søkja um byggiloyvi. Hetta

merkir ítøkiliga, at hóast skjølini í umsóknini vísa skapilsi av bygging, verður í útstykkingarloyvinum ikki tikin støða til byggingina.

Tann tekniska verkætlanin verður liðugtgjørd, tá útstykkingarloyvið er játtað. Umsøkjarin og kommunan eru í løtuni í samskifti um ta teknisku verkætlanina. Tað vil siga vegir, leiðingar osfr. Verður útstykkingarloyvið játtað, verður tekniska verkætlanin liðugt viðgjørd, og kann seinni góðkennast umsitingarliga.

Útstykkingarætlanin hjá umsøkjara snýr seg um tvær traðir, sum verða mettar at lúka kravið í byggisamtyktini um at vera eitt "natúrliga avmarkað øki". Økið er kringsett av vegi í tríggjar ættir. Í fjórðu ættina er ein grannatrøð.

Vegaføring og byggifelt í útstykkingarætlanini samsvara sum heild við kortskjalið í Serstøku byggisamtyktini. Í uppskoti til broyting av serstøku byggisamtyktini (sum er í umbúnað) er hornið í ein landnyrðing lagt av til eina møguliga framtíðar ferðsluloysn. Tað er í júst hesum økinum, at umsøkjari ætlar at staðseta fríøkið. Hetta merkir, at um kommunan seinni ynskir at gera eina aðra ferðsluloysn (t.d. eina rundkoyring), má støða takast til, í hvønn mun fríøkispláss skal tryggjast í nærumhvørvinum.

Fríøkið er sambært útstykkingarætlanini 377 fermetrar til víddar, svarandi til 10,2 % av samlaðu útstykkingini. Støddin av fríøkinum lýkur sostatt 10%-kravið í byggisamtyktini. Sambært byggisamtyktini kunnu tilhaldspláss o.a. ikki nýtast til annað endamál, enn tey eru løgd av til. Umsøkjari hevur í fyrstu syftu játtað, at einki tøknirúm, skúrar ella aðrir bygningar verða bygdir í hasum økinum. Hetta sæst eisini í útstykkingarætlanini, har byggifeltini eru staðsett uttan fyri tað økið, sum uppskotið til serstaka byggisamtykt leggur av til møguliga framtíðar ferðsluloysn.

Ásetingin í Almennu byggisamtyktini um tilhaldspláss o.a. ikki nýtast til annað endamál, enn tey eru løgd av til, er galdandi, óansæð um tað ítøkiliga verður nevnt í útstykkingarloyvinum. Fyri at tryggja greidleika verður tó mett skilagott at vísa til hesa ásetingina beinleiðis í útstykkingarloyvinum.

Samanumtikið verður umsóknin mett at samsvara við galdandi ásetingar um útstykkingar. Tí verður mælt til at ganga umsókn um útstykkingarloyvi á møti.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
25/08554:
Uppskot um broyting av serstøku byggisamtyktini millum Skotarók og Oyggjarvegin er í umbúnað. Broytingin í serstøku byggisamtyktini nágreinar millum annað hæddarásetingar og tekur atlit til møguliga framtíðar ferðsluloysn. Uppskotið var í almennari hoyring fram til tann 20. mars 2026. Innkomnar viðmerkingar verða í løtuni viðgjørdar av umsitingini.

25/08614:
Eigari hevur søkt um graviloyvi og niðurtøku av verandi tvíhúsum og skúri. Niðurtøkuloyvi varð játtað, men graviloyvi varð sýtt, vísandi til at hetta er ein sameindur partur av einum byggiloyvi.

25/10810:
Vegatkoman til hesar ognirnar umframt grannatraðirnar er viðgjørd í teknisku nevnd og ferðslunevndini. Víst verður til hjáløgdu samtykt frá mars 2026.

26/00048:
Eigari hevur søkt um byggiloyvi til íbúðir í tveimum umførum. Í báðum førum er umsóknin sýtt vísandi til, at fyrst skal søkjast um útstykkingarloyvi og ein teknisk verkætlan skal gerast.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Tekniska deild upplýsir at vera í samskifti við umsøkjara um teknisku verkætlanina.

Býarskipanardeildin viðmælir, at framtíðar byggiloyvi verður treytað av, at uppihaldsøki ella spælipláss verður gjørt. Til hetta upplýsir Byggimálsdeildin, at slík krøv ikki er fastur leistur, og talan hevði tí verið um eina nýggja mannagongd. Í øllum førum er talan í verandi løtu ikki um eitt byggiloyvi, men um eitt útstykkingarloyvi, og tískil verður eingin slík treyt sett í verandi løtu.

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**
26/02510-7 Umsókn
25/10810-8 Samtykt Ferðslunevndin 23.03.2026

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli**:
Tekniski stjóri og deildarleiðarin á byggimálsdeildini mæla til, at:

- umsókn um útstykkingarloyvi verður játtað, treytað av:
  - at grevstrar- og spreingiarbeiði ikki dálkar ella er til óneyðugan ampa fyri vegir og grannaløg sum heild.
  - at allir vegir, gøtur, kloakkir o.a., herundir íbindingar í kommunalan veg og kommunalar leiðingar, skulu gerast sambært tekniskari verkætlan, sum skal góðkennast av kommununi.
  - einki arbeiði má fara í gongd fyrr enn tekniska verkætlanin er góðkend.
  - at ongar leiðingar mugu tyrvast, fyrr enn eftirlitið hevur góðkent tær. Tann, ið stykkjar út, hevur sjálvur skyldu at boðsenda byggimyndugleikanum.
  - fríøkið sambært útstykkingarætlanini kann ikki nýtast til annað enn fríøki, herundir byggjast kann ikki bygningar, tøknirúm ella annað, sum ikki samsvarar við endamálið, sum økið er lagt av til. Hetta sambært Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, kap. III, § 2, stk. 1
- beina málið í teknisku nevnd til kunningar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. apríl 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, og við hesi treyt afturat:

- At kommunan uttan kostnað kann yvirtaka vegir og kloakkir, tá hesi eru góðkend av kommununi. Kommunan tilskilar sær rætt at krevja skjalprógv fyri, at leiðingarnar eru í góðum standi, t.d. við videoupptøkum av leiðingum innan.

**Tekniska nevnd 13. apríl 2026:** Kunnað varð um málið.

Tróndur Sigurðsson krevur málið fyri býráðið.

**Býráðsfundur 30. apríl 2026:** Útsett.

# 139/26 Broyting av serstøku byggisamtykt nr. 7, matr. nr. 1314 - Grannalág

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 26.01.2026 | 26/26 | 25/08430-5 |
| 2 Býráðsfundur | 29.01.2026 | 12/26 | 25/08430-5 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.04.2026 | 112/26 | 25/08430-5 |
| 4 Býráðsfundur | 30.04.2026 | 139/26 | 25/08430-5 |

**Upprunin til málið**
Eigarin av matr. nr. 1314, Tórshavn hevur arbeitt við skipan av økinum, og søkir í tí sambandi um at broyta serstøku byggisamtykina fyri økið, serstøku byggisamtykt nr. 7 fyri Eysturbýin.

**Lýsing av málinum**
Í sambandi við umsóknina hevur eigarin latið inn faldara, ið greitt lýsir endamálið og ynskið fyri økið, sí skjal *Grannalág_reduceret*. Faldarin lýsir inentónirnar, hvør bygging er ynskt, umframt hvørji býarskipanarlig atlit annars verða tikin í eini størri heild. Ítøkiliga skipanin av økinum verður ikki sum víst í faldaranum, men greiningar og meginreglurnar eru tær somu.

Ynskið er at skipa økið við íbúðarbygging í fleiri hæddum. Byggingin er fyrst og fremst staðsett við vestara og norðara mark av ognini, kring eitt størri opið fríøki í landsynningshorninum.

Matr. nr. 1314 liggur á markinum millum vinnuøkið á Óðinshædd, rað-/íbúðarbyggingina á Óðinshædd og sethúsaøkið í Stoffalág, og roynir verkætlanin at knýta økini saman – bæði við bygging, ið so líðandi gerst lægri, frá stóru vinnubygningunum oman móti lágu sethúsunum, og við fríøki og farleiðum, ið knýta kringøkini saman, og eru til nýtslu hjá øllum brúkarum av nærøkinum.

Fleiri møguleikar fyri atkomu til økið hava verið umrøddir. Íbúðarbyggingin fevnir um eini 130 bústaðir, og tískil verður mett, at væntaða økta ferðslutrýstið verður ov stórt umvegis sethúsavegirnar í Lágni og Stoffalág/Breiðablik. Tí verður mett, at neyðugt er við eini atkomu afturat. Sum økið liggur, er natúrligt, at triðja atkoman til økið verður umvegis Mannaskarð, sum er kommunalur vegur. Mannaskarð gongur ikki heilt inn til økið, og tí verður neyðugt at fáa avtalu í lag ella ognartaka til vegatkomu til stykkið.

Bústaðartrýstið í høvuðsstaðnum er stórt, og her er talan um eitt stórt óbygt bústaðarlendi í býnum, og tí verður mett neyðugt at fara undir eina tilgongd at tryggja nøktandi atkomu til økið.

Matr. nr. 1314 liggur í serstøku byggisamtykt nr. 7, í økjunum A2, ætlað sethúsum, B4, ið er ætlað tvíhúsum, raðhúsum og teimum líkum bústøðum, umframt C1, ið er lagt til almenning, har ikki má byggjast. Um ynskta verkætlanin skal kunna fremjast, má A2, sethúsaøkið broytast til B4 øki, ið er ætlað tvíhúsum, raðhúsum og teimum líkum bústøðum, umframt at C1, økið til almenning skal broytast eitt vet. Sí fylgiskjal nr. 1 í skjal *Serstøk byggisamtykt nr. 7 – 06.01.2026,* journal nr. 25/08430-13.

Hóast B4 økið ikki beinleiðis er ætlað íbúðarbygging, so hevur orðingin “og teimum líkir bústaðir” verið nýtt soleiðis, at íbúðir eru at meta sum “teimum líkir bústaðir”, og er m.a. íbúðarverkætlanin hjá Bústøðum á matr. 1322k somuleiðis staðsett í einum B4 øki. Hóast henda siðvenjan hevur verið, so verður tað mett ráðiligt at broyta orðingina fyri B4 øki, soleiðis at íbúðir ítøkiliga verða nevndar. Sí GR. 2 í skjal *Serstøk byggisamtykt nr. 7 – 06.01.2026,* journal nr. 25/08430-13.

Serstaka byggisamtykt nr. 7 ásetur, at bygging í B4 øki má einans verða í samsvari við góðkenda heildarbyggiætlan fyri hvørja B-eind ella náttúrligan part av henni, men annars eru ongar ítøkiligar treytir til vavið av hesari bygging. Tískil eru tað ásetingarnar í almennu byggisamtyktini fyri A1 øki, ið eru galdandi, og har stendur m.a., at í serstakari byggisamtykt kann vera loyvt at byggja hægri, enn ásetingarnar í almennu byggisamtyktini, umframt at loyvi kann vera givið at byggja íbúðir.

Støðumyndin við lýstum hæddum, ið umsøkjarin hevur latið inn, verður at rokna sum ein "heildarbyggiætlan" sambært treytunum fyri bygging í B-eindunum í serstøku byggisamtykt nr. 7 (Gr. 5).

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í A1 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.
Ásetingar fyri A1 øki eru m.a.:

- Umráðisparturin verður lagdur til stakhús. Eftir serloyvi frá byggivaldinum kunnu eisini byggjast tvíhús, raðhús og tílíkir bústaðir fyri eitt húski. Stakhús og tvíhús kunnu eisini hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð.
- Byggistigið skal ikki fara upp um 0,3.
- Nýtslustigið skal ikki fara upp um 0,6 fyri stakhús og 0,7 fyri tvíhús, raðhús og íbúðir.
- Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at byggja íbúðir.

Økið liggur í A2, B4 og C1 øki í serstøku byggisamtykt nr. 7.
Ásetingar fyri A2 øki eru m.a.:

- Við teimum undantøkum, ið eru nevnd niðanfyri undir felagsásetingum, skulu eindirnar ikki verða nýttar uttan til sethús og bygd mugu verða einans stakhús, ið standa fyri seg. Á hvørjari ogn kunnu ikki verða bygd uttan eini sethús, við í mesta lagi tveimum íbúðum.

Ásetingar fyri B4 øki eru m.a.:

- Við teimum undantøkum ið nevnd eru niðanfyri undir felagsásetingum, skulu eindirnar ikki verða nýttar uttan til bústaðir, og bygd mugu, einans verða tvíhús, raðhús og teimum líkar bústaðir.
- Bygt má einans verða í samsvari við góðkendari heildarbyggiætlan fyri hvørja B-eind ella náttúrligan part av henni.

Ásetingar fyri C1 øki eru m.a.:

- C1 verður lagt sum almenningur.

Sí annars skjal *Serstøk byggisamtykt nr. 7 – 06.01.2026,* journal nr. 25/08430-13.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tørvur er á fleiri bústøðum í høvuðstaðnum, og tí er umráðandi, at verandi byggilendi verður gagnnýtt á mest skynsaman hátt. Umsøkjari hevur í tilgongdini við umsitingini ment verkætlanina, soleiðis at hendan lagar seg til kringumstøðurnar og soleiðis at felagshentleikar og fríøkir hava fingið nøktandi rúmd.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Málið er viðgjørt í samstarvi við Byggimálsdeildina, Teknisku deild og Umhvørvisdeildina.

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**

- *Serstøk byggisamtykt nr. 7 – 06.01.2026,* journal nr. 25/08430-13.
- *Grannalág_reduceret,* journal nr. 25/08430-3.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís øki í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja uppskotið til broyting av serstøku byggisamtykt nr. 7 smb. skjalinum *Serstøk byggisamtykt nr. 7 – 06.01.2026,* og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. januar 2026:** Ein meiriluti, Anja Weyhe, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Bergur Robert Dam Jensen, Birgir Nielsen, tekur undir við broytingini undir grein 2 í serstøku byggisamtykt nr. 7, har "íbúðir" verður sett inn í tekstin undir Eindirnar B1, B2, B3 og B4, Raðhúsabygging, men tekur ikki undir við broytingini í kortskjalinum fyri matr. nr. 1314 og fylgiskjali Heildarætlan fyri matr. nr. 1314.

Kári Johansen tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðsfundur 29. januar 2026:**

Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í Byggi- og býarskipanarnevndini, og tað varð samtykt við tíggju atkvøðum fyri og trimum atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Elin Heðinsdóttir Joensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Lilja Blaasvær, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Síðani tað á Býráðsfundi 29. januar varð samtykt, ikki at taka undir við heildarætlanini fyri matr. nr. 1314, hevur umsøkjari arbeitt víðari og gjørt broytingar í ætlanini. Størsta broytingin er tann, at parkeringin nú verður skipað í parkeringskjallara, og ger hetta, at størri partur av økinum kann liggja sum fríøki. Harafturat eru tær báðar longu bygningseindirnar móti vesturi býttar sundur, soleiðis at tað í staðin verða fýra bygningseindir móti vesturi. Hæddirnar á bygningunum eru framvegis soleiðis, at tær móti vinnuøkinum eru lutfalsliga høgar – upp til uml. 5 hæddir, meðan tær móti stóra fríøkinum og sethúsaøkinum fyri eystan eru lágar, uml. 2 hæddir.

Umsitingin metir hetta vera eina góða skipan av økinum, og mælir til at góðkenna hana. Tá talan er um so stór øki til íbúðarbygging, er tað gott fyri trivnaðin í økinum, at parkering verður skipað undir jørð. Hendan loysnin ger rúm fyri, at "natúrliga" fríøki í landsynningshorninum gerst størri, og rúm verður somuleiðis fyri at gera eitt "tún" í útnyrðingshorninum, ið er meira býarkent.

Bygningarnir móti vestri eru býttir í smærri eindir, og hetta ger, at skalain gerst minni, umframt at tað skapar nakrar miðingarlinjur millum vinnuøkið og bústaðarøkið.

Av tí at parkering smb. nýggju ætlanini er skipað í parkeringskjallara, verður nýtslustigið munandi hægri, enn loyvt er sambært ásetingunum fyri A1 umráðispartin í almennu byggisamtyktini. Uppskot verður lagt til politiska viðger um at broyta ásetingarnar fyri A1 umráðispartin, soleiðis at tað í serstakari byggisamtykt fyri eitt natúrligt avmarkað øki verður loyvt at víkja frá ásetingunum um mest loyvda byggi- og nýtslustig, sí mál nr, 26/02792, *Broyting av ásetingum um byggi- og nýtslustig fyri A1 øki í almennu byggisamtyktini.*

Í mun til bygging á matr. nr. 1314 verður mælt til, at mest loyvda byggistig verður 0,30 og mest loyvda nýtslustig verður 0,70. 0,10 kann leggjast afturat byggistiginum og 0,30 afturat nýtslustiginum, sum einans kann verða nýtt til parkeringskjallara, goymslurúm og tílíkt.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið:**

- *Broyting av ásetingum um byggi- og nýtslustig fyri A1 øki í almennu byggisamtyktini,* journal nr. 26/02792.

**Skjøl:**

- *Grannalág – dagført 19.03.26 –* journal nr. 25/08430-23.
- *Serstøk byggisamtykt nr.* 7 *– Apríl 2026,* journal. nr. 25/08430-25.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja uppskotið til broyting av serstøku byggisamtykt nr. 7 smb. skjalinum *Serstøk byggisamtykt nr. 7 – Apríl 2026,* og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. apríl 2026:** Ein meiriluti, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Birgir Nielsen, tekur undir við tilmælinum, treytað av at høvuðsatkoman verður gjøgnum Mannaskarð.

Kári Johansen tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 30. apríl 2026:** Tikið av skrá.

**FUNDURIN LOKIN KL. 20:55**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Elsa Berg | Heðin Mortensen | Heidi Lava Elgeirsdóttir |
| Annita á Fríðriksmørk | Kristianna Winther Poulsen | Bergur Robert Dam Jensen |
| Guttormur í Skála | Annfinn Brekkstein | Tróndur Sigurðsson |
| Kári Johansen | Høgni Vilhelmsen | Birgir Nielsen |
| | Jón Kragesteen | |